SEPTEMBER 2021

# VERJA & VANDI




JAVNAÐARFLOKKURIN Á FÓLKATINGI

# INNIHALD


**Formæli** **4**

- Frá radara til Huawei og aftur til radara: Hvørjar avgerðir kunnu vit taka? 6
- Tíðarlinja: Frá heimastýri og yvirtøkum til radaran og Huawei 8
- Heimsins eygu vend móti Føroyum 9
- Samanumtøka 9

**Verja I** **11**

- Kalda kríggið og søgan handan NATO 12
- Bygnaður og innihald 14
- Strategiski týdningurin av Føroyum 14
- Trygdarpolitiskur fyrimunur fyri danir at Føroyar og Grønland eru partur av ríkinum? 16
- Hernaðarligar installatiónir og hernaðarligt virksemi í Føroyum 18
    - Færøernes Kommando: 18
    - Marinustøðin í Havn og Flåderadio Thorshavn: 19
    - Mjørkadalur, Sornfelli (Flyvestation Thorshavn) og Early Warning: 19
    - Bretska LORAN-A støðin á Skúvanesi: 19
    - Ætlanir um nýggja bretska “radiopeilingarstøð” í Føroyum: 19
    - Flogvøllurin og NATO-neyðlendingarvøllur: 19
    - NATO-“ankerplads” og NATO-støð fyri kavbátar: 19
    - LORAN-C-støðin á Eiði: 19
    - Loynilig amerikonsk radarskipan á Sornfelli (Forward Scatter Station) 21
    - Arktisk Kommando og danski verjuflotin 21
- Nýggj avtala um kapasitetspakka til donsku verjuna 2021 22
- Er uppgávan hjá Arktisk Kommando ov stór? 23
- Politiska støðan í Arktis 24
- Stórveldini, NATO og hinir aktørarnir í Arktis 25
    - Russland 25
    - USA, NATO og tey smáu 26

**CASE:** USS Donald Cook vitjar í Føroyum 28
Løgtingssamtyktir og mótmæli móti hernaðarligum virksemi í Føroyum 29
Hvør var støðan hjá politisku flokkunum undir kalda krígnum? 33
Fólkaflokkurin og Tjóðveldi teir mest atfinningarsomu 33
Fólkaflokkurin skiftir kós, og Javnaðarflokkurin gerst anti NATO 34
**CASE:** Russlandshandilin 36
Valið millum heimsáskoðanir 38
Hvat siga flokkarnir í dag? 40
Hvat so nú? 42
**Vandi II** 43
Nýggjar hóttanir og fleirtáttað krígsførsla (hybrid warfare) 44
Týðandi undirstøðukervi (kritiskur infrastrukturur) 46
Cybertrygd, føroysk áhugamál og kinesiski listin 46
**CASE:** Huawei-málið setti Føroyarí heimspolitiskan samanhang 47
Hví ynskir Kina at veita 5G til øll hesi londini? 50
Tá ið Huawei skuldi til Føroyar 51
Avleiðingar fyri Føroyar 53
Støðan í dag 54
Samanumtøka 55
Huawei málið – tíðarlinja 56
**Fylgiskjøl** **58**
Viðkomandi uttanríkispolitisk organ 58
Fylgiskjøl um ríkisrættarligu støðu Føroya 61
Fámjinsskjalið, Altjóðarættur og sjálvsavgerðarrættur Føroya 61
Fylgiskjøl um fjarskiftismálið 67
**Keldulisti** **69**

# FORMÆLI

## At siga nei er ikki longur ókeypis

Støðan í Arktis er vorðin spent farnu árini. Í Føroyum merkist tað á tann hátt, at fleiri lond ikki bara eru áhugað í tí, vit gera, men royna eisini at fáa ávirkan á tær avgerðir, vit taka. NATO-lond vilja til dømis hava, at ein hernaðarradari verður settur upp í Føroyum, og USA hevur gjørt púra greitt, at vit ikki skulu byggja samskiftisnetið út í samstarvi við Huawei.

Avgerðir okkara um hesi viðurskifti snúgva seg sostatt eisini um, hvørt vit verða roknað sum ein ábyrgdarfullur og álítandi samstarvsfelagi hjá teimum sameindu. Tær signalera fyri umheiminum, hvørjum parti vit eru í, og um vit eru til reiðar at 'gera okkara part'.

Í øðrum Norðurlondum hyggja tey við størsta álvarsemi at nýggju, spentu støðuni í økinum.

Russisk vápnadubbing í norðri – á Kola-hálvoynni og á Frans Jósefslandi – hevur ført til eina avtalu millum USA og Noreg um fýra hernaðarstøðir.

Russiskar hernaðarvenjingar í Eystursjónum hava gjørt, at svenski Ríkisdagurin hevur økt hernaðarútreiðslurnar við 40 prosentum komandi árini.

At russisk flogfør aftur og aftur koma inn í danskt loftrúm hevur fingið danir at herða eftirlitið.

Orsøkin til, at russiski atburðurin verður sæddur sum ein veruligur vandi, er tað, sum Russland farnu árini hevur gjørt í eitt nú Ukreina og Hvítarusslandi.

Men tað eru ikki bara landamørk, sum verða hótt. Vaksandi og støðugt álvarsamari álop á KT-skipanir – eisini í Norðurlondum – hava gjørt, at verja og trygd nú eru vorðin nógv meira umfatandi hugtøk. Trygd snýr seg í dag eisini um at verja KT-skipanir, sum alt samfelagið er bundið at.

Og eitt er púra greitt: Einki land kann verja seg sjálvt. Hvørki hernaðarliga ella á KT-økinum. Hjá tí demokratiska vesturheiminum snýr tað seg um at standa saman og arbeiða saman. Gera vit ikki tað, kunnu vit ikki verja londini og tey virði, vit byggja á.

Í Føroyum eru kortini mong, sum ikki síggja álvaran í støðuni. Nógv av tí, sum er sagt í kjakinum um hernaðarradaran og telesamskiftið, bendir á eina vantandi fatan av teirri trygdarpolitisku avbjóðing, vit hava:

> ”Vit skulu vera uttanveltað.”
>
> “Eingin hernaðarradari á føroyska jørð.”
>
> “Skal radarin setast upp, skulu vit hava stórt gjald afturfyri.”
>
> “Føroyar hava ongar fíggindar.”
>
> ”Eingin annar skal siga okkum, um vit skulu nýta útgerð frá Huawei ella ikki.”

”Danskarar skulu ikki taka avgerðir um føroysk viðurskifti.”

”Vit skulu ikki býta heimin upp í ónd og góð lond.”

”Russarar hava einki gjørt okkum, og vit hava gott samstarv við teir.”

”Eg kundi ikki skitið meira á tað, um russisk flogfør eru í føroyskum loftrúmi hvønn dag.”

Onga aðrastaðni enn í Føroyum er hetta tann ráðandi tónin í kjakinum. Tað tykist sum um, at nógv als ikki halda okkum vera partur av heiminum í verju- og trygdarpolitiskum høpi.

Orsøkin er ikki, at vit ikki kunnu enda sum offur fyri ágangi. Strategiska støða okkara ger okkum tíverri ”áhugaverd”. Tað, sum hóttir onnur vestanlond, hóttir eisini okkum.

Orsøkin til sermerkta kjakið í Føroyum er helst, at vit aldrin hava havt fulla ábyrgd av trygdarviðurskiftum. Undir kalda krígnum gjørdu danskir myndugleikar avtalur um herstøðir í Føroyum heilt uttan um føroyskar myndugleikar. Vit fingu ikki innlit, vit fingu ikki vitan og vit fingu - ella tóku - ikki ábyrgd. Og tað merkti í stóran mun kjakið.

Nú skulu aftur stórar avgerðir takast. Ein radari skal kanska setast upp. Huawei-útgerðin skal kanska skiftast út. USA skal kanska hava loyvi at nýta havnirnar. Vit mugu taka støðu til hetta og nógv annað. Og hesa ferð hevur tað týdning, hvat vit siga. Danska stjórnin hevur gjørt greitt, at hóast trygd og verja formliga eru donsk málsøki, so verður einki gjørt ímóti viljanum hjá føroyskum myndugleikum.

Tað er hetta, vit hava kravt, og tað er soleiðis, tað skal vera. Hetta snýr seg um Føroyar, og tí skulu vit ikki bara krevja fult innlit men eisini taka avgerðirnar. Men tað krevur, at kjakið verður meira nuanserað, enn tað var undir kalda krígnum. Tá var tað ókeypis at siga nei til alt – tí eitt nei frá okkum hevði ongar avleiðingar. Vit kundu blása og hava mjøl í munninum. Vit kundu siga tað populera, væl vitandi at tað ópopulera – men neyðuga – bleiv gjørt kortini.

Nú verður eitt nei í orði eisini eitt nei í verki. Nú fær tað avleiðingar, um Føroyar venda teimum sameindu bakið og ganga egnar leiðir.

Tí mugu tær avgerðir, sum vit taka, byggja á haldgott grundarlag. Vit mugu gera okkum greitt, hvørjar avleiðingarnar verða, um vit velja hetta ella hitt.

Vónin er, at hetta rit, sum bæði lítur aftureftir og frameftir, kann vera við til at styrkja grundarlagið og verða eitt íkast til tað týðandi kjakið um, hvar Føroyar skulu standa í verju- og trygdarpolitiskum høpi.

Tað eru starvsfólk hjá Javnaðarflokkinum á fólkatingi, sum hava gjørt ritið.

Sjúrður Skaale,
*fólkatingsmaður*

# Frá radara til Huawei og aftur til radara: Hvørjar avgerðir kunnu vit taka?

Seinasta árið hava tvey mál veruliga fest í kjakið um ríkisrættarligu støðu Føroya og leiklutin hjá Føroyum í heimssamfelagnum. Vit hava sæð landsstýrið koma undir trýst úr Kina og USA, tí Føroya Tele ætlaði at velja Huawei sum veitara av 5G tøkni í Føroyum, og tað hevur skapt politiska ósemju, at danska fólkatingið hevur sett pengar av til at seta ein radara upp á Sornfelli, áðrenn løgtingið hevði viðgjørt spurningin.

Málini eru nærum 'klassisk' dømi um slíkt, ið kann elva til politiska ósemju – bæði millum Føroyar og Danmark og innlendis í Føroyum – tí tey nerta við tann grundleggjandi spurningin um, hvat Føroyar hava heimild til og ikki.

Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, og tey mál, sum hava týdning fyri allar partarnar í felagsskapinum eru 'felagsmál'. Hesi eru uttanríkismál og trygdar- og verjumál. Ríkisfelagsskapurin má sambært grundlógini tosa við eini tungu,



tá ið hann skal tosa við aðrar statir. Føroyar og Grønland kunnu altso ikki umboða seg sjálvi í uttanríkisviðurskiftum, tí tað er í stríð við grundlógina.[1]

Í verandi skipan kunnu hesi málini altso ikki yvirtakast, soleiðis at løgtingið kann taka avgerðir fyri Føroyar, eins og løgtingið ger á flest øðrum økjum.

Millum tey fyrstu málsøkini, sum Føroyar fingu ræði á, var fjarskiftisøkið. Vóru Føroyar púra avbyrgdar frá umheiminum, hevði ein avgerð um, hvønn 5G veitara Føroya Tele skuldi velja sær, verið púra ókontroversiell, tí avgerðin er innan eitt yvirtikið málsøki, og av handilsligum slag. Men nú alsamt fleiri samfelagstænastur eru knýttar upp í internetið – og enntá eru púra bundnar av tí – eru alsamt fleiri lond farin at hugsa um fjarskiftisøkið sum eitt serstakliga týdningarmikið og viðbrekið øki, sum tørvar stóra vernd. Um eitt nú tól í heilsugeiranum eru knýtt at 5G, kann tað bókstavliga gerast munurin millum lív og deyða, hvørt veitarin av 5G er álítandi.

Tí eru NATO og ES farin at flokka samskiftiskervi sum týðandi undirstøðukervi (kritiskan infrastruktur). Tað vil siga sum ein part av samfelagnum, ið vit ikki kunnu vera fyriuttan, og hvørs upplýsingar og tænastur ikki skulu umsitast av óálítandi veitarum. Sostatt hava alsamt fleiri ES- og NATO-lond gjørt strangari reglur á fjarskiftisøkinum, sum í veruleikanum útihýsa kinesiskum veitarum sum Huawei.

Tí er ivi nú um, hvørt føroyska fjarskiftisøkið skal flokkast sum eitt handils- og vinnumál, sum Føroyar hava fult ræði á, ella sum eitt trygdarmál, ið er danskt málsøki.[2]

Málið um 5G veitaran vísir greitt, at tær avgerðir, Føroyar taka, hava týdning. Hetta lutfalsliga lítla føroyska og handilspolitiska málið bleiv til eitt trygdarpolitiskt stórmál, sum bæði Kina og USA sýndu stóran ans og royndu at ávirka.[3]

Meðan Huawei málið er dømi um eitt føroyskt málsøki, sum er í vanda fyri at verða umflokkað til felagsmál, er støðan næstan øvut viðvíkjandi lofteftirlitsradaranum á Sornfelli.

Tá ið danski verjumálaráðharrin almannakunngjørdi sokallaða arktiska kapasitetspakkan í februar 2021, gjørdist greitt, at pengar vóru settir av til føroyskan lofteftirlitsradara. Í Føroyum stóðst stórt kjak um hetta, tí løgtingsfólk vístu á, at tey hvørki vóru kunnað um lofteftirlitsradaran ella høvdu fingið møguleika at viðgera spurningin á tingi.

Hóast verjumál eru danskt málsøki, er politisk semja um, at løgtingið skal spyrjast eftir í málum, sum beinleiðis viðvíkja Føroyum – eins og staðfest við Fámjinsskjalinum í 2005.[4] Lofteftirlitsradarin hevði eisini verið umrøddur á innanhýsis fundum millum danska verjumálaráðharran og føroyska uttanríkismálaráðharran, hóast løgtingið ikki hevði viðgjørt spurningin, og bæði verjumálaráðharrin og Føroya landsstýri hava lagt dent á, at hóast pengar longu eru settir av til lofteftirlitsradaran, verður hann ikki settur upp uttan samtykki frá løgtinginum.

Umframt, at málini um Huawei og lofteftirlitsradaran festa í vælkenda kjakið um støðu Føroya í ríkisfelagsskapinum, tykjast Føroyar brádliga skula taka størri trygdarpolitisk fyrilit. Økti áhugin fyri Arktis og størri bundni av tøkni hevur við sær, at avgerðir Føroya viðvíkjandi 5G og lofteftirlitsradara verða áhugaverdar fyri onnur lond, og tær staðfesta samstundis fyri umheiminum, hvar Føroyar hoyra heima uttanríkispolitiskt.

Danska stjórnin hevur tó lagt upp til, at Føroyar, Grønland og Danmark fáa eina samstarvsnevnd, har mál av uttanríkis-, verju-, og trygdarpolitiskum týdningi kunnu viðgerast. Enn er kortini óvist, hvørjar heimildir koma at liggja í nevndini, og hvussu hon kemur at virka.[5]

1 Ávís undantøk eru gjørd, soleiðis at Føroyar kunnu umboða seg sjálvar uttanríkispolitiskt innan yvirtikin málsøki – sí meiri undir DFG skipanini og uttanríkispolitisku lógini í fylgiskjølunum.

2 Danska stjórnin hevur í fleiri umførum gjørt vart við, at hon ikki fer at taka avgerðir uttan um føroyska løgtingið. Á tann hátt hava Føroyar í praksis ein stóran avgerðarrætt, men løgfrøðiliga hevur Danmark møguleika fyri at taka yvirtikin málsøkir úr Føroyum aftur – sí undir 'delegationsteori' og '(u)igenkaldelighed' í fylgisskjølunum.

3 13. mai, 2020, sendi Løgmansskrivstovan út tíðindaskriv, har løgmaður staðfesti at fjarskifti í framtíðini 'verður ein inngrógvin partur av trygdarpolitikki' https://www.lms.fo/fo/kunning/tidindi/okkara-fjarskifti-skal-vera-dygt-og-trygt/

4 Sí fylgisskjal um Fámjinsskjalið.

5 Í svari upp á ein fyrispurning frá Edmundi Joensen gevur danski forsætisráðharrin ikki nakað greitt svar um endamálið við nevndini, tí tað skal avgerast millum londini seinni. Forsætisráðharrin sigur kortini orsøkina vera, at Danmark, Føroyar og Grønland mugu samstarva um uttanríkis-, trygdar-, og verjupolitikk vegna økta áhugan fyri Arktis og Norðuratlantshavi. https://www.ft.dk/samling/20201/spoergsmaal/s1631/svar/1794939/2417793/index.htm

TÍÐARLINJA

# FRÁ HEIMASTÝRI OG YVIRTØKUM TIL RADARAN OG HUAWEI

**1939-45:** Føroyar eru undir Stórabretlandi undir 2. veraldarbardaga og avskornar frá Danmark. Eftir kríggið er lítil áhugi fyri at fara aftur til at vera danskt amt

**1948:** Eftir drúgvar samráðingar og fólkaatkvøðu við einum lítlum meiriluta fyri loysing fáa Føroyar eina heimastýrislóg – lóggávuvald á ávísum økjum

**1958:** Løgtingið loyvir NATO at byggja hernaðarliga eftirlitsstøð á Sornfelli

**1963:** NATO fer undir radaraeftirlit við skipa- og flogferðslu í Norðuratlantshavi

**1995:** Nýggj stýrisskipanarlóg ger tingið meira líkt øðrum lóggávutingum í Norðurlondum

**1989-95:** Kreppuár í Føroyum. Føroyar verða settar undir umsiting, og nógv fólk flyta av landinum

**1993-98:** 'Bankasendingarnar', tíðindastubbar og innsløg um málið vísa, at Føroyar ikki kunnu lastast fyri alla ábyrgdina einsamallar, og nógvir føroyingar kenna seg sviknar – sum sæst aftur í vaksandi tokkanum til loysingarsinnaðu flokkarnar valini eftir

**1999:** Frágreiðing um Føroyar undir kalda krígnum avdúkar, at Føroya løgting og fólk ikki fingu fult innlit í hernaðarliga virksemið í Føroyum undir kalda krígnum

**1995-2004:** Fullveldisstríðið tekur dik á seg, og undirtøkan veksur

**2005:** Uttanríkispolitiska lógin, sum ásetir uttanríkispolitisku heimildir Føroya (at Føroyar kunnu gera altjóða avtalur á yvirtiknum málsøkjum, so leingi avtalurnar ikki áleggja Grønlandi ella Danmark skyldur)

**2005:** Yvirtøkulógin – Ískoyti til heimastýrislógina, sum staðfestir, at Føroyar kunnu yvirtaka flest øll málsøki

**2005:** Fámjinsskjalið – ein viðurkenning av, at Føroyar skulu takast við upp á ráð viðv. uttanríkis- og trygdarpolitikki

**2006:** Løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum – skráseting av yvirtiknum málsøkjum

**2007:** Hernaðarradarin í Føroyum sløktur

**2010:** Samskiftisuppgávan á Sornfelli verður niðurløgd, og NATO gevst við øllum virksemi í Føroyum

**2012:** Makreltræta – ES sanktionerar Føroyar, og Danmark atkvøður blankt

**2016:** Danmark sendir hernaðarstyrki til Sýria og metir tað ikki vera í stríð við Fámjinsavtaluna

**2020:** Spurningurin um tele-undirstøðukervið í Føroyum verður stórpolitiskt mál

**2021:** Í einum arktiskum kapasistetspakka setir fólkatingið pengar av til lofteftirlitsradara í Føroyum, sum elvir til stórt kjak

# Heimsins eygu vend móti Føroyum

Í uttanríkispolitisku frágreiðingunum, sum verða viðgjørdar í løgtinginum, er ein nýggj gongd at hóma. Jenis av Rana, uttanríkismálaráðharri, segði millum annað í framsøguræðuni hjá sær á vári 2021, at:

> **“Sum land í Arktis og í Atlantshavi, nú heimsins eygu í alsamt størri mun venda sær henda vegin, er umráðandi, at Føroyar eru tilvitaðar um egna støðu í mun til umheimin og onnur lond og um støðuna í økinum kring Føroyar. Tað er ein fortreyt fyri at kunna taka støðu til grundleggjandi spurningar og reka ein skynsaman, virknan uttanríkispolitikk.” [6]**

Økti spenningurin í Arktis merkir altso, at Føroyar skulu vera meira tilvitaðar um samstarvsfelagar sínar. Av somu orsøk er ein nýggj staðfesting komin upp í frágreiðingina frá uttanríkisráðnum: at mál, sum ikki vanliga verða roknað sum trygdarmál, kunnu fara at roknast sum trygdarmál. Her verður serliga víst á fjarskiftisøkið og undankanning av ognarlutunum í útlendskum vinnuligum virksemi. Danmark hevur nevniliga í 2021 samtykt lóggávur, sum júst hava ásetingarnar um útlendskan ognarlut og herða trygdarkrøvini á fjarskiftisøkinum.

Frágreiðingin staðfestir somuleiðis, at:

> **“Tá ið lond skulu taka stig, ið hava trygdarpolitisk endamál, snýr tað seg ikki longur bara um vápn, hervald o.s.fr., sum tað í størri mun hevur gjørt, tá ið valdsjavnvágin í heiminum var greiðari enn í dag.” [7]**

Ein ótti hevur tískil verið, at verður fjarskiftisøkið brádliga sæð sum trygdarmál og skulu allar útlendskar handilsavtalur gjøgnum undankanning, fyri at fáa greiðu á ognarlutunum, kann tað í ringasta føri flyta vald og sjálvsavgerðarrætt úr Føroyum til Danmarkar, tí trygdarmál ikki kunnu yvirtakast sambært yvirtøkulógini.

Hetta er ein av orsøkunum til, at skiftandi landsstýri hava lagt fram ynski um, at Føroyar verða tiknar meira við upp á ráð og fáa betri innlit í virksemið á økinum. Somuleiðis hava báðar undanfarnu uttanríkispolitisku frágreiðingarnar víst á tørvin at endurskoða og nútímansgera ríkisfelagsskapin. Danska stjórnin hevur verið ógvuliga samstarvssinnað og hevur í fleiri førum vissað Føroyar um, at ongar avgerðir í Danmark fáa avleiðingar fyri Føroyar uttan viðgerð í løgtinginum.

## Samanumtøka

Føroyar kunnu gera altjóða avtalur, so leingi sum Danmark ikki verður bundið av teimum – tó treytað av, at avtalan viðvíkur einum málsøki, sum Føroyar longu hava yvirtikið. Hesar eru rímiliga víðar heimildir – og tó.

> **“Føroysk luttøka í altjóða samfelagnum er løgfrøðiliga grundað á tvær semjur millum landsstýrið og donsku stjórnina, heimastýrislógina frá 1948 og á uttanríkispolitisku lógina frá 2005, umframt siðvenju á økinum.” [8]**

Tá Danmark metir Føroyar fara út um hesar heimildirnar, verður ofta víst til, at tað er í stríð við grundlógarásetingar ella við uttanríkispolitisku lógina. Føroyar hava fleiri ferðir upplivað man í Føroyum ikki hevur verið í stríð við heimildirnar, hóast Danmark hevur mett tað øvuta. Sagt á annan hátt, at Danmark hevur ákært Føroyar fyri at koyra fyri reytt, tá ið Føroyar ikki hildu eina ljóskurv standa nærhendis.

Í 2017 gjørdu Føroyar, Grønland og Ísland eina útnorðuravtalu millum londini, sum Danmark ógildaði, tí stjórnin metti hana vera í stríð við uttanríkispolitisku lógina. Í 2018 forðaði Danmark eisini Føroyum í at gerast partur av einari menningarverkætlan, sum skuldi arbeiða við mannarætt-

6. Av Rana, J. (2021) Framløga av frágreiðing um úrvald uttanríkismál, s. 4

7. Ibid, s. 9

8. Uttanríkis- og Mentamálaráðið. (2019) Frágreiðing um uttanríkismál í 2019

indum. Grundgevingin var tá, at Føroyar ikki høvdu yvirtikið 'mannarættindi' sum málsøki, og tíansheldur kundu gera altjóða avtalur hesum viðvíkjandi.

Tulkingin fyri nær hetta kemur fyri, kann onkuntíð tykjast selektiv. Í prinsippinum er Danmarkar ríki ein eindarstatur sambært grundlógini og uttanríkispolitisku lógini. Tað vil siga, at partarnir í ríkisfelagsskapinum skulu samráðast sum eitt og sama ríki og ikki sum sjálvstøðugir partar av einum ríki, ið samráðast egna vegna. Sostatt eru allar avtalurnar, sum Føroyar hava gjørt – uttan mun til um tær eru gjørdar á yvirtiknum málsøki – í stríð við hesa avmarkandi tulkingina av DFG skipanini – tað sum er siðvenjan á økinum.[9] Sum er, hava Føroyar fleiri avtalur, ið einans eru millum Føroyar og onnur lond og ikki viðkoma Danmark ella Grønlandi.[10]

Formliga loyva ásetingarnar enntá Danmark at taka aftur alt valdið á málsøkjum, sum Føroyar hava yvirtikið, men kortini er tað ikki hent. Tað verður eisini mett at vera politiskt ógjørligt. Føroyar hava í so máta eitt 'de facto' prinsipp um 'uigenkaldelighed'.[11]

Á fólkatingi er eisini siðvenja fyri, at danska stjórnin leggur fram árligar frágreiðingar um ríkisfelagsskapin til orðaskifti í fólkatingssalinum. Síðstu árini hevur stjórnin sagt seg viðurkenna ymsu áhugamálini hjá Grønlandi og Føroyum, og er sinnað at arbeiða við at nútímansgera DFG skipanina, sum rúmar hesum. Harumframt stuðlar stjórnin føroyskum fríhandilsavtalum og sigur seg vera sinnaða at arbeiða fyri at nútímansgera galdandi handilsavtalur við ES. Tað eru tekin um, at danska stjórnin víðkar tulkingina av, hvussu ríkisfelagsskapurin virkar.



Í løtuni eru tó mál, sum kunnu vera avbjóðandi fyri ríkisfelagsskapin. Yvirtikin málsøki eru í vanda fyri at verða umflokkað sum uttanríkis- og trygdarpolitikkur. Á tann hátt kunnu avgerðarheimildirnar í Føroyum verða meira avmarkaðar framyvir.[12]

Tað er júst spurningurin um, hvørjar heimildir Føroyar hava til sjálvar at gera handils- og samstarvsavtalur við onnur lond ella útlendskar fyritøkur, uttan at danir ella onnur lond blanda seg uppí, sum er kjarnin í málinum um føroyska samstarvið við Huawei. Málið sigur eisini eina søgu um politiska og handilsliga rásarúmið hjá Føroyum (og øðrum londum) í einum altjóða samanhangi, har millum annað kappingin um Arktis harðnar.

Hetta er ikki ein nýggj støða. Undir kalda krígnum var somuleiðis stórur spenningur í økinum. Strategiska støða Føroya gjørdi okkum til part av einum stríði millum stórveldini, og fleiri hendingar elvdu til spenning millum vinstra- og høgravongin í Føroyum eins og millum Føroyar og Danmark.

Hesum hyggja vit at í næsta parti, Verja, har vit viðgera leiklutin hjá NATO undir kalda krígnum í Føroyum, umframt føroysku mótstøðuna, politiska stríðið og politiska orðaskiftið í dag um uttanríkismál.

Í parti 2, Vandi, venda vit aftur til ítøkiliga málið við Huawei í eini lýsing av handilsliga- og uttanríkispolitiska rásarúminum hjá Føroyum, og hvat fyri slag av ágangi og vandum, vit kunnu verða noydd at verja okkum ímóti.

Partarnir í frágreiðingini kunnu væl lesast leysir av hvørjum øðrum.

[9] Umvegurin at veita sjálvstýrandi pørtunum Føroyum og Grønlandi ávísar uttanríkispolitiskar heimildir hevur verið at rópa ríkisfelagsskapin fyri "Danmarkar kongsríki, Føroyum og Grønlandi viðvíkjandi". Hetta verður vanliga verður rópt "DFG skipanin."

[10] Sambært Ole Spiermann, løgfrøðingi, er heimastýrislógin í síni kjarnu í stríð við grundlógarásetingarnar. Grundlógin ásetur nevniliga treytaleyst, at lóggevandi valdið liggur hjá kongshúsinum og fólkatinginum, meðan heimastýrislógin (saman við yvirtøkulógini) hevur júst tað øvuta til endamáls: at lata vald frá kongi og fólkatinginum til Føroyar. At løgtingið yvirtekur málsøki og smíðar egnar lógir er altso eitt stórt frávik frá grundlógini, og Spiermann vil vera við, at hetta er vorðið nýggj rættarsiðvenja fyri, hvussu Ríkisfelagsskapurin virkar – ein nýggj stýrisskipanarlig siðvenja (Spiermann, O. 2007).

[11] Á opnum samráði í september 2020 viðv. fjarskiftisøkinum, staðfesti danski løgmálaráðharrin, at stjórnin ongar ætlanir hevði um at afturkalla ella fremja broytingar innan føroysk málsøki ella broyta heimastýrislógina uttan um føroyskar myndugleikar. Somuleiðis staðfesti løgmálaráðharrin, at hóast eitt prinsipp um uigenkaldelighed ikki er staðfest løgfrøðiliga (de jure), metir stjórnin prinsippið vera galdandi í verki (de facto). https://www.ft.dk/samling/20191/almdel/F%C3%86U/samspm/B/index.htm

[12] Til ber at lesa meira um ríkisrættarligu støðu og avgerðarheimildir Føroya í fylgiskjølunum.

PARTUR

# 1

VERJA

# VERJA

## Kalda kríggið og søgan handan NATO

**“If there is anything certain today, if there is anything inevitable in the future, it is the will of the people of the world, for freedom and for peace.”**

**Harry Truman, amerikanskur forseti 1949**

Í apríl mánaði í 1949 undirskrivaðu tólv lond ta Norðuratlantisku avtaluna í Washington, sum legði grundarlagið fyri tí, vit í dag kenna sum NATO. Londini vóru eitt nú Bretland, Danmark, Frakland, Ísland, Italia, Holland, Noreg og USA. Seinni komu eisini lond sum Týskland og Spania upp í verjusamgonguna, sum í dag telur 30 limalond. Tað, sum NATO-samstarvið byggir á, er staðfest í kendastu greinini av



tíðindablaðið sosialurin

frælsi javnaður brøðralag

Nr 31 ★ leygardagur 10. mars 1984 57. árg. ★ kr. 5,-

Vit skulu liva við avleiðingunum

Stórbardagin um Atlantshavið verður við Føroyar!

Her møtast NATO-herflotin og sovjettiskir kavbátar



*Sosialurin, 10. mars 1984*

avtaluni: Grein 5 um at eitt álop á eitt limaland er eitt álop á øll limalond og NATO sum heild. Hóast hetta er týdningarmesti liðurin í samstarvinum, er henda greinin bert brúkt eina ferð í søguni – eftir terrorálopini á USA 11. septembur 2001, tá NATO kravdi, at limalondini stuðlaðu USA í sínum aftursvari til álopini.[13]

Í grundini ber til at siga, at grundirnar fyri verjusamstarvinum í NATO longu vórðu lagdar, tá bolsjevikkarnir tóku valdið í Petrograd í 1917. Tí grundleggjandi snúði tað seg um, hvat fyri slag av samfelagsskipan fór at sigra, eftir at Týskland og sameindu teirra taptu annan veraldarbardaga. Stóru sigurs-harrarnir frá øðrum veraldarbardaga, Russland og USA, vildu nýta høvið at gera sína ávirkan galdandi kring heimin. Og talan var um tvær fullkomiliga mótstríðandi samfelagsskipanir, sum kappaðust um at seta dagsskránna í altjóða politikki. Longu heilt stutt eftir annan veraldarbardaga fóru partarnir, sum í krígnum høvdu stríðst móti einum felags fígginda, so-statt í stríð móti hvør øðrum.

Eitt notat frá NATO sekretariatinum í París 1954 staðfesti, at vandin fyri opnum kríggi var stórur. Hóttanin eystanífrá og aftursvarið vestanifrá var eisini nakað, sum setti dagsskránna í donskum verjupolitikki og danska samfelagnum yvirhøvur hesi árini. Men longu í 1955, við tað at Stalin doyði, tóktist Sovjetsamveldið minni ágangandi. Og politiskt var semja í Danmark og øðrum NATO londum um, at vandin fyri kríggi innan stutt tíðarskeið var minkaður, tó at støðan framvegis var sera spent.[14]

Serliga var tað vandin fyri atomkríggi, sum bleiv niðurtónaður. Metingin í danska verjumálaráðnum var, at russar vóru bangnir fyri atomkríggi, og tí helst fóru at brúka siðbundna krígsførslu – um nakað. Men hóast óttin fyri atomkríggi svann nakað, so er tað greitt, at tilstundandi "stórkríggið" millum eystur og vestur altíð var partur av dagskránni og dagligu fyrilitunum hjá NATO.[15]

Stríðið og kapprenningin millum eystan- og vestanveldini merktist eisini í Føroyum í tíðini eftir annan veraldarbardaga. Amerikanarar sýndu stóran áhuga fyri Føroyum og fyri verandi herstøðunum, sum bretar høvdu bygt undir krígnum. Tá USA fyri dønum skuldi grundgeva fyri nýggjum hernaðarligum installatiónum í Føroyum í 1958, var orsøkin sambært loyniligum notati, at installatiónirnar skuldu skiljast "som en del af den defensive afskrækkelse af sovjetisk aggression".[16] Sostatt er sannlíkt, at amerikanarar og NATO lutfalsliga skjótt eftir annan veraldarbardaga vendu eyguni móti Føroyum fyri at tryggja, at oyggjarnar gjørdust partur av sameindu verjuketuni í Norðuratlantshavinum.

Sami hugsunarháttur gjørdi seg eisini galdandi í Sovjett. Longu í 1946 – árið eftir seinna heimsbardaga – staðfesti sovjettiski sendimaðurin í Washington, Novikov, í síni frá-greiðing um amerikanskan uttanríkispolitikk, at USA førdi seg aggressivt fram á heimspallinum, og at tjóðin stevndi eftir heimsyvirveldi. Hann undirstrikaði somuleiðis, at ein partur av hesi ætlanini snúði seg um at reka russar og Sovj-ett burtur, har teir høvdu ávirkan, og at amerikanarar eis-ini víðkaðu virksemið í Norðuratlantshavinum m.a. í Íslandi, Føroyum og Grønlandi.[17] Amerikanarar høvdu millum annað hernaðarflogvøllin í Keflavík, Thule og aðrar støðir í Grøn-landi og seinni eisini konsulat í Nuuk.

Við øðrum orðum: Báðir partar fylgdu ómetaliga væl við í tí, sum hin fekst við. Báðir royndu at styrkja og formalisera ávirkanina kring heimin.

Og báðir partar ræddust hvønn annan og tilstundandi stór-kríggið.

Undir kalda krígnum og áratíggjuni eftir varð nógv kjakast um, hvønn týdning Føroyar høvdu fyri NATO og USA og har-við eisini Danmark. Eingin føroyskur politiskur myndugleiki hevur nakrantíð samtykt, at Føroyar skuldu gerast ein partur av NATO. Og føroyingar hava sum heild ofta verið ímóti og talað at tí NATO-virksemið, sum hevur verið í oyggjunum. Løgtingið hevur heili fýra ferðir samtykt, at føroyingar vilja halda seg uttan fyri hernaðarligar ósemjur ella ikki vilja lata seg brúka til hernaðarlig endamál. Kortini vórðu herstøðir settar upp í Føroyum, vit vórðu drigin upp í NATO, og tað elvdi ofta til stórar spenningar á politiska vígvøllinum í Før-oyum.

[13] https://www.history.com/news/nato-article-5-meaning-history-world-war-2 & https://www.nato.int/cps/en/natohq/126169.htm

[14] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 10

[15] Ibid. s. 10

[16] Ibid. s. 10

[17] Ibid. s. 11

# Bygnaður og innihald

Hesin fyrri partur av greiningini fer í høvuðsheitum at viðgera, hvønn týdning Føroyar høvdu fyri NATO, NATO-virksemið í Føroyum sum heild, politiska orðaskiftið og ósemjurnar. Greiningin av tí søguliga partinum byggir í stóran mun á aðrar greiningar – bæði gamlar og nýggjar – harav serliga ta hjá Bent Jensen, søguprofessara, og hjá Jákupi Thorsteinssyni og Sámal T. F. Johansen, søgufrøðingum, ið hava viðgjørt viðurskiftini í Føroyum undir kalda krígnum. Tær niðurstøður, sum verða gjørdar viðvíkjandi tí søguliga partinum, skulu tískil takast við tí fyrivarni, at tær einans byggja á hesar báðar høvuðskeldurnar, tó at tað eru aðrar greinar og bøkur skrivaðar um hetta tíðarskeið í føroyskari søgu.

# Strategiski týdningurin av Føroyum


Síða 12 tíðindablaðið sosialurin Nr. 118 — 14. oktober 1989

**Føroyar stóran hermálsligan týdning fyri NATO og USA**

*Sosialurin, 14. oktobur 1989*

Tó at Føroyar ikki vóru eins týdningarmiklar fyri amerikanarar sum Grønland, vórðu vit eisini drigin inn í verjuskipanirnar hjá USA og NATO, tá danir gjørdust partur av NATO. Longu í 1951 bundu danir seg í avtalu við USA til at lata hernaðarliga valdið á Grønlandi upp í hendurnar á USA. Eingin slík avtala varð gjørd viðvíkjandi Føroyum, men trýstið frá USA og øðrum sameindum var stórt á fleiri danskar stjórnir um at sleppa at seta hernaðarligar installatiónir upp í Føroyum.[18]

Fyri danir var støðan avbjóðandi. Sambært heimastýrislógini frá 1948 var eingin ivi um, at danir reint juridiskt høvdu avgerðarrættin í trygdarpolitikkinum og verjuni av danska ríkinum. Men politiskt var støðan tvørlig, tí føroyskir myndugleikar, løgtingið og landsstýrið ikki vildu hava hernaðarligar installatiónir og herfólk til Føroya. Ein amerikanskur eygleiðari av trygdarviðurskiftum í Norðurlondum undir kalda krígnum skrivaði soleiðis í 1986:

> **"Siden anden verdenskrig har danskerne og færingerne haft et ømtåleligt (uncomfortable) forhold til hinanden. Øboerne var slet ikke tilfredse med, at den danske regering ikke rådførte sig med dem om tilslutningen til NATO. Alligevel er det lykkedes for danskerne at etablere en militær tilstedeværelse på øerne."[19]**

[18] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 12

[19] Ibid. s. 12

## FØROYA – OG GRØNLANDSKORTIÐ

Føroya – og Grønlandskortið skulu skiljast sum samráðingarkort, sum danskar stjórnir hava kunnað brúkt eitt nú í samráðingum við USA og NATO-lond um, hvussu nógv danir skulu gjalda til sína verju. Heilt ítøkiliga hava danir serliga kunnað brúkt Grønlandskortið til samráðingar fyri at fáa meira ávirkan og í summum førum sleppa undan at liva upp til kravið frá NATO og USA um verjuútreiðslur. Hetta var serliga galdandi undir kalda krígnum, tá amerikanarar støðugt heita á danir at hækka sínar verjuútreiðslur.

Strategiski týdningurin av Føroyum er væl og virðiliga skjalfestur. Í danska uttanríkismálaráðnum eru loynilig skjøl, sum staðfesta, hvussu týdningarmiklar Føroyar vóru fyri NATO:

> **"Færøerne udgør med sin beliggenhed i det nordlige Atlanterhav mellem England og Island i tilfælde af krig et vigtigt led i forsvaret af det nordatlantiske område og Storbritannien, og det vil derfor være af afgørende betydning for de vestlige allierede at bevare kontrollen over øerne."**
>
> **"Udover, at det under en eventuel konflikt vil være nødvendigt for de vestlige allierede at bevare kontrollen over øerne, kan disse også tænkes benyttet som støttepunkt for NATO's flådestyrker, og det kan i denne forbindelse nævnes, at NATO på forhånd har sikret sig adgang til under en eventuel krig at benytte en færøsk fjord som alternativ ankerplads for NATO-flådestyrker."[20 & 20a]**

Afturat hesum verður nevnt, at Føroyar eisini hava stóran týdning sum "observationspost mod fjendtlige fly". Altso at oyggjarnar liggja soleiðis fyri, at tær geva gott eftirlit við luftferðsluni í økinum. Í tí samanhanginum verður víst til NATO rit, sum undirstrika, at ein góð radaraskipan í Norðuratlantshavinum er avgerandi fyri at fanga møguligar aggressiónir eystanífrá. Eisini LORAN-støðin[21] í Føroyum verður ítøkiliga nevnd í sambandi við eftirlitið við sjó- og luftferðsluni, og í tí sambandinum eisini ynskið frá USA um at útbyggja og styrkja verandi LORAN-skipan í Føroyum. At enda vísa skjølini eisini á, at eisini eystanveldið vísti Føroyum stóran áhuga m.a. við tað, at nógv sovjetisk fiskiskip royndu kring Føroyar, og at russarar høvdu sett fram ynski um at sleppa at brúka ein føroyskan fjørð sum fastan basa fyri trolarar sínar.[22]

USA og NATO mettu altso, at Føroyar vóru av sera stórum týdningi. Tað áhugaverda er eisini, at skjølini hava neyvar orðingar um, hvussu umráðandi tað var at "varðveita ræðið" yvir Føroyum (bevare kontrollen). Tað er eitt greitt dømi um, at politiska støðan og hugburðurin í Føroyum viðvíkjandi hernaðarvirksemi og NATO var nakað, sum upptók danir og amerikanarar. Og at bæði londini í fleiri førum bóru ótta fyri, at ónøgdin í Føroyum gjørdist so stór, at tey mistu tamarhaldið á oyggjunum.

Uppá nógvar mátar ber til at siga, at týdningurin av Føroyum (og Grønlandi) fyri NATO var so mikið stórur, at tað gjørdi

[20] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum, s. 90

[20a] Longri niðri í ritinum kann lesast um, tá Donald Cook vitjaði í Føroyum, og at áhugin at brúka føroyskar firðir og havnir er komin aftur.

[21] LORAN (Long-Range-Navigation) er ein radionavigatiónsskipan, sum brúkar radiosignal frá meira enn trimum statiónum fyri at finna fram til, hvar eitt skip ella flogfar er.

[22] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum, s. 90-91

Danmark til ein nógv størri og sterkari NATO-sameindan, enn landið annars hevði verið. Ein slík støða kundi sjálvandi styrkja samráðingarstøðuna hjá donsku stjórnini í samráðingum við USA og hini sameindu londini. Hetta er tað, sum seinni er vorðið kent sum ávikavist **Føroya- og Grønlandskortið**[23], sum danir kundu brúka undir samráðingum við hini NATO-londini.

# Trygdarpolitiskur fyrimunur fyri danir at Føroyar og Grønland eru partur av ríkinum?

**"I hele min tid som udenrigsminister lagde jeg derfor særdeles stor vægt på, at jeg også var udenrigsminister for Færøerne og Grønland. Færøerne og Grønland var gode kort at have på hånden, når NATO-ministrene samledes i 80-erne. Når der skulle lappes på surheden over danske fodnoter, eller når de andre spurgte, hvordan det gik med at nå op på det forsvarsbudget på 3 % af nationalproduktet, som den tidligere statsminister Anker Jørgensen havde lovet i NATO, så kunne det give lidt pusterum, når jeg fortalte, hvor vigtigt det var at have stabile forhold i Nordatlanten og Arktis, og hvor store beløb Danmark brugte på at sikre dette gennem vor økonomiske støtte til Færøerne og Grønland."**

**Uffe Ellemann-Jensen, Din egen dag er kort (1996)**[24]

Í politiskum kjaki um viðurskiftini millum Danmark og Føroyar verður ofta sagt, at danir hava havt stórar trygdarpolitiskar fyrimunir av, at Føroyar og Grønland eru partur av ríkinum. Hetta kann síggjast í ljósinum av tveimum viðurskiftum.

Fyri tað fyrsta hava danir havt sítt at svara til, tá USA og onnur NATO-limalond hava lagt trýst á donsku stjórnina fyri at fáa hana til at liva upp til kravið um, at trý prosent av bruttotjóðarúrtøkuni skuldu brúkast til verjumál undir kalda krígnum.[25] Í løtuni stendur USA fyri góðum 20 prosentum av samlaðu verju- og umsitingarútreiðslunum hjá NATO, meðan Týskland, Ongland og Frakland gjalda millum 10 og 15 prosent hvør. Restini av útreiðslunum standa tey smærru londini fyri. Í mun til bruttotjóðarúrtøkuna hjá USA er upphæddin 3,4 prosent, meðan miðalupphæddin fyri restina av limalondunum í 2020 var 1,55 prosent.[26] Fólkatingið samtykti í 2019, at Danmark stigvíst skal hækka játtanina til verju á fíggjarlógini, so hon svarar til 1,5 prosent av BTÚ í 2023.

Í øðrum lagi vórðu viðurskiftini viðvíkjandi hernaðar- og radarastøðum, og yvirskipaða mótstøðan móti hesum, ofta knýtt saman við politiskum áhugamálum í Føroyum, sum snúðu seg um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Longu í 1963 spurdi Johan Nielsen, føroyskur fólkatingsmaður fyri Javnaðarflokkin, danska verjumálaráðharran, um danska stjórnin fekk gjald fyri LORAN-støðina og radarastøðina, sum NATO hevði bygt í Føroyum. Og í tinginum, í bløðunum og aðrastaðni vóru kanska serliga tjóðveldisfólk mælsk um, at danska stjórnin beinleiðis forvann pening burtur úr hernaðarstøðunum í Føroyum.[27]

So seint sum í útvarpssendingini Breddanum 26. januar 2021 helt Høgni Hoydal fyri, at danir beinleiðis høvdu vunnið pening burtur úr hernaðarstøðunum í Føroyum, og at Danmark hevði spart á leið 30 milliardir seinastu áratíggjuni vegna virksemið í Føroyum.[28]

Fólkatingsmaðurin Johan Nielsen fekk svarið. Men svarið hjá Victor Gram verjumálaráðharra var, sum ráðharrasvar ofta eru, bronglut. Yvirhøvur kundi verjumálaráðharrin kortini afturvísa, at Danmark tjenti pengar uppá støðirnar, og vísti somuleiðis á, at raksturin av støðunum skuldi roknast sum partur av gjaldinum hjá Danmark sum NATO-limaland. Sambært greiningini eftir Jákupi Thorsteinssyni er sannlíkt, at Johan Nielsen setti spurningin fyri at taka broddin av

[23] Henriksen, A., Rahbek-Clemmensen, J. (2017) Grønlandskortet: Arktis' betydning for Danmarks indflydelse i USA

[24] Ellemann-Jensen, U. (1996) Din egen dag er kort

[25] Hetta kravið er seinni broytt til eitt mál um, at í 2024 skulu øll limalond brúka tað, sum svarar til tvey prosent av síni bruttotjóðarúrtøku til verjumál, meðan luturin hjá USA eftir ætlan fer at lækka.

[26] https://www.bbc.com/news/world-44717074

[27] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum, s. 61

[28] https://kvf.fo/breddin?sid=119470

politisku agitatiónini hjá Tjóðveldisflokkinum. Eisini amerikanska sendistovan í Keypmannahavn staðfesti hetta í notati.[29]

Spurningurin er eisini stutt viðgjørdur í nýggju frágreiðingini hjá DIIS – Dansk Institut for Internationale Studier, sum staðfestir, at tó at sokallaða "Føroyakortið" vigaði nakað hjá dønum til samráðingar við sameindar undir kalda krígnum, so varð hesin týdningurin ofta "politiseraður" og kanska uppblástur nakað. Tað skal eisini skiljast á tann hátt, at nútíðargerðin av verju og hernaðarligum virksemi, sum eisini gekk fyri seg undir kalda krígnum, hevur gjørt, at landafrøðilig fyrilit viðvíkjandi verju og hernaðarligum virksemi ikki hava líka stóran týdning sum fyrr. Tað skal helst meira gransking til fyri júst at staðfesta, hvussu týdningarmiklar Føroyar vóru og eru fyri Danmark í viðurskiftunum við USA og NATO. Frágreiðingin staðfestir eisini, at hesin týdningurin ikki hevur verið líka sjónligur í tíðini eftir kalda kríggið.[30]

Samanumtikið er helst ógjørligt at siga, um danir vunnu ella ikki vunnu pengar. Fyri danir skulu raksturin og útreiðslurnar av virkseminum í Føroyum roknast sum partur av fíggjarætlanini fyri NATO, meðan tað fyri partar av føroyingum skal skiljast sum ein avsláttur, sum Danmark hevur orsakað av Føroyum.

Í frágreiðing síni kemur Bent Jensen til niðurstøðuna, at danir hava havt stórar fyrimunir av at lata føroyskt øki til NATO-virksemi, og at tað er sannlíkt, at danir samanlagt hava brúkt minni pengar uppá verju av tí sama. Samstundis leggur hann tó afturat, at føroyingar eisini fingu búskaparligan vinning burturúr:

> **"Alt taler for, at det færøske territorium, som skiftende danske regeringer stillede til rådighed for NATO og USA til militær udnyttelse, har aflastet Danmark i forhold til forsvarsalliancen og USA. Med det "færøske bidrag" til det fælles forsvar kunne Danmark lettere sige nej til USA og alliancen på andre områder. Om Danmark økonomisk har tjent på dette forhold i form af lavere forsvarsudgifter, lader sig ikke sikkert besvare, men er sandsynligt. Færøerne fik klart økonomisk udbytte af de militære anlæg. Færøernes infrastruktur blev forbedret, og de militære anlæg skabte arbejdspladser også for færinger."[31]**

Tað er ein sannroynd, at danir – eins og nógv onnur smá vestanlond – í høvuðsheitum føra uttanríkispolitikk eftir boðum úr USA. Bæði sosialdemokratiskar og borgarligar stjórnir í Danmark lýsa USA sum týdningarmesta samstarvsfelagan á verjuøkinum, og danir hava seinastu áratíggjuni fylgt verjupolitikkinum hjá USA, eisini tá talan hevur verið um hernaðarlig stríð í Miðeystri. Tað er eisini púra greitt, at danir hava kunnað brúkt Føroyar, og kanska serliga Grønland, sum eitt styrkiskort í samráðingum við USA og onnur NATO-lond, og at hetta í summum førum helst hevur havt við sær, at danir hava kunnað grundgivið seg burtur úr kravinum um at brúka trý og seinni tvey prosent av bruttotjóðarúrtøkuni til verjumál. Í fjør segði Trine Bramsen, verjuministari, at USA og NATO eiga at viðurkenna donsku átøkini í Arktis sum ein beinleiðis part av danska ískoytinum til NATO:

> **"NATO adresserer, at Arktis er vigtig og anerkender, at Danmark løfter et stort ansvar i Arktis."[32]**

**Trine Bramsen, verjuministari**

At Føroyar og Grønland vóru partur av danska ríkinum hevur sostatt eisini verið sera avgerandi fyri, at danir kundu lýsa seg sum ein týdningarmikil sameindur hjá USA undir kalda krígnum. Nakað, sum seinni er blivið fullkomiliga avgerandi í donskum uttanríkispolitiskum viðurskiftum.

Tað ber eisini til at staðfesta, at Føroyar, hóast politiska mótstøðu í Føroyum, gjørdust ein týdningarmikil partur av Norðuratlantisku verju- og eftirlitsketuni hjá NATO. Og at luttøka okkara einans var eitt úrslit av, at vit hanga saman við Danmark.

[29] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum, s. 61

[30] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis

[31] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 166

[32] https://jyllands-posten.dk/international/ECE12505820/forsvarsminister-trine-bramsenvil- have-natos-anerkendelse-for-indsats-i-arktis/

# Hernaðarligar installatiónir og hernaðarligt virksemi í Føroyum



Loynilig amerikonsk radarstøð

Í meira enn 25 ár hava føroyingar og danir hildið, at støðin á Sornfelli bert hýsti NATO, og at hon hevði litlan týdning sum so.

Nú kemur framm í ljósmála, at umframt at hýsa NATO, so hevur amerikanska flogvápnið sína egnu top-loyniligu radarstøð á Sornfelli.

Nevniliga teir fýra skermarnar niðanfyri NATO-kuplarnar. Hetta skrivar danska hernaðarkritiska blaðið »forsvar«

Síða 12

*Sosialurin, 17. mars 1984*

Politisku viðurskiftini millum danir og føroyingar undir kalda krígnum vóru ofta spent. Serliga vóru tað hernaðarligu installatiónirnar og hjáveran av donsku verjuni, sum skaptu ósemjur. Politiski myndugleikin vildi sum kunnugt í fyrstu atløgu ikki, at hernaðarligar installatiónir vórðu settar upp í Føroyum. Og í aðru atløgu, at skuldi slíkt gerast, skuldu føroyingar kunnast væl og virðiliga og vera partur av tilgongdini.

Ein røð av donskum stjórnum vóru tískil settar í tvístøðu. Á annan bógvin var ynskið frá NATO, USA og Bretlandi púra greitt: Føroyar og føroyskt øki var strategiskt týdningarmikið og skuldi brúkast til hernaðarligar installatiónir og tilbúgving. Á hin bógvin var fólksliga og politiska mótstøðan í Føroyum sera stór. Føroyskir politikarar og mótstøðufólk vístu ferð aftan á ferð á, at hernaðarligu installatiónirnar vóru ólógligar og beinleiðis brot á fleiri løgtingssamtyktir, sum púra greitt staðfestu, at Føroyar skuldu ikki dragast upp í hernaðarligar ósemjur ella kríggj.[33]

Tá samanum kom, vórðu nakrar fáar hernaðarligar installatiónir settar upp í Føroyum, men talan var í høvuðsheitum um sivilar verju-, tilbúgvingar-, og eftirlitsfunktiónir. Sum heild vóru tað heldur ikki nógv fólk, sum komu at taka sær av ymsu installatiónunum. Fyrst í hálvfjersunum vóru í alt 256 donsk herfólk, fimm donsk sivilfólk, 47 sivilir føroyingar og 11 amerikanarar, harav ein teirra var offiserur.[34 & 35]

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir alt, sum kann kallast hernaðar–ella verjustøðir í Føroyum undir kalda krígnum.[36]

### FÆRØERNES KOMMANDO:

Í 1951 varð Marinedistrikt Færøerne sett á stovn. Seinni, í 1976, varð tað broytt til Færøernes Kommando (FRK), sum skuldi stjórna bjargingar- og inspektiónstænastuni hjá donsku sjóverjuni í føroyskum sjógvi. Undir sama myndugleika hoyrdi eisini fiskiveiðueftirlitið. FRK hevði tvey inspektiónsskip og manningin hjá FRK taldi í 1971 fimm offiserar, níggju starvsfólk, ellivu "værnepligtige", tríggjar sivilar umframt manningina á inspektiónsskipunum.[37]

[33] Jensen, B. (2004) Færøernde under den kolde krig, s. 189

[34] Ibid. s. 189

[35] Sambært frágreiðingini hjá Bent Jensen var ongantíð nøkur verulig hernaðarlig útgerð í Føroyum undir kalda krígnum. Í hálvtrýssunum vóru ætlanir um at útstationera amerikanska herdeild og uppsetan av luftverjukanónum í Føroyum. Somuleiðis vóru ætlanir um at stovna eina føroyska heimaverju, men hvørgin av ætlanunum gjørdust veruleiki orsakað av føroysku mótstøðuni.

[36] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig & Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum

[37] Seinni í hálvfjersunum settu føroyingar sítt egna fiskiveiðueftirlit (Nú; VØRN) á stovn, sum samskipaði virksemið við Forsvarets Fiskeriinspektionstjeneste.

### MARINUSTØÐIN Í HAVN OG FLÅDERADIO THORSHAVN:

Marinustøðin í Havn virkaði undir myndugleikanum hjá FRK og tók sær m.a. av radiosamskiftinum við skip hjá donsku verjuni í føroyskum øki. Støðin rak eisini Faroes Terminal, ein móttakarastøð, sum varð sett upp í sambandi við undirstøðustrukturprogrammið hjá NATO við beinleiðis kápulsambandi til Skotlands. Móttakarastøðin fangaði boð, sum vórðu send víðari til Noregs.

### MJØRKADALUR, SORNFELLI (FLYVESTATION THORSHAVN) OG EARLY WARNING:

Støðin í Mjørkadali og radarin á Sornfelli vórðu sett upp í 1962 sum liður í eini ketu av NATO radarastøðum. Í 1971 arbeiddu í alt 140 fólk á støðini, herundir 19 sivilir føroyingar. Tann sokallaða Eskadrille 605 var eisini stationerað á støðini, sum tó hvørki hevði flogfar ella tyrlur. Í 1989 var støðin í Mjørkadali rópt "hin norðasti skansin í ensku radaraskipanini."

Í 1963 varð ein Early Warning skipan knýtt at støðini á Sornfelli. Skipanin knýtti saman ymiskar radarastøðir í NATO-lufteftirlitinum og var partur av eftirlitinum yvir Vesturevropa. Løgtingið varð ikki kunnað um skipanina.

### BRETSKA LORAN-A STØÐIN Á SKÚVANESI:

Undir øðrum veraldarbardaga setti bretska hervaldið eina sokallaða LORAN samskiftisstøð upp á Skúvanesi. LORAN er stytting fyri Long Range Navigation. Eftir kríggið tóku danir yvir raksturin av støðini, hetta hóast USA hevði víst áhuga at yvirtaka. Støðin, sum offisielt einans hevði sivilar funktiónir, hevði sostatt eisini stóran hernaðarligan áhuga, og undir seinna veraldarbardaga var hon avgerandi fyri, at flog- og skipskonvoyir hjá teimum sameindu trygt kundu navigera yvir Atlantshavið. Danska sjóverjan lat síðst í 40'unum støðina yvir til sivila myndugleikan Fyrvæsenet, og hon varð niðurløgd í 1977.

### ÆTLANIR UM NÝGGJA BRETSKA "RADIOPEILINGARSTØÐ" Í FØROYUM:

Í 1951, nøkur fá ár eftir, at bretar lótu Loranstøðina á Skúvanesi til danir, ynsktu bretar at byggja nýggja sokallaða radiopeilingarstøð í Føroyum, sum offisielt skuldi rópast ein veðurstøð. Danir samskiftu við bretar um málið, men kendu seg trýstar av russum við tað, at russiski uttanríkisráðharrin hevði sagt, at "verjustøðir á donskum oyggjum mugu sjálvandi vera danskar". Støðin gjørdist ongantíð veruleiki.

### FLOGVØLLURIN OG NATO-NEYÐLENDINGARVØLLUR:

Undir krígnum bygdu bretar føroyska flogvøllin. Eftir kríggið fullu vøllurin og bygningarnir í órøkt, og landsstýrið ynskti, at alt varð tikið niður, soleiðis at økið kundi brúkast til annað. Bretar og NATO ynsktu tó vøllin varðveittan, og tá avtornaði góðtók landsstýrið, at vøllurin varð settur í stand treytað av, at hann eisini kundi brúkast til sivila flúgving millum Føroyar og Keypmannahavn. Av skjølum framgongur, at flogvøllurin eisini bleiv útpeikaður sum NATO neyðlendingarvøllur. Flogvøllurin fekk eisini størri týdning av tí, at Ísland ynskti amerikanararnar burtur frá stóra basanum í Keflavík. Tá samanum kom, vórðu amerikanarar tó verandi í Íslandi, og flogvøllurin í Vágum fekk ongantíð serligan hernaðarligan týdning aftur.

### NATO-"ANKERPLADS" OG NATO-STØÐ FYRI KAVBÁTAR:

Sambært skjølum skuldi leikluturin hjá Føroyum í einum komandi kríggi eisini vera at virka sum støð fyri NATO-verjuskip eins og undir seinna veraldarbardaga. Harumframt ynskti NATO at brúka Skálafjørðin sum kavbátahavn. Í samráð við táverandi løgmann Kristian Djurhuus gekk danska stjórnin ynskinum á møti, og í 1956 bleiv Skálafjørðurin oyramerktur sum "emergency advanced submarine staging base". Tað innibar í grundini, at danir góðtóku, at NATO slapp at brúka Skálafjørðin sum "NATO-havn" í krígstíð.

### LORAN-C-STØÐIN Á EIÐI:

Síðst í 50-unum og fyrst í 60-unum vildu amerikanarar seta fleiri hernaðarligar installatiónir upp í Føroyum. Talan var um eina NATO-ávaringarstøð (Early Warning System) móti bumbuflogførum; eina samskiftis- og ávaringarskipan móti møguligum interkontinentalum missilálopum (Ballistic Early Warning System); og eina LORAN-C "longdistance" navigatiónsstøð. Tá saman um kom fekk USA bert loyvi at seta upp LORAN-C støðina í 1958, uttan at løgtingið varð kunnað. Sum heild vóru fá í donsku stjórnini, sum vistu, at LORAN-C støðin hevði eitt beinleiðis hernaðarligt endamál við tað, at hon var neyðug fyri, at nýggju Polaris-kjarnorkukavbátarnir hjá USA kundu raka russisk mál. Føroyska støðin á Eiði var miðpunktið í Norðuratlantisku LORAN-ketuni, sum, umframt ta føroysku, taldi 30 støðir í Týsklandi, Noregi, Íslandi, Grønlandi og Kanada. Tað var amerikanska sjóverjan, US Coastguard, sum fíggjaði raksturin av støðini, og danska Fyrvæsenet tók sær av dagliga rakstrinum. Danir vildu ikki, at tað kom fram, at støðin eisini hevði eitt beinleiðis hernaðarligt endamál, og kallaðu tískil verkætlanina eitt "danskt, sivilt projekt".




*Thetis inspektiónsskip. Mynd: Forsvaret*




*Knud Rasmussen inspektiónsskip. Mynd: Forsvaret*




## LOYNILIG AMERIKONSK RADARSKIPAN Á SORNFELLI (FORWARD SCATTER STATION)

Í 1984 avdúkaði danska blaðið "Forsvar", at danir høvdu latið amerikanarar seta upp og reka eina sokallaða NARS-station á Sornfelli. Avdúkingin hevði stóran týdning, tí hon staðfesti, at danir høvdu forbrotið seg móti tí offisiella danska basapolitikkinum, sum skuldi eitast bert at loyva donskum støðum á danskari jørð.

## ARKTISK KOMMANDO OG DANSKI VERJUFLOTIN

Tað er Arktisk Kommando, sum hevur dagligu ábyrgdina av eftirliti og verju kring Føroyar og í arktiska økinum við Grønland. Í donsku Verjuavtaluni 2010-2014 varð samtykt at leggja Færøernes og Grønlands Kommando saman í Arktisk Kommando, sum í dag fevnir um bæði Grønland og Føroyar.[38]

Høvuðssætið hjá Arktisk Kommando liggur í Nuuk. Deildin í Føroyum varð sett á stovn í 1951, og uppgávurnar eru m.a. hernaðarliga verjan av Føroyum og Grønlandi, eftirlit og **suverenitetshandhevjan**,[39] eftirlit við fiskiskapi og umhvørvi umframt bjargingartænasta.[40] Tá hugsað verður um, hvussu stórt luft- og sjóøkið kring Føroyar og Grønland er, og hvussu ymiskar uppgávurnar kunnu vera, er skjótt at koma til ta niðurstøðu, at uppgávan at handhevja suverenitetin í Norðuratlantshavinum er sera stór og krevjandi.

Í dag arbeiða umleið 100 fólk hjá Arktisk Kommando, og sjóverjan kring Føroyar og Grønland telur fýra inspektiónsskip í Thetis-klassanum og trý smærri skip í Knud Rasmussen klassunum, sum eisini kunnu sigla í tjúkkum ísi.[41]

### SUVERENITETSHANDHEVJAN

Suverenitetshandhevjan merkir í stuttum leypandi eftirlit við sjó-, land- og luftøki, førleikin at reka burtur ella á aðrar mátar tryggja sær, at útlendsk før uttan heimild ikki sleppa inn í økið, og at lógloysi ikki valdar í økinum. Statir, sum als ikki megna hetta, kunnu ikki gera krav uppá suverenitet í økinum. Besta dømið um vantandi suverenitetshandhevjan er helst Somalia, sum ikki megnar at tryggja útlendsk skip móti piratum í egnum sjóøki.

[38] Rahbek-Clemmensen, J., Salling Larsen, E., Vedby Rasmussen, M. (2012) Forsvaret i Arktis. Suverænitet, samarbejde og sikkerhed, s. 17

[39] Bangert Struwe, L., Vedby Rasmussen, M., Knus Larsen, K. (2012) Suverænitetsbegrebet under kontinuerlig forandring. Suverænitet og det danske forsvar, s. 18

[40] https://forsvaret.dk/da/organisation/arktisk-kommando/#megaMenu2

[41] Ibid.

# Nýggj avtala um kapasitetspakka til donsku verjuna 2021

Ein breiður fólkatingsmeiriluti samtykti í februar í ár ein nýggjan arktiskan kapasitetspakka til donsku verjuna. Avtalan er úrslitið av drúgvum kjaki seinastu mongu árini um økta áhugan fyri Arktis, eitt meira ágangandi Russland og avmarkaða førleikan hjá donsku verjuni at hava eftirlit og handhevja suverentitet í økinum. Talan er um 1,5 milliardir krónur, sum fram til 2023 eitt nú skulu nýtast til nýmótans dronur yvir Grønlandi og tann í Føroyum nógv umrødda radaran fyri smáar 400 milliónir. Sambært eygleiðarum verða serliga dronurnar eitt kærkomið ískoyti til eftirlitið av arktiska økinum, men radarin á Sornfelli er eisini ein avgerandi liður í at tryggja, at eingi hol eru í eftirlitinum av loftferðsluni í Norðuratlantshavinum. Radarin skal brúkast til eftirlit við stríðsflogførum, rakettum og luftvápnum.[42]

Tað var ein frágreiðing frá Dansk Institut for Internationale Studier (DIIS), sum í fjør staðfesti, at tað eru "hol" í lofteftirlitsskipanini í ríkisfelagsskapinum, og at flogfør og rakettir móti USA ella Stórabretlandi í grundini kunnu ferðast gjøgnum økið uttan at síggjast á nøkrum radara.[43] Myndin niðanfyri vísir eftirlitið í Arktis og umtalaðu "holini" í skipanini millum Føroyar og Noreg og Ísland og Grønland.




*Kelda: DIIS - Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis (2020)*

[42] https://nyheder.tv2.dk/politik/2021-02-10-ny-milliardaftale-indgaaet-for-at-styrke-arktis

[43] https://nyheder.tv2.dk/politik/2021-02-10-tv-2-erfarer-her-er-danmarks-nye-vaabeni-kampen-om arktis?fbclid=IwAR0gGVW7v0D9sIVb-E5w7Sd6h7O2HbbTMP-7S7t5-24zk4xChXh1ys4SD5Q

# Er uppgávan hjá Arktisk Kommando ov stór?

Politiski, handilsligi og hernaðarligi áhugin fyri Arktis er vaksin sera nógv seinnu árini. Og áhugin fer helst at halda fram. Ein røð av politiskum avtalum, frágreiðingum frá Verjumálaráðnum, granskarum og donsku verjuni hava seinastu árini staðfest, at tørvur er á stórum íløgum og dubbing, um Danmark saman við sínum sameindu skal megna at hava eftirlit kring Føroyar og Grønland og handhevja sín suverenitet. Ein frágreiðing frá 2016, um uppgávurnar hjá donsku verjuni í Arktis, staðfesti, at danska verjan ikki er før fyri at hava eina samanhangandi og dagførda støðumynd av hóttanarmyndini á landi, sjógvi og í luftini í arktiska økinum, og at verjan í tí samanhanginum eftirspurdi eina yvirskipaða styrking av eftirlitskapasitetinum.

Ítøkiliga vísir frágreiðingin á, at tørvur er á økisdekkandi fylgisveinaeftirliti, meira radaraeftirliti og fleiri eftirlitsflúgvingum fyri at eftirkanna og staðfesta fylgisveinamyndir. Harumframt varð sagt, at tørvur var um sumrarnar á at seta eina fregatt inn í arktiska sjóøkið fyri at styrkja luft-, sjó- og landseftirlitið og fyri at kunna loysa search and rescue uppgávur. Somuleiðis vísti frágreiðingin á, at tørvur var á styrktum samskiftis-, kommando- og eftirlitsskipanum, og at Arktisk Kommando hvørki hevur nokk av manning ella nóg góða útgerð til at loysa uppgávurnar, serliga innan fyri eftirlit og samskifti.[44]

Áður umrøddi kapasitetspakkin á 1,5 milliardir krónur til donsku verjuna skal eisini síggjast í ljósinum av, at politiskir myndugleikar, granskarar og danska verjan eru á einum máli um, at tørvur er á stórum íløgum og upprustingum komandi árini, skal verjan kunna loysa sínar uppgávur og handhevja suverenitetin í føroyskum og grønlendskum øki.[45]

Í nýggjari frágreiðing frá DIIS rør mann harumframt framundir, at trygdarpolitiska støðan í Arktis er í ferð við at broytast. Yvirskipað er metingin, at tað gerst alsamt truplari at varðveita Arktis sum eitt “lágspenningsøki”[46] við tað, at stórveldini USA, Russland og seinnu árini eisini Kina vísa økinum størri og størri ans.[47] Serliga av tí at ísurin bráðnar, og økið harvið gerst meira áhugavert sum ein flutnings- og handilsfarleið, og tí tað nú fer at bera til at útvinna ríka náttúrutilfeingið í økinum – herundir eisini sonevnd “rare-earth minerals” – virðismikil mineral, sum verða brúkt í samskiftis-, telefon- og telduútgerð.

Sambært fleiri eygleiðarum er eisini hóttanarmyndin í Eystursjónum broytt nógv seinnu árini við tað, at Russland er vorðið meira sjónligt og ágangandi í økinum. Søguliga hava tað serliga verið Finnland og Svøríki,[48] sum hava merkt hetta, men seinastu árini er tað komið fyri fleiri ferðir, at russisk stríðsflogfør eisini flúgva í donskum loftrúmi.[49] Alt bendir sostatt á, at danir – og hini norðanlondini – hesi seinnu árini hava fingið ein meira ágangandi granna eystanfyri.

Samstarvið á verjuøkinum millum Danmark, Finnlands, Ísland, Noreg og Svøríki fer í høvuðsheitum fram í NORDECFO (Nordic Defense Cooperation), sum seinnu árini m.a. hava gjørt avtalur um deiling av radarupplýsingum sínamillum, og at t.d. svenskar herdeildir uttan stórvegis hóvasták kunnu flyta seg inn yvir finska ella norska markið, skuldi tað hent, at Russland leyp á. Sí meira um NORDEFCO undir fylgiskjølunum.




*Mynd: Politiken (2021)*

[44] Forsvarsministeriet (2016). Forsvarets fremtidige opgaveløsning, s. 238 – 239.

[45] Dentur verður eisini lagdur á, at danska suverenitetsuppgávan bert kann loysast í samstarvi við sameindar partar.

[46] Søguliga hava arktisku londini eyðmerkt Arktis sum eitt lágspenningsøki, har dentur hevur verið lagdur samráðingar og samstarv heldur enn politiskar og handilsligar samanstoytir millum lond.

[47] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis

[48] Ein orsøk til at Finnland og Svøríki ikki valdu at gerast partur av NATO er helst, at londini liggja so tætt upp at Russlandi, og at Russland tískil lættliga kann tulka tað

sum eina provokatión, um Finnland og Svøríki gerast partur av NATO og harvið teirri vesturlendsku samgonguni, sum undir kalda krígnum hevði Sovjetsamveldið sum sín stóra fígginda.

[49] https://www.dr.dk/nyheder/indland/eksperter-om-russiske-fly-i-dansk-luftrum-detskal-tages-alvorligt-men-er-ikke

# Politiska støðan í Arktis

**"Den største trussel mod danske interesser i Arktis er ikke russerne, men udsigten til at rigsfællesskabets sammenhængskraft bliver svækket."**

**Peter Taksøe-Jensen, ambassadørur 2016[50]**

Tað var í álvara, tá undanfarni amerikanski forsetin Donald Trump setti fram ynski um at keypa Grønland. Hóast forsetans ynski at kalla varð tulkað sum ein háðan av Danmark og Grønlandi, so var hendingin somuleiðis eitt tekin um "eskalerandi stórveldisrivalisering" í arktiska økinum.

Sambært áðurnevndu frágreiðing hjá DIIS skal stórveldisrivaliseringin í Arktis skiljast sum ein "tvey-stigs-tilgongd". Fyri tað fyrsta hava veðurlagsbroytingar og nýggjar siglingarleiðir gjørt økið so mikið atkomuligt, at tað hevur ført við sær vaksandi altjóða áhuga, bæði handilsliga og politiskt. Hetta hevur havt við sær, at russar og kinverjar eru farnir at raðfesta økið nógv hægri politiskt, búskaparliga og hernaðarliga.[51] Fyri vestanlondini og NATO er tað fyrst og fremst økta russiska virksemið, sum vekir ans. Arktiska økið hevur leingi verið avgerandi fyri russisku sjálvsfatanina sum tjóð og fólk og hevur søguliga havt við sær at kalla markleysar ekspansjónsmøguleikar fyri Sovjetsamveldið og seinni Russland.

Fyri tað næsta hevur økti áhugin og økta virksemið frá russum og kinverjum elvt til eitt aftursvar frá USA. Washington sær eisini í størri mun Russland og Kina sum eina hóttan í Arktis og ræðist styrkta búskaparliga, strategiska og hernaðarliga samstarvið millum londini. Avleiðingin er, at amerikanarar bæði diplomatiskt og vinnuliga økja um virksemið í økinum



Heili 53 % (góðir 24.000 km) av samlaða arktiska strandarøkinum er russiskt, og 40 % av samlaða fólkatalinum í Arktis eru russar (2,4 mió.). Búskaparligi týdningurin er eisini stórur, og inntøkur úr økinum svara til 11 % av russisku bruttotjóðarúrtøkuni. Arktis er eisini karmur um største hernaðarflotan, sokallaða Norðurflotan hjá russum.

*DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis, s. 6*

og fyri fyrstu ferð í nógv ár gera íløgur í nýggjar "arktiskar kapasitetir".[52] At USA valdi at lata konsulat í Nuuk upp aftur í 2020 skal eisini síggjast í hesum ljósinum.

At USA óttast russisku og kinesisku ekspansjónina í Arktis sæst somuleiðis aftur í, at amerikanarar leggja størri trýst á NATO og Danmark fyri at liva upp til skyldur sínar í NATO samstarvinum. Radarin, sum er í umbúna á Sornfelli, er tískil eisini eitt greitt ynski frá USA.

Samanumtikið ber til at siga, at stórveldisrivaliseringin í Arktis hevur við sær, at arktiska samstarvið er komið undir trýst, og at tað gerst alsamt truplari at varðveita økið sum eitt lágspenningsøki. Sambært frágreiðingini hjá DIIS er tað ein ítøkilig avbjóðing, at tað fyribils ikki eru álitisvekjandi pallar millum vesturlendskar og russiskar hernaðarligar myndugleikar orsakað av Ukrainakreppuni, sum íkom eftir at Russland hertók Krim-hálvoynna í Ukraina í 2014. Sambært eygleiðarum verða neyvan slíkir pallar, fyrr enn ein friðarligur endi er funnin á Ukrainakreppuni. Her kundi Arktiska Ráðið spælt ein meklandi leiklut, men heimildirnar hjá ráðnum eru avmarkaðar til, at Ráðið ikki skal viðgera "hørð trygdarpolitisk" evni.[53]

Stórveldisrivaliseringin hevur serliga við sær avbjóðingar fyri smærru aktørarnar í Arktis, sum hava truplari við at gera ávirkan sína galdandi í einum konteksti, sum er merktur av spenningi og dubbing. Felags fyri tey flestu smærru londini, umframt ES, er ynskið um at varðveita Arktis sum eitt lágspenningsøki, har dentur verður lagdur á samstarv innan handil, umhvørvi, menning og gransking.

[50] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis, s. 28

[51] Ibid. s. 23

[52] Ibid. s. 23

[53] Ibid. s. 23-24

# Stórveldini, NATO og hinir aktørarnir í Arktis

**"Vit – Grønland, Føroyar og Danmark – hava ymisk áhugamál og raðfestingar í Arktis."**

**Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, 26. februar 2020[54]**

Yvirhøvur er rættiliga breið semja millum eygleiðarar um, at allir aktørarnir í Arktis – herundir eisini Russland – framvegis eru áhugaðir í at varðveita økið sum eitt lágspenningsøki. Samstundis ásanna tey fimm arktisku strandarlondini, Danmark (Grønland), Kanada, Noreg, Russland og USA, at vandin fyri ósemjum og stríði veksur, so hvørt sum havísurin smeltar, og møguleikarnir at troyta náttúruríkidømið gerast fleiri. Av tí sama hittast serfrøðingar og diplomatar framvegis regluliga fyri at styrkja dialogin og fyribyrgja møguligum misskiljingum landanna millum.[55]

## RUSSLAND

Arktis er bakgarðurin hjá Russlandi, og russar meta seg hava rætt til 70 % av samlaða havbotninum í arktiska havinum. Fyri at kunna undirbyggja hetta kravið hava russar leingi lagt nógva orku í at skjalfesta kravið um botnkanningar undir arktiska ísinum, fyri harvið at tryggja sær rættin til náttúrutilfeingið í økinum.[56] Harafturat avdúkaði CNN herfyri fylgisveinamyndir, sum sambært miðlinum vísa stóra hernaðarliga dubbing hjá russum í arktiska økinum.[57] Sum áður nevnt er arktiska havið heimstaður hjá størsta flotanum hjá russisku verjuni, Norðurflotanum, og økið er sum heild karmur um nógv hernaðarligt virksemi umframt granskingarvirksemi. Sambært frágreiðing hjá DIIS (2020) eru tað serliga trý viðurskifti, sum fara at stýra russiskum áhugamál-




*Russar kalla landnyrðingsleiðina (nordøstpassagen) eina "nationala handilsleið" (mynd: Zetland, 2021)*

[54] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis, s. 35

[55] https://www.weekendavisen.dk/2021-14/samfund/russerne-kommer?utm_medium=Social&utm_source=Facebook&fbclid=IwAR34fJIyLOQ9gGO-USFmTQODngqnMseWtrdU1xBFGpkRxh5c3ztvr2fbuGO#Echobox=1618258945

[56] Ibid.

[57] https://edition.cnn.com/2021/04/05/europe/russia-arctic-nato-military-intl-cmd/index.html

um og aktiviteti í økinum: menningin av norður-eysturleiðini (landnyrðingsleiðin, sum er ein siglingarleið fram við russisku strondini), at fáa atgongd til og staðfest rættin til landgrunnin og hernaðarliga dubbingin í økinum.[58]

Russar kalla landnyrðingsleiðina eina “nationala handilsleið” og hava síðani 2019 kravt, at útlendsk flotaskip, sum ætla sær at brúka leiðina, skulu boða russiskum myndugleikum frá í seinasta lagi 45 dagar frammanundan, eins og tey skulu brúka russiskan loðs á leiðini. Slík krøv elva til spenningar, og eitt nú USA hevur átalað russiska kravið og krevur fría atgongd til farvatnið.[59] Seinastu 20 árini er russiska verjan vorðin væl og virðiliga dubbað og nútímansgjørd, men tað vóru serliga spentu viðurskiftini við ES, NATO og USA eftir annekteringina av Krim-hálvoynni og eftirfylgjandi Ukrainakreppan, sum gjørdi, at russar fóru undir at styrkja og uppraðfesta hernaðarliga virksemið í Arktis við fleiri hernaðarstøðum, flogvallum, havnum og venjingum. Russar kenna seg eisini hóttar av amerikanskum áhugamálum í Arktis og av NATO-virksemi í økinum.[60]

> **“Eftir heimtøkuna av Krim-hálvoynni til Russlands byrjaði tað næsta kalda kríggið”.**
>
> **Russiskur eygleiðari, 2020**

## USA, NATO OG TEY SMÁU

Felags fyri USA, NATO og Norðurlond er óttin fyri einum meira ágangandi Russlandi í Arktis og økta leiklutinum hjá Kina yvirhøvur. Viðurskiftini millum russar og amerikanarar eru versnað munandi seinnu árini, og hvørja ferð annar parturin roynir at styrkja støðuna, svarar hin parturin aftur. Síðani 2017 hevur trygdar- og verjuætlanin hjá USA verið merkt av stórveldisrivalisering við Russlandi og Kina sum høvuðsmótstøðulondum. Á Arktiskum ráðsfundi í Rovaniemi í Finnlandi í 2019 segði táverandi amerikanski uttanríkismálaráðharrin, Pompeo, at USA í dag sær Arktis sum eitt øki, sum er merkt av valdspolitikki og kapping. Arktis er sostatt formelt blivið eitt verjupolitiskt øki fyri amerikanarar, har tað, sum hendir í økinum, eisini kann ávirka trygdina í landinum. Amerikanarar ræðast serliga økta hernaðarliga virksemið hjá russum í Arktis, eitt nú heilt ítøkiliga nýggjar russiskar hernaðarstøðir, sum kunnu raka Thulestøðina. Harumframt skapar russiska kravið um ræði á landnyrðingsleiðini høvuðbrýggj fyri USA, samstundis sum russiskir kavbátar støðugt royna at sleppa ígjøgnum GIUK-holið[61] fyri at virka í Norðuratlantshavinum.[62]

> **Kollektiva verjutrygdin*** í NATO merkir, at eitt álop á eitt limaland er eitt álop á NATO sum heild.

Sambært frágreiðingini hjá DIIS er tað tó serliga virksemið hjá Kina í Arktis og aðrastaðni, sum Washington óttast. Kina vísir Arktis sera stóran ans, og amerikanarar meta, at Arktis saman við fleiri øðrum økjum kann gerast ein vøllur, har spenningar íkoma millum stórveldini.[63] Amerikanarar bóru eisini skjótt at, tá tað kom fram, at kinesisk fyritøka skuldi byggja nýggja altjóða flogvøllin í Grønlandi. Fleiri meta, at tað helst var trýst úr Washington, sum gjørdi, at danir at enda bjóðaðu sær til at veita fígging til verkætlanina fyri at halda Kina burturi.

Fyri NATO hevur Arktis ongantíð verið eitt høvuðsøki. NATO hevur sum er ongar hernaðarligar installatiónir í Arktis, og økið er ikki partur av kollektivu verjuætlanini hjá NATO, hóast limalondini sjálvandi eru fevnd av kollektivu verjutrygdini.* Tað er tó púra greitt, at Arktis er komið á dagsskránna hjá NATO, og tað er fyrst og fremst russiski norðurflotin, sum er orsøkin. Ætlanir eru tí m.a. um at endurstovna “Atlantshavskommandoina”, sum skal styrkja eftirlitið í farvøtnunum millum Grønland, Ísland og Stórabretland. Økt NATO-virksemi í Arktis fer tó helst at verða fatað sum hóttandi av Russlandi, so tað er hugsandi, at tað verða arktisku limalondini sjálvi, sum fara at standa fyri økta eftirlitinum. Eins og í USA eru NATO-eyguni eisini vend móti øktu altjóða ávirkanini frá Kina.[64]

Vaksandi áhugin millum stórveldini fyri Arktis og økta virksemið í økinum hevur við sær avbjóðingar fyri smærru arktisku londini, herundir eisini Danmark, Føroyar og Grønland. Danir dubba seg sum kunnugt á verjuøkinum, og tað sama ger Svøríki, har stjórnin í fjør samtykti at hækka útreiðslurnar til verjuna við heili 40 prosentum komandi árini.[65] Fyri Svøríki og Finnland er talan um beinleiðis avleiðingar av økta russiska virkseminum í Arktis og í Eystursjónum.

Mest víðgongda stigið á hesum øki í Norðurlondum hevur Noreg tikið, tá norska stjórnin í apríl í ár gjørdi avtalu við amerikansku stjórnina um, at amerikanarar skulu byggja

[58] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis, s. 7

[59] Ibid. s. 7

[60] Offisielt siga russar seg tó framvegis vilja, at arktisku strandalondini samstarva í tann mun tað ber til ígjøgnum Arktiska Ráðið, og at tey fyrst og fremst vilja syrgja fyri at halda londum uttan fyri Arktis burtur frá ávirkan.

[61] GIUK-”holið” er partar av farvøtnunum millum Grønland, Ísland, Føroyar og Stórabretland, har avmarkað radaraeftirlit er.

[62] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis, s. 13 - 14

[63] Ibid. s. 14

[64] Ibid. s. 18-20

[65] https://www.berlingske.dk/internationalt/sveriges-regering-vil-oege-forsvarsbudgetmed-40-procent



upp og manna ikki færri enn fýra herstøðir í Noregi. Hetta er ikki gjørt í NATO-høpi, men er ein tvílanda avtala millum tvey NATO-lond. Hetta er eitt beinleiðis svar uppá dubbingina hjá Russlandi á Kola-hálvoynni og á oyggjabólkinum Frants Josefs Land – altso tætt upp at norska markinum.[66]

Fyri danir er tað avbjóðandi, at Føroyar og Grønland vilja hava størri uttanríkispolitiskt frælsi, tí tað ger, at ríkisfelagsskapurin ikki virkar sum ein uttanríkispolitisk eind. Fyri føroyingar og grønlendingar, hinvegin, er júst størri uttanríkispolitiskt frælsi fortreytin fyri, at londini kunnu mennast innan fyri karmarnar í ríkisfelagsskapinum. Sum løgmaður er siteraður fyri at siga omanfyri, so eru áhugamálini og raðfestingarnar ymiskar í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Fyri Føroyar eru tað heilt ítøkiliga handilin við Russland og Kina, sum brýtur frá ES-londunum. Søguliga hevur tað borið til hjá føroyingum at víkja frá donsku linjuni í útflutningi til onnur lond, men økti geopolitiski spenningurin í Arktis er sambært DIIS helst ein fráboðan um, at hetta fer at gerast truplari í framtíðini.[67] Tað verið seg bæði innan fyri útflutning av fiski til Russlands og samstarv um undirstøðukervi e.l. við Kina, sum Huawei málið var dømi um (sí dømir um russlandshandilin undir hesum partinum og Huawei málið í øðrum parti av greiningini).

Verða handilspolitiskir teymar lagdir á føroyingar, fer tað uttan iva at skapa fleiri spenningar og ósemjur í viðurskiftunum við Danmark. Og tað eru júst tær ósemjurnar, sum russar og kinverjar kunnu gagnnýta fyri sjálvi at sleppa framat. Ósemjurnar kunnu í ringasta føri hava við sær størri illvilja móti Danmark, ið kann gera tað lættari hjá Russlandi ella Kina at ávirka Føroyar og Grønland við handilsligum og diplomatiskum "sjarmuátøkum", ið kunnu styrkja støðuna hjá russum og kinverjum í Arktis.

Alt bendir á, at Arktis eisini í framtíðini fer at hava størri týdning, og at kappingin millum stórveldini USA, Russland og Kina fer at harðna. Leikluturin hjá NATO í arktiskum høpi fer av tí sama ivaleyst eisini at økjast, og spurningurin er, um tað fer at hava við sær øktar politiskar spenningar millum tey sameindu í arktiska økinum, og harvið eisini í viðurskiftum millum Danmark og Føroyar, eins og vit sóu við NATO-spurninginum undir kalda krígnum.

Vit fara nú at hyggja at nøkrum dømum um, hvussu politiska mótstøðan móti NATO hevur sæð út í Føroyum undir kalda krígnum.

[66] Hóast mótstøðu móti hesum stigi verður væntað, at norska stórtingið fer at góðkenna ætlanina, men tað var ikki greitt, tá henda frágreiðing bleiv gjørd.

[67] DIIS. (2020) Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis, s. 36

# CASE

# USS DONALD COOK VITJAR Í FØROYUM

**"Sitandi landsstýri hevur lagt seg niður at grulva fyri Danmark. Danmark brúkar enn einaferð Føroyar sum eitt kort í einum stórpolitiskum spæli fyri at sleppa bíligari í NATO."[68]**

**Høgni Hoydal,**
**tá amerikansk sendinevnd**
**hugdi at havnum í Føroyum**

Í oktobur 2019 legði amerikanski destroyarin USS Donald Cook at við bryggju í Runavík. At eitt fremmant krígsskip vitjar í Føroyum er ikki ókent. Men hetta var fyrstu ferð í meira enn 30 ár, at eitt amerikanskt krígsskip vitjar í Føroyum. Ørindini hjá skipi og manning vóru heldur ikki einans tilvildarlig ella kurteislig, men skulu síggjast sum partur av økta virkseminum hjá USA í Arktis: Amerikanarar eru í gongd við dubbing í økinum eins og undir kalda krígnum. Í samrøðu við Jyllandsposten í fjør segði Robert P. Burke, hægsti kommandørur í amerikanska flotanum, at høvuðsdentur í nýggju arktisku ætlanini hjá USA skuldi leggjast á størri og støðugari hjáveru av m.a. amerikanskum krígsskipum í arktiska økinum, og at amerikanarar í tí samanhanginum leitaðu eftir hóskandi havnum til skip síni. Kommandørurin hitti eisini Jenis av Rana, uttanríkismálaráðharra, á ferðini.[69]

Fyrr í ár kom aftur eitt skip á Runavík. Hesa ferð var talan um stóra destroyaran USS Ross. Um sama mundið var ein amerikansk sendinevnd við teknikarum í Føroyum og kannaði størstu havnirnar í landinum. Sambært Sosialinum var orsøkin, at amerikanarar vildu brúka Føroyar sum "maritimt stuðulspunkt í Norðuratlantshavinum" sum krígsskip m.a. kunnu brúka til umskifting av manning, proviantering, bunkring og umvælingar.[70]

Eins og undir kalda krígnum eru fleiri, sum hava talað at í sambandi við amerikansku vitjanirnar í Føroyum. Formaðurin í Tjóðveldi, Høgni Hoydal, kallaði tað "demokratiskt púra burturvið" og sipaði til, at løgtingið ikki varð kunnað um vitjanina hjá amerikansku sendinevndini.[71] Tá havt verður í huga ruðuleikan av líknandi vitjanum undir kalda krígnum, kann tað eisini tykjast løgið, at føroysku miðlarnir ikki gjørdu meira burtur úr vitjanunum, ella at tað millum fólk ikki elvdi til nevnivert kjak.



*Destroyarin USS Donald Cook á Runavík. Mynd: Birgir Waag Høgnesen*

At amerikansk krígsskip aftur vitja í Føroyum, og at amerikanska verjan kannar føroyskar firðir og havnir, er ein greið ábending um, at verju- og geopolitiska virksemið í arktiska økinum økist, og at viðurskifti millum eystan- og vestanlond helst gerast spentari komandi árini. Føroyar eru einfalt vorðnar meira áhugaverdar fyri bæði amerikanarar og russar. Men tað kann somuleiðis hava við sær, at vit koma undir størri útlendskt politiskt trýst á ymiskum økjum. Og um nakar skal brúka Føroyar sum maritimt stuðulspunkt, er tað ikki vist, at vit sjálvi heilt sleppa at avgera, hvør tað skal vera.

[68] https://www.in.fo/news-detail/foeroyar-skulu-ikki-brukast-av-doenum-til-hernadarligendamal

[69] https://jyllands-posten.dk/international/ECE12518605/usa-opruster-i-arktis-og-harbrug-for-sikre-havne-til-krigsskibe/

[70] https://www.in.fo/news-detail/usa-hevur-kannad-havnir-i-foeroyum-til-herskip

[71] https://www.in.fo/news-detail/foeroyar-skulu-ikki-brukast-av-doenum-til-hernadarligendamal

# Løgtingssamtyktir og mótmæli móti hernaðarligum virksemi í Føroyum




*Dagblaðið 11 juli 1987*

Politiski myndugleikin í Føroyum, og føroyingar sum heild, hava ofta víst á tær fýra løgtingssamtyktirnar ímóti, at Føroyar og føroyskt øki – uttan at verða spurd eftir - gjørdist partur av NATO í 1949, og at danir og NATO eftirfylgjandi bygdu hernaðarstøðir í Føroyum.

Fyrsta løgtingssamtyktin kom longu áðrenn heimastýrislógina (sí undanfarna part um heimastýrislógina) og áðrenn danskan limaskap í NATO. 13. apríl í 1940, stutt eftir at bretar hertóku Føroyar, samtykti løgtingið eina formliga orðing um, at føroyingar ynsktu at halda seg uttanveltaðar í mun til kríggið millum lond í øðrum veraldarbardaga.[72] Sostatt vildi løgtingið ikki "velja síðu" í øðrum veraldarbardaga, og tann hugsanarhátturin hekk eisini við, tá kríggið endaði, og kalda kríggið byrjaði.


tíðindablaðið
sosialurin
USS McCloy
úr føroyskum
sjógvi
Síða 3, 4 og 5
ÚT

Sosialurin, 11. juli 1987

[72] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 42-43

Við jøvnum millumbilum sást og hoyrdist mótstøðan móti NATO og hernaðarstøðum í Føroyum aftur í almenna rúminum, í løgtinginum og í dagbløðunum. Talan var um løgtingssamtyktir, skriv til donsku stjórnina, lesarabrøv og leiðarar í dagbløðunum og fleiri mótmælisgongur. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir hesar samtyktir og nøkur av mótmælunum.

**1958:** Tjóðveldistinglimirnir Karsten Hoydal og Sigurð Joensen mótmæla harðliga, at landsstýrið hevði havt loyniligar samráðingar við NATO-umboð og danska verjumálaráðið um radaran á Sornfelli. Enn meira álvarsamt var, at summi fólk hildu, at støðin eisini skuldi brúkast sum liður í álopum á sovjetisk mál.[73]

**1959:** 21. og 22. mars í 1959 vóru mótmælisgongur í Havn móti ætlanunum at byggja eina NATO radarstøð í Føroyum. Við plakatum kring býin heittu stigtakararnir inniliga á fólk um at møta upp uttan fyri løgtingshúsið. Borgarstjórin í Havn Sigfried Skaale kallaði radarstøðina fyri "svik móti føroyska fólkinum", og røðurnar til tiltakið vóru hvassorðaðar móti landsstýrinum, NATO, Danmark og USA. Eftir mótmælið uttan fyri tinghúsið fóru fólk út á kaiina, har Petur Mohr Dam, løgmaður, kom við Tjaldrinum úr Keypmannahavn. Kravfólkið noyddi løgmann umborð aftur, samanbrestur tók seg upp millum javnaðarfólk og tjóðveldisfólk, og løgreglan mátti leggja uppí. Í samrøðu við danska avís segði danski verjumálaráðharrin, Poul Hansen, at løgtingið hevði samtykt verkætlanina.[74]

**1960-1961: (Løgtingssamtykt)** Fólkaflokkurin tók í 1960 stig til, at løgtingið samtykti eitt mótmæli móti hernaðarligu útbyggingini í Føroyum ítøkiliga viðvíkjandi nýggju støðunum á Sornfelli og Eiði. Mótmælið vísti til, at statsministarin ígjøgnum ríkisumboðið hevði upplýst fyri løgtinginum, at støðirnar einans skuldu mannast av óvápnaðum funktionerum (tvs. sivilum), men at verjumálaráðharrin í svari til Kjartan Mohr skrivaði, at støðirnar skuldu mannast av starvsfólki úr donsku verjuni ("militært personel"). Tað er tó greitt, at ríkisumboðið hevði kunnað løgtingið um, at støðirnar vóru "af forsvarsmæssig karakter", sum í referatinum varð umsett til "hermálsligt", og at starvsfólkini bert høvdu atgongd til vanlig skotvápn.[75]

Eisini í 1961 mótmælti løgtingið, men danska stjórnin avvísti mótmælið við tað, at statsministarin sendi eina formliga frágreiðing til landsstýrið um manningina og funktiónirnar hjá støðunum á Sornfelli og Eiði. Frágreiðingin var tilvitað sparin og úrtøkilig, men undirstrikaði kortini, at støðirnar skuldu ikki brúkast til bumbur, rakettir ella líknandi.[76]

**1969: (Løgtingssamtykt)** Tjóðveldi legði í 1969 uppskot fyri Tingið um, at Føroyar skuldu taka seg úr NATO-samgonguni. Úrslitið gjørdist tó ikki meira enn, at flokkurin saman við fýra øðrum í 1970 samtykti eina áheitan á donsku stjórnina um at kanna møguleikarnar fyri, at tær føroysku samtyktirnar um at halda Føroyar uttan fyri hernaðarligar ósemjur kundu gerast til veruleika. Danska Uttanríkismálaráðið staðfesti, at tað gekk beint ímóti donskum áhugamálum at taka Føroyar burtur úr Atlantspaktini, og at danir kundu vænta sær stóra mótstøðu frá NATO-sameindum, serliga USA. Svarið frá Hilmar Baunsgaard, statsministara, til føroyingar var tískil, sum so ofta fyrr: Verjan av Føroyum er eitt ríkismál, men stjórnin vil taka stór stig fyri at ganga føroyskum sjónarmiðum á møti.[77]

**1983:** Bæði í Danmark og í Føroyum fyltu trygdarpolitiskir spurningar nógv gjøgnum øll 80'ini. Eisini mótstøðan móti NATO vaks og víðkaðist hesi árini, serliga vegna óttan fyri kjarnorkuvápnum. Eins og systirflokkurin í Danmark bleiv Javnaðarflokkurin í Føroyum meira kritiskur mótvegis NATO og USA. Í 1983 setti javnaðartingmaðurin Jóannes Dalsgaard spurning til ríkisumboðið um umvælingar í Mjørkadali, og um danska stjórnin ikki vildi virða løgtingssamtyktirnar úr 60-unum og 70-unum um forboð móti hernaðarligum virksemi í Føroyum. Í stuttum svaraðu danir, at verjumál komu undir danskan myndugleika, og at ein broyting av hesum kravdi eina grundleggjandi broyting av ríkisrættarligu viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Javnaðarmaðurin var ónøgdur við svarið, kallaði støðina í Mjørkadali "ólógliga" og ávaraði stjórnina um, at tað kundi fáa álvarsligar fylgjur, um danir ikki virdu fólkaræðisligar samtyktir hjá løgtinginum.[78]

**1984: (Løgtingssamtykt)** Í mai í 1984 samtykti løgtingið eina "erklæring", sum umgangandi kravdi eina kanning av støðini í Mjørkadali. Samtyktin kom í kjalarvørrinum av tveimum greinum í donskum blaði, sum hildu uppá, at "amerikansku" hernaðarstøðirnar í Føroyum vóru í stríði við "offisiella" politikkin í Danmark, sum ikki loyvdi fremmandum hernaðarstøðum á danskari jørð. Árið fyri, í 1983, legði Erlendur Patursson, tingmaður fyri Tjóðveldi, uppskot fyri løgtingið, sum skuldi staðfesta, at Føroyar vóru kjarnorkufrítt øki. Uppskotið varð samtykt í 1984 við undirtøku frá tinglimum úr Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum. Undir orðaskiftinum talaði Óli Breckmann úr

[73] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 42-43 & Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum

[74] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum, s. 63

[75] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 44

[76] Ibid. s. 44

[77] Ibid. s. 45

[78] Ibid. s. 49-50



*Dagblaðið, 11. juli 1987*

Fólkaflokkinum at og ávaraði um, at slíkar samtyktir ikki góvu nakra verju í krígstíð, og Adolf Hansen úr Framburðs- og fiskivinnuflokkinum kallaði uppskotið landsskaðiligt.[79]

**1987:** 9. juli 1987 var ein stórhending í hernaðarpolitisku søgu Føroya, tá amerikanska fregattin USS McCloy stevndi inn á Havnina. Landsstýrið hevði givið tilsøgn um, at amerikanska skipið kundi vitja, men føroyingar vildu hava trygd fyri, at skipið ikki hevði atomvápn umborð. Nógv fólk var á molanum í Havn, tá skipið legði at tíðliga á morgni henda dagin. Nøkur bjóðaðu skipinum vælkomnum, men tey flestu mótmæltu.

Dagin eftir boðaði landsstýrið donsku stjórnini frá, at skipið var óynskt í Føroyum. Víst varð til tær samtyktir, sum løgtingið hevði gjørt um hernaðarmál, uttanveltaðu støðu Føroya og at Føroyar skuldu vera atomvápnafrítt øki (seinni kom kortini fram, at landsstýrið, sum nevnt, fyrst sjálvt hevði boðað frá, at skipið var vælkomið á Havnina).

[79] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 50


18 Nr. 65 Dimmalætting

Friðarfundurin hvítusunnuaftan undirstrikaði:

**NATO tryggjar friðin**

Umboð úr Ungmannafelagnum Samband, Ungmannafelag Fólkaflokksins og Frælsisfylkingini Vesturleið skipaðu hvítusunnuaftan fyri einum frálíkum friðarfundi í Gonguøtuni í Havn

Fundurin byrjaði seinnapartin kl. 15, tá Georg L. Petersen, formaður í Ung-

stuðlum í Føroyum av.
Eingin mundi heldur vera í iva um, at hesin fundur til

*Trygvi F. Guttesen, starvsstjórnarformaður:*

**NATO steðgaði kommunismuni**

*Dimmalætting, 11. juni 1987*

Náttina eftir seinnu boðini frá landsstýrinum kappaðu nøkur fólk endarnar á skipinum. Hendingin endaði í rættinum, har fólkini vardu seg við, at amerikanska skipið lá á Havnini móti landsstýrisins og løgtingsins vilja.

Bløðini vóru á tremur við greinum og myndum frá hendingunum, og tað var stórur munur á, hvussu tær vóru lýstar. 14. september, blað Tjóðveldisfloksins, var mest kritiskt, men eisini javnaðarblaðið Sosialurin stóð greitt á síðuni hjá teimum, sum mótmæltu. Hinumegin stóð fyrst og fremst Dagblaðið, og tað skapti øsing, at Óli Breckmann, blaðstjóri, tók myndir av mótmælisfólkunum, og m.a. kallaði tey “skrambul, grums og bumsar.” Ein mynd av einum stórum, donskum marinara, sum tók harðliga í ein ungan føroying, fekk stóran súmbolskan týdning. Óli Breckmann fegnaðist um, at tann føroyski “friðarhvølpurin” var settur upp á pláss, meðan onnur hildu marinaran umboða ólógligt danskt og amerikanskt yvirvald.

Uttan fyri býráðshúsið veittraði amerikanska flaggið í sambandi við vitjanina, men tað bleiv tikið niður av einum mótmælisfólki.

Hendingin setti ikki bara dagsskránna í kjakinum í Føroyum, men kom eisini í donsk bløð. Land & Folk, blaðið hjá kommistunum, rósti stórliga føroyingum fyri mótstøðuna, og Information skrivaði m.a. um myndina av marinaranum og unga føroyinginum. Eisini fólkatingið tók hendingina upp, tá Kjeld Albrechtsen úr Venstresocialisterne spurdi danska statsministaran, hvussu tað bar til, at Danmark ikki vildi virða, at Føroyar vildu vera atomfrítt øki, og hví danskir marinusoldatar høvdu tikið í eitt mótmælisfólk og tvingað viðkomandi burtur av molanum.[80]

-

Hetta yvirlitið vísir bert ein part av teimum politisku og fólksligu mótmælum í NATO-spurninginum undir kalda krígnum. Uttan fyri politisku skipanina funnust eisini hópin av friðarfylkingum, vinstravendum og kommunistiskum felagsskapum, sum skipaðu fyri mótmælum, fundum, skrivaðu í bløðunum og uppá aðrar mátar góvu sína NATO-mótstøðu til kennar. Hinumegin vóru eisini tey nógvu, sum stuðlaðu NATO, og tey, sum fyrst og fremst ræddust kommunismuna.

Politisku flokkarnir tóku eisini støðu í spurninginum og kappaðust um at gera ávirkan sína galdandi. Summir teirra kúvendu tó eisini í spurninginum móti endanum av kalda krígnum. Niðanfyri kemur ein viðgerð av hesum.



[80] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 55-56

# Hvør var støðan hjá politisku flokkunum undir kalda krígnum?

Tá danir gjørdu av at gerast partur av NATO, vórðu Føroyar og Grønland av sær sjálvum drigin við, og økið bleiv partur av NATO-øki. Sum vit longu vita, var mótstøðan í Føroyum stór, og hon kom úr at kalla øllum samfelagsløgum og politiskum flokkum.

Her koma nøkur niðursløg í søguni um, hvussu hugburðurin og politisku stigini frá føroysku flokkunum og landsstýrinum hava verið, og tær broytingar vit hava sæð gjøgnum tíðina.

Støðutakanin hjá føroysku flokkunum til NATO skal sjálvandi lesast saman við øðrum politiskum málum. Móti endanum av 50-unum var búskaparliga og samfelagsliga menningin stór, men politiska orðaskiftið í Føroyum var samstundis sera nógv merkt av ætlaðu NATO-radarstøðini í Mjørkadali. Løgtingsval var í 1958, nýggj samgonga millum Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Sambandsflokkin varð skipað, og Javnaðarflokkurin við Peturi Mohr Dam á odda fekk góða undirtøku fyri ætlanunum um at styrkja sosialu vælferðarskipanirnar. Sambandsflokkurin væntaði hinvegin ikki, at føroyingar fóru at hava ráð til somu skipanir sum í Danmark, og í andstøðu helt Fólkaflokkurin, at almenna stýringin og útreiðslurnar á búskaparliga og sosiala økinum vóru ov stórar. Hin andstøðuflokkurin, Tjóðveldi, hevði rent seg í trupulleikar av, at Javnaðarflokkurin, við eitt nú lovaðu fólkapensjónini, at kalla hevði lagt seg heilt á vælferðarpolitikkin, sum eisini hevði verið eitt aðalmál tjóðveldisfólksins.[81]

Áhugavert er at leggja til merkis, at flokkar og løgtingsfólk at kalla kappaðust sínámillum um at gera vart við seg í NATO-spurninginum, og at kappingin snúði seg um at vera mælskastur í mótstøðuni móti NATO-virksemi í Føroyum. Greiningin hjá Jákupi Thorsteinssyni vísir til amerikanskar frágreiðingar um politiska landslagið í Føroyum í 50- og 60-unum. Víst verður m.a. á, at amerikanarar mettu, at Tjóðveldisflokkurin stóð veikur, tí Fólkaflokkurin betur hevði klárað at "tikið sær av anti-verjupolitikkinum."[82]

## FÓLKAFLOKKURIN OG TJÓÐVELDI TEIR MEST ATFINNINGARSOMU

Yvirhøvur vóru tað serliga Fólkaflokkurin og Tjóðveldi, sum vóru mælskastir í mótstøðu síni móti NATO-virksemi í Føroyum tey fyrstu áratíggjuni eftir kríggið. Fólkaflokkurin hevði móti endanum av 50-unum tikið greiða støðu ímóti NATO og verndarpolitikki og samtykti støðu sína við flokssamtykt á floksráðstevnu í desember 1958. Hendan sama samtykt legði eisini lunnar undir yvirlýsing løgtingsins um at mótmæla, at hermenn og hernaðarlig útgerð vóru í Føroyum.[83]

Friðarrørslur og fylkingar móti NATO vóru nógvar og breiðar í tali, og summi skeið vóru mótmælsskriv og kravgongur at kalla gerandiskostur. Í 1969 legði Karsten Hoydal, tingmaður fyri Tjóðveldi, fram uppskot til samtyktar um at krevja, at danir góðtóku, at Føroyar limaðu seg úr NATO-felagsskapinum.



78. Føroyar burtur úr Nato

Ár 1969, 18. apríl legði Karsten Hoydal løgtingsmaður fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður Føroya landsstýri at krevja av ríkisstýrinum, at Føroyar frá 1970 at rokna ganga úr NATO-felagsskapinum.

[81] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum, s. 57-59

[82] Ibid. s. 57-59

[83] Johansen, S., Thorsteinsson, J. (1999) Føroyar í kalda krígnum s. 58

Í heila tikið vóru tað í høvuðsheitum tinglimir úr Fólkaflokkinum og Tjóðveldi, sum talaðu ímóti NATO og í tingarbeiði og almennum orðaskifti funnust at tí, sum teir mettu vera eina óheimilaða danska, amerikanska og NATO hjáveru í Føroyum.

### FÓLKAFLOKKURIN SKIFTIR KÓS, OG JAVNAÐARFLOKKURIN GERST ANTI NATO

Sum heild fyltu trygdarpolitisk viðurskifti í Føroyum, eins og í Danmark, nógv í 80-unum. Hetta setti eisini sín dám á politiska orðaskiftið, og bæði í Danmark og Føroyum sóust broytingar í siðvandu støðutakanini hjá fleiri flokkum. Í Danmark kom borgarliga Schlüter-stjórnin (1982-1993) undir trýst at broyta danskan trygdarpolitikk og at taka fleiri fyrivarni fyri felags NATO-politikkinum mótvegis Sovjet og Warzavapaktini. Í Føroyum førdi dubbingin í Mjørkadali og vaksandi óttin fyri kjarnorkuvápnum við sær, at NATO-mótstøðan vaks, og m.a. Javnaðarflokkurin gjørdist atfinningarsamari mótvegis NATO og USA.[84] At áðurnevnda uppskot í 1983 frá tjóðveldismanninum Erlendi Paturssyni um at gera Føroyar til atomfrítt øki fekk undirtøku úr Fólkaflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Javnaðarflokkinum talar eisini fyri, at mótstøðan móti NATO vaks hetta tíðarskeiðið.

Fyri Fólkaflokkin legði hetta tíðarskeiðið tó lunnar undir eitt hugsjónarligt skifti. Á landsfundi í desember 1986 staðfesti flokkurin, at “sannleikans stund í NATO-málinum” var komin, og floksins almenna støða í NATO-spurninginum snaraði 180 stig. Dagblaðið refereraði soleiðis av landsfundinum:

> **“Eftir drúgva umhugsan og djúpa sjálvsrannsakan samtykti landsfundur Fólkafloksins leygardagin at sleppa tí støðu, flokkurin hevur havt í nógv ár í samsvari við tær løgtingssamtyktir, hann sjálvur hevur sett fram og atkvøtt fyri í síni tíð, at kúvenda og fult og heilt at taka undir við føroyskum stuðli til NATO.”[85]**

Óli Breckmann hevði longu frammanundan gjørt seg kendan sum greiðan fortalara fyri, at føroyingar skuldu stuðla NATO. Í sambandi við at radarin á Sornfelli fylti 25 á sumri sama ár, helt Breckmann eina røðu, har hann staðfesti, at NATO fyrst og fremst hevði varðveitt friðin og frælsið í vesturheiminum. Hann ákærdi eisini Tjóðveldi fyri at hava pískað ein hysteriskan stemning upp í sambandi við radarstøðina, undirstrikaði at meirilutin av føroyingum tóku undir við NATO, og segði Fólkafloksins hugburðsbroyting í NATO-spurninginum vera avgerandi, nú danskir sosialdemokratar vóru vorðnir atfinningarsamari mótvegis NATO og verjupolitikki.[86]


DAGBLAÐIÐ
NR. 139 - 52. ÁRG. MÁNADAGUR 8. DESEMBER 1986 5 KRÓNUR
Spegilsklárir fyrimunir
FTV
*Fólkaflokkurin á landsfundi:*
**Sannleikans stund í NATO-málinum**
Vit hugsa øðrvisi
FOSSBANKIN — tín virkni banki

*Dagblaðið, 8. desembur 1986*

[84] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 49

[85] Dagblaðið, 8. desembur 1986.

[86] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 54-55



DAGBLAÐIÐ 20. JANUAR 1988 — SÍÐA 3

*NATO-keldur:*

**Fiskivinnuavtalan við Sovjet snýr seg um annað enn fisk**

**— Fiskivinnuavtala føroyinga við Sovjet kann í eini kreppustøðu tryggja russum fult vald á Føroyum. Til tíðir eru upp til tríggjar ferðir so nógvar russar í Føroyum enn danskar militer-persónar, meta NATO-keldur.**

**— Tað liggur annað enn fiskur aftan fyri avtaluna, serliga frá sovjettiskari síðu, siga somu keldur við enska blaðið The Economist.**

strategiskan áhuga fyri russar. Og spurningurin er so, hvussu teir kunnu fáa fótin fastan. Og her eru keldurnar hjá The Economist ikki í iva.

**FISKIVINNUAVTALAN**

NATO er ikki serliga nøgt við føroysku fiskivinnuavtaluna við Sowjet. Orsøkin er, at avtalan ógvuliga lætt í eini kreppustøðu kann tryggja russum eitt trygt fótafesti í Føroyum. Hetta verður dokumenterað við at vísa á, at til tíðir eru tríggjar ferðir so nógvar russar í Føroyum, sum tað eru danir, ið hava nakað við danska herin at gera.

Tá 3-4 sovjettiskir trolarar liggja til umvælingar í Føroyum, kunnu væl vera millum 300 og 400 russar í landinum. Til samanberingar eru ongantíð meira enn tilsamans 130 fólk knýtt at Færøernes Kommando og Flyvestation Torshavn. Og her er bert talan um operatørar og teknikarar.

The Economist skrivar, at NATO-keldur fyri teimum hava sýnt stóra misnøgd við [illegible] fiskiveiðuavtal-

*Dagblaðið, 20. januar 1988*

Á fólkatingsvalinum árið eftir fekk Óli Breckmann eitt kanónval, og fleiri eygleiðarar mettu orsøkina vera lutfalsliga tøttu viðurskiftini millum Føroyar og Sovjet. Atli Dam, løgmaður, og Javnaðarflokkurin sum heild vórðu árini frammanundan vorðin alt meira kritisk mótvegis USA og NATO, og nýggj fiskivinnuavtala millum Føroyar og Sovjet gjørdi, at bretska avísin The Economist, danska B.T. og "NATO-keldur" ávaraðu um, at russar infiltreraðu Føroyska samfelagið og spakuliga vóru í ferð við at taka yvir. Tað er væl hugsandi, at nógva skrivingin og orðaskiftið um føroysk-russisku viðurskiftini hevur lopið ótta á nógvar føroyskar veljarar, sum av tí sama valdu at atkvøða fyri nýklæktu NATO-vinarligu linjuni hjá Fólkaflokkinum, sum í 1987 gjørdist størsti flokkur á fólkatingsvalinum.

Avtalan innibar eisini, at russisk skip vóru til umvælingar á føroyskum skipasmiðjum við russiskum smiðum og sjómonnum, og tað var serliga hetta, ókendar NATO-keldur ræddust sum ein háttur at njósna og "infiltrera" føroyska samfelagið. Atli Dam vildi ikki lata við seg koma og vardi fiskivinnuavtaluna við Sovjetsamveldið sum eina praktiska og vinnuliga avtalu, sum kom væl við hjá hart sperda føroyska búskapinum. Hann legði afturat, at NATO skuldi ikki blanda seg upp í føroysk handilsviðurskifti við Sovjet, men í staðin átti at givið føroyingum betri møguleikar at fiska í sjóøkinum hjá NATO-londunum:

> **"NATO skulle ikke tage for givet, at de kan lade os sulte ihjel, samtidig med at vi skal ofre blod, liv og helbred og økonomisk effektivitet for at være del af denne sammenslutning (NATO)."[87]**

**Atli Dam, løgmaður, í 1988**

Sum orðaskiftið vísir, hevur russlandshandilin, eins og hann ger í dag, fleiri ferðir elvt til politiskar spenningar í Føroyum, og í okkara viðurskiftum við umheimin. Stakdømið niðanfyri um russlandshandilin og eftirfylgjandi ES-stongsulin mótvegis Føroyum er eitt av greiðastu dømunum um, at handilspolitikkur ikki bert snýr seg um handil, men eisini um trygdar- og verjupolitikk. Og tað ikki altíð er uttan avleiðingar, tá vit røkja okkara handisligu sambond, soleiðis sum vit vilja.

[87] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 125-126

# CASE

## RUSSLANDSHANDILIN

**"People need to have food. Russia needs to have food. (...) Other people can think about something else, but they will never stop us to deliver food. Never."[89]**

**Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður 2015**

Eins og í 80'unum hevur verandi samhandil við Russland ofta elvt til spenningar – bæði í politisku skipanini í Føroyum, men serliga í viðurskiftum við ES og Danmark. Tað, sum fyri føroyingar hevur verið sæð sum ein neyðug og pragmatisk handilsavtala, hevur ES sæð sum eina avbjóðing og sum eitt brot á felags ES-sanktiónirnar mótvegis russum, eftir at Russland annekteraði Krim-hálvoynna í 2014.

Tá ES, sum avleiðing av Makrelstríðnum, setti í verk handilsbann mótvegis føroyskum vørum, komu danir í eina trupla støðu. Á annan bógvin vildu teir virða føroyska rættin at umboða egin áhugamál. Á hin bógvin noyddist Danmark at fylgja boðunum úr Brússel og setti m.a. í verk stongsul fyri føroyskum skipum á donskum havnum. Av tí sama vaks føroyski útflutningurin til Russlands sera nógv hesi árini. Føroyingar komu eisini í eina serstøðu, av tí at vit at kalla vóru einasta vestanlandið, sum ikki var fevnt av russiska handilsbanninum fyri matvørur úr vestanlondum. Tað, sum ES, USA, Kanada, Noreg og Ísland ikki longur kundu útflyta til Russlands, kundu føroyingar útflyta. Samlaði útflutningurin til Russlands fleirfaldaðist tí hesi árini, og virðið vaks úr góðum 700




*Mynd: euobserver.com*

[89] https://www.wsj.com/articles/faeroe-islands-boom-by-selling-salmon-torussia-1424483776

millióнum krónum í 2013 til smáar tvær milliardir í 2020. Størstur var útflutningurin í 2017, tá útflutningsvirðið var góðar 2,5 milliardir krónur.[90] Aftaná ES er Russland sostatt størsti keyparin av føroyskum vørum.

At vit hava góð viðurskifti við Russland og útflyta nógv tann vegin, kann tó eisini seta okkum í eina politiskt avbjóðandi støðu. Summir eygleiðarar ávara ímóti, at føroyingar kunnu koma í ta støðu, at vit gerast alt ov bundin av at útflyta til Russlands og ov tætt knýtt at russiska búskapinum og russiskum uttanríkispolitiskum viðurskiftum. Politiskt og handisliga kann henda støðan lættliga gerast viðkvom, tá so nógv onnur vestanlond taka frástøðu frá Russlandi. Tí gerst føroyski búskapurin ov bundin av russiskum keyparum, verður ógvuliga trupult hjá Føroyum at standa saman við sínum sameindu, ið tala at hernaðarligum russiskum agressiónum og mannarættindabrotum og ynskja, at Føroyar gera tað sama.

At vit útflyta so nógv til Russlands og samstundis fáa vitjan av amerikansku verjuni, sum kannar havnir í Føroyum, líkist eitt sindur støðuni undir kalda krígnum, tá bæði stórveldini royndu at gera ávirkan sína galdandi allastaðni. Tá spenningarnir økjast, og viðurskiftini kølna millum tey stóru, enda tey smáu ofta í klemmu.

Stóri útflutningurin til Russlands kann væl síggjast sum eitt slag av broti í mun til onnur vestanlond, og m.a. danir hava ávarað føroyingar ímóti at gera ein fríhandilssáttmála við Russland.[91] Eisini er hugsandi, at USA kann finna uppá at leggja trýst á føroyingar, um tey meta, at vit gerast alt ov knýtt at Russlandi. Ella sum Berlingske spurdi í fjør, tá táverandi sendikvinnan Carla Sands vitjaði í Føroyum:

> **“Fisk til Russlands? Ella stórpolitikk við USA?”[92]**

Vøruútflutningur til Russlands
í mió. kr. árini 2008-2020




*Kelda Hagtova Føroya. Útflutningur til Russlands, skiftur á mió. kr.*

[90] Hagstova Føroya (2021)

[91] https://www.kristeligt-dagblad.dk/danmark/eks-udenrigsminister-advarer-faeroeernevil-indgaa-en-frihandelsaftale-med-putins-rusland

[92] https://www.berlingske.dk/samfund/fisk-til-rusland-eller-storpolitik-med-usaverdenspolitikken-har-indhentet

# Valið millum heimsáskoðanir

Tað var millum annað eisini hetta "valið" millum politiskar "heimsáskoðanir", sum viðvirkaði til kúvendingina hjá Fólkaflokkinum í NATO-spurninginum í 80'unum. Nýggja støða floksins var sera nógv merkt av einum ótta fyri Sovjet, "kommunistisku heimshóttanini" og russiskum virksemi í og kring Føroyar. Dagblaðið meinti, at Føroyar ikki longur kundu vera uttanveltaðar, tí russar longu høvdu yvirtakið á sjónum í Norðuratlantshavinum og vóru nærverandi kring Føroyar, og Óli Breckmann helt uppá, at tey á leið 100 NATO-fólkini í Føroyum ongan møguleika høvdu móti teimum "í minsta lagi 200 russisku hermonnunum", sum altíð funnust í føroyskum havnum.[93] Harafturat staðfesti flokkurin, at tað var við NATO, at friður og frælsi best kundu tryggjast.

Tað var sum sagt fólkatingslimurin Óli Breckmann, sum agiteraði sterkast fyri nýggju NATO-støðuni hjá flokkinum. Hann vísti ferð eftir ferð á meiningakanning, sum hevði víst, at meiriluti av Føroya fólki vóru fyri at varðveita NATO-støðirnar í Føroyum, og at ein stórur meiriluti sum heild stuðlaði NATO. Í hesum samanhangi heitti hann eisini alment á Erlend Patursson og Tjóðveldi um at viðurkenna, at hetta var hugburðurin hjá meirilutanum av fólkinum.[94] Meiningakanningin (sí mynd niðanfyri) vísti eisini hugburðin hjá føroyskum floksveljarum til limaskapin í NATO, og mótpólarnir vóru Sambandsflokkurin (87 % fyri óbroyttum limaskapi) og Tjóðveldi (67 % ímóti limaskapi). Millum javnaðar- og fólkafloksveljarar vóru lutfalsliga tey flestu fyri óbroyttum limaskapi.[95]

Meðan Sambandsflokkurin og Tjóðveldi so at siga stóðu rimmarfastir hvør sínu megin NATO-spurningin, og høvdu gjørt tað leingi, var tað samstundis greitt, at Javnaðarflokkurin hevði flutt seg rættiliga langt. Saman við øðrum norðurlendskum sosialdemokratum vóru javnaðarfólk farin at seta fleiri spurnartekin við dominerandi leiklutin hjá USA í heimspolitikki, og NATO varð í tí samanhanginum lýst sum eitt amboð fyri amerikanskari og evropeiskari imperialismu og sum ein hóttan móti frælsi og fólkaræði. Javnaðarflokkurin bleiv sum heild ávirkaður av friðarrørslunum í 70- og 80-unum, og nógvar teirra vóru annaðhvørt pasifistiskar, tjóðskaparligar ella kommunistiskar í grundvirðunum.[96] Felags fyri flestu teirra var tó eisini, at tær ótroyttiliga átalaðu, at Føroyar av órøttum vóru partur av NATO, og at hernaðarligu støðirnar í Føroyum í roynd og veru vóru ólógligar amerikanskar ella NATO-støðir.[97]

Eisini javnaðarblaðið Sosialurin fór at skriva meira kritiskt um NATO og USA. Óttin, fyri at radarin á Sornfelli hevði gjørt Føroyar til eitt bumbumál hjá Sovjet, gjørdi nógv um seg. Í juni í 1982 skrivaði Sosialurin á forsíðuni "Føroyar eru eitt sjálvsagt bumbumál". Nakrar mánaðir seinni svaraði Dagblaðið (mynd niðanfyri) aftur við samrøðu við leiðaran í Mjørkadali, sum avsannaði tíðindini. Í 1984 kundi forsíðan á Sosialinum avdúka, at "Stórbardagin um Atlantshavið verður við Føroyar". Soleiðis bardust dagbløðini sínámillum sama politiska dyst sum flokkarnir.

At Fólkaflokkurin kúvendi og gjørdist NATO-vinarligur, meðan Javnðarflokkurin fór øvutan veg, er helst greiðasta hugsjónarliga skiftið, sum fór fram í føroyska NATO-spurninginum undir kalda krígnum. Javnaðarflokkurin flutti seg sostatt sama veg sum aðrir norðurlendskir javnaðarflokkar tá og


FØROYSKIR NATOSTUÐLAR - hvørjir eru teir?

Ein kanning er gjørd í Føroyum fyri at lýsa, hvørja støðu føroyingar hava til okkara limaskap í Nato-verjufelagsskapinum.

Spurd blivu 129 úr Fólkaflokkinum, 139 úr Sambandsflokkinum, 122 úr Javnaðarflokkinum og 139 úr Tjóðveldisflokkinum.

Á myndini sæst hvussu hesi íalt 529 úr teimum nevndu fýra flokkunum hava svarað uppá tríggjar teir settu spurningarnar, nevniliga um ein gongur inn fyri framhaldandi og óbroyttum føroyskum limaskapi (ÓBROYTT), um ein ynskir Føroyar óheftar av øllum verjufelagsskapum ÓHEFTIR), ella um ein ynskir sjálvstøðugan føroyskan limaskap innan NATO (SJÁLVST.).

Mótpolarnir í føroyskum verjupolitikki eru Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, meðan Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin minna nógv um hvønn annan, sum í so mongum øðrum spurningum. 87,1% úr Sambandsflokkinum ganga inn fyri óbroyttum limaskapi í Nato, meðan 66,9% úr Tjóðveldisflokkinum eru beinleiðis ímóti hesum limaskapi.

Føroyskir Natostuðlar - teir vóru, og teir eru, fyrst og fremst í Sambandsflokkinum.

Tað sæst eisini týðuliga av myndini. P.E.



*Dimmalætting, 11. juni 1987*

[93] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 153

[94] Ibid. s. 153

[95] Dimmalætting, 11. juni 1987. Føroyskir NATOSTUÐLAR – hvørjir eru teir?

[96] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 144-147

[97] Ibid. s. 164



NATO og Føroyar

P.E. Juhl, oberstloytnantur, leiðari av støðini í Mjørkadali:

»Meti ikki, Føroyar eru avgerandi bumbumál«

— Støðin í Mjørkadali í sjálvum sær ger ikki Føroyar til nakað bumbumál, og persónliga meti eg ikki, Føroyar standa ovarlaga á nøkrum lista yvir bumbumál hjá Sovjet.

— Tekniska menningin seinastu árini hevur gjørt, at Føroyar eru av minni hernaðarligum týdningi, og hetta sama er galdandi fyri radarstøðina í Mjørkadali.

— Skuldi tað hent, at russar lupu á Føroyar, er støðin í Mjørkadali einasta

frá møguligum loftálopi móti einum ella fleiri av limalondunum í NATO.

Dagblaðið hevur vent sær til Poul Erik Juhl, oberstloytnant, sum er ovasti fyri støðini í Mjørkadali. Vit hava spurt hann, hvørjar uppgávur støðin í Mjørkadali hevur í hesum sambandi.

— Innan NATO hevur støðin í Mjørkadali triggjar høvuðsuppgávur. Tann fyrsta er at hava eftirlit við loftrúminum yvir og rundan um Føroyar.

verjusamgongan í eini kreppustøðu ongan sjálvstøðugan myndugleika hevur.

Innan NATO er tað Atlantkommandoin, ið hevur verjuna av Føroyum hendi. Uppgávan hjá Færøernes Kommando innan NATO er at hava eftirlit við skipaferðsluni við Føroyar. Søren Laub, kommandørur á Færøernes Kommando, sigur, at allar upplýsingar um fremmandar herflotaeindir verða latnar víðari til

tíðindablaðið sosialurin

FØROYAR ERU EITT SJÁLVSAGT BUMBUMÁL

*Dagblaðið, 1. septembur 1982*

fataði nú stóra trupulleikan í heimspolitikkinum sum verandi bæði USA og Sovjet - og kanska enntá í ávísan mun, at USA var hin verri.[98]

Tað er hugsandi, at kúvendingin hjá Fólkaflokkinum kom væl við hjá Tjóðveldinum. Flokkarnir høvdu jú deilt hesa stóru NATO-mótstøðuna sínámillum gjøgnum 50-, 60- og 70-ini, men nú bar til hjá Tjóðveldinum at standa meira einsamallur á júst tí partinum av føroysku NATO-mótstøðuni, sum eisini ynskti at skipa Føroyar sum fullveldi.

Blaðið Fríu Føroyar kom eisini skjótt við einum aftursvari til Fólkafloksins kúvending, og legði dent á tjóðskaparspurningin:

> **"Radikali sjálvstýrisflokkurin í Føroyum farin upp í part teirra, ið sum fremsta endamál hava at týna og forða sjálvstýri hjá tjóðum um allan heim."[99]**

Sum heild kann sostatt sigast, at Tjóðveldi og Sambandsflokkurin vóru teir av teimum stóru flokkunum, sum ikki broyttu støðu til NATO undir kalda krígnum. Sambandsflokkurin var yvirhøvur fyri NATO-limaskapi, meðan Tjóðveldi var ímóti.

Tað er kanska á einari leið at siga, at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vóru teir av teimum stóru flokkunum, sum at kalla mest lótu sær lynda í NATO-spurninginum. Hetta er í øllum førum galdandi tey fyrstu áratíggjuni eftir kríggið, har tað í nógv størri mun vóru Fólkaflokkurin og Tjóðveldi, sum talaðu at og agiteraðu ímóti NATO í Føroyum. Hetta er kortini ikki so løgið, tá hugsað verður um, at spurningurin um NATO í Føroyum hongur óloysiliga saman við viðurskiftum millum Danmark og Føroyar og ríkisrættarligu støðu okkara. Spurningurin um NATO og útlendskt yvirvald í Føroyum varð sjálvsagt ofta vavdur saman við, at tað vóru danir, sum í roynd og veru ráddu í Føroyum og góvu Føroyar upp í hendurnar á NATO og USA. Tann mótstøða og agitatión, sum tískil gav góða politiska meining fyri loysingarflokkarnar, gav sostatt helst ikki líka góða meining fyri Javnaðar- og Sambandsflokkin.

Hetta var galdandi upp til 80-ini, tá Javnaðarflokkurin, sum nevnt omanfyri, gjørdist alsamt meira kritiskur mótvegis USA og NATO sum heild, meðan Fólkaflokkurin gjørdist meira NATO-vinarligur.



FRÍU FÖROYAR

FRIÐUR — UMHVØRVISVERND — SOSIALISTISKT TJÓÐVELDI

Nr. 43 Fríggjadagur 12. desember 1986 4. ár Leysasøla: 5 kr.

Sannleikans stund hjá Fólkaflokkinum

*Kúvending enn einaferð*

Radikali sjálvstýrisflokkurin í Føroyum farin upp í part teirra, ið sum fremsta endamál hava at týna og forða sjálvstýri hjá tjóðum um allan heim.

*Vit á FRÍU FØROYUM gerast als ikki ovfarin av tí, at Fólkaflokkurin nú hesar dagarnar kúvendi í hernaðarmálinum, so at hann í dag er vorðin NATO-flokkurin her á landi.*

hernaðarsamgonguna» í lag. Og hvussu tey lond, teir vildu hava uppi, gjørdust limir í krígsfelagsskapinum.

Sokallaðu »vestanveldini«, við USA og Bretlandi á odda, vóru ikki so nøgd

lokin, vóru summir, ið mæltu til at halda áfram við krígnum — men nú til tess at gera enda á Sovjetsamveldinum. Hesa hugsan høvdu eisini nazista-oddamenninir, t.d. Goebbels, sum til tað seinasta væntaðu, at vend fór at koma í, og at vestanveldini fóru at kúvenda og venda vápnunum ímóti »felags fíggindanum«: sosialismuni. Í skjølum frá hesi tíðini sæst eisini, at hendan hugsan lá frammalaga í huganum



*Fríu Føroyar, 12. desembur 1986*

[98] Jensen, B. (2004) Færøerne under den kolde krig, s. 159

[99] Fríu Føroyar, 12 desembur 1986. Sannleikans stund hjá Fólkaflokkinum

# Hvat siga flokkarnir í dag?

Hyggja vit at, hvat teir stóru flokkarnir siga í stevnuskránni í dag, so er tað bara Tjóðveldi, sum nevnir NATO í politikkinum og sigur, at Føroyar skulu skipa beinleiðis sambond við NATO og grannalond um verjumál. Harumframt vil flokkurin virka fyri at skipa eina samgongu í Norðuratlantshavi millum Føroyar, Ísland, Grønland og Noreg.[100] Sum heild tykjast flokkarnir á einum máli um, at tað er løgtingið, sum skal hoyrast og taka avgerðir um trygdar- og verjupolitikk á føroyskari jørð, og at Føroyar í størstan mun skulu menna egin politisk og handilslig sambond bæði eystur- og vestureftir, og at vit í minstan mun skulu gerast partur av altjóða politiskum ósemjum millum lond.

Havandi í huga aktuellu støðuna, har ES og Russland hava sett tiltøk í verk hvørt móti øðrum, samstundis sum føroyski útflutningurin til Russlands er størri enn nakrantíð, gerst greitt, at ósemjur og trætur hjá øðrum ikki eru serliga avgerandi fyri føroysk handilssambond.

Vit velja hvørki NATO til ella frá. Í øllum førum ikki í almennum politiskum skráum. Eingin sigur greitt nei til NATO. Og flokkarnir, sum siga ja, gera tað ikki í nakrari ítøkiligari stevnuskrá.

Tó at einstøku flokkarnir tykjast rættiliga ógreiðir á hesum økinum, so hava samgongur gjøgnum tíðina kortini tikið støðu til NATO. Í nýggjastu frágreiðingini um uttanríkismál, sum landsstýrismaðurin legði fram í apríl mánaði 2021, varð staðfest, at samgonguflokkarnir mettu, at Føroyar sum partur av vesturheiminum áttu at stuðlað NATO, tá tørvur er á tí:

> **“Útgangsstøðið hjá landsstýrinum hevur frá byrjan verið, at Føroyar sum eitt vesturlendskt fólkaræði eiga at lata sítt til felags verjuna í NATO, tá ið tørvur er á tí. Í samsvari við afturvendandi ynskið um, at Føroyar skulu hava innlit í og ávirkan á viðkomandi trygdar- og verjupolitisk mál, vil landsstýrið m.a. tryggja sær atgongd til tær upplýsingar, ein lofteftirlitsradari fær til vega, og at føroysk ynski og atlit annars verða gingin á møti í sambandi við ætlanina.”[101]**

Eisini gjørdi løgmaður herfyri í lesarabrævi støðu Sambandsfloksins greiða:

> **“Eg eri ósamdur við teimum, sum vilja javnseta Kina, Russland og USA í trygdarpolitiskum høpi. Vit samstarva væl við øll trý stórveldini, men tá ið vit tosa um trygdarpolitikk er – og verður – vesturheimurin okkara stavnhald. (...) Okkara strategiska støða í Norðuratlantshavinum er ikki til sølu fyri hægstbjóðandi. Vit eru ein samrunnin partur av vesturheiminum og NATO.”[102]**

Orðaskiftið um radaran á Sornfelli, sum eftir ætlan skal setast upp eftir mong ár við ongum hernarligum útbúnaði í Føroyum, hevur sostatt havt við sær, at flokkarnir í størri mun aftur hava givið NATO-støðu sína til kennar. Út frá hesum ber sostatt til at staðfesta, at verandi samgonguflokkar tykjast samdir um, at Føroyar hoyra til vesturheimin, og at vit harvið eisini eru ein inngrógvin partur av NATO-samstarvinum. Í lesarabrævinum legði løgmaður eisini dent á, at NATO tryggjar friðin, og at føroyingar eru noyddir at taka støðu - onkur vil kanska siga - velja síðu:

> **”NATO er grundvøllurin undir trygd og varandi friði í Vesturheiminum. Eisini her hjá okkum. (...) Tað er bláoygt at halda, at vit altíð kunnu flúgva undir radaranum og ikki nýtast at taka støðu ella fylgja okkara sameindu. Tíðin er búgvin til, at vit taka støðu. At vit alment tora at siga, hvørji okkara áhugamál eru og støðugt virka fyri at røkja tey.”[103]**

Orðaskiftið undir framløguni hjá landsstýrismanninum í uttanríksmálum gav eisini eina fatan av, hvar Fólkaflokkurin

[100] https://www.tjodveldi.fo/?page_id=351

[101] Uttanríkis- og mentamálaráðið. (2021) Frágreiðing um úrvald uttanríkismál, s. 11

[102] Á Steig Nielsen, B. (2021) Vesturheimurin er okkara stavnhald http://www.samband.fo/Default.aspx?ID=156&M=NewsV2&PID=555&NewsID=2434

[103] Á Steig Nielsen, B. (2021) Vesturheimurin er okkara stavnhald

stendur í NATO-spurninginum. Annika Olsen legði dent á, at Føroyar eiga at fáa okkurt afturfyri at lata radaran byggja á Sornfelli, men at flokkurin yvirhøvur tekur undir við NATO. Í svari til viðmerking frá Henriki Old, segði tingkvinnan soleiðis:

**"Mær kunnugt hevur Føroyar ikki verið ímóti NATO, og hevur Fólkaflokkurin heldur ikki boðað frá at vera ímóti NATO og ikki at taka undir við at tryggja heiminum trygd og verju, men vit krevja okkara rætt at fáa tað, sum vit hava rætt til. At seta ein radara upp á Sornfelli er ikki bara bara, og tí skal mann vera ógvuliga miðvísur í síni tilgongd, men Føroyar og Fólkaflokkurin tekur undir við, at mann skal vera við til at tryggja vernd og trygd í norðurhøvum."**[104]

Formaður Javnaðarfloksins legði dent á, at tað er ein avbjóðing, at danir síggja ríkisfelagsskapin sum ein eindarstat í altjóða samstarvi, tí tað forðar okkum í at hava sjálvstøðugan limaskap og elta egin áhugamál, tá hesi eru í stríð við donsk áhugamál. Hann staðfesti eisini, at fyri Javnaðarflokkin hoyra Føroyar til ta vesturlendsku samgonguna, men, at tað er løgtingið, sum skal avgera, um ein radari skal byggjast ella ikki:

**"Tað er tann størsta avbjóðingin í ríkisfelagsskapinum, at vit ikki kunnu umboða okkara egnu áhugamál í altjóða felagsskapum, tí onkuntíð hava vit mótstríðandi áhugamál við donsk áhugamál. Tað er løgtingið, sum skal samtykkja radaran. (...) Hyggja vit eftir, hvar vit eru politiskt, tá tað kemur til verju- og trygdarpolitikk, so er eingin ivi um, at vit eru partur av vesturheiminum og hoyra til ta vesturlendsku samgonguna. Men búskaparliga verða vit í ávísan mun hildin uttanfyri."**[105]

Tjóðveldi leggur fyri sín part eisini dent á, at føroyingar mugu sleppa at virka sjálvstøðugt í altjóða samstarvi, men er meira ógreiður um tað júst er vesturlendsku samgonguna, vit hoyra til. Dentur verður í staðin lagdur á, at Føroyar uttan nakra fólkaræðisliga viðgerð eru drignar upp í altjóða hernaðarpolitiska talvið millum eystur og vestur, og at danir hava havt stórar fyrimunir av hesum. Tingkvinnan Hervør Pálsdóttir segði soleiðis í røðu síni:

**"Vit vita, at gjøgnum seinastu øldina hava Føroyar verið nýttar sum ein finna í hernaðarpolitiskum talvi, har onnur hava tikið sær rættin at taka avgerðir í okkara landi. (...) og hava fingið stórar fíggjarligar og uttanríkispolitiskar fyrimunir av hesum (...) Tjóðveldi byggir á altjóða hugsjón og altjóða samstarv. Vit vilja virka fyri friði, fyri hernaðarligari avdubbing."**[106]

Bjørt Samuelsen leggur afturat, at uttanríkispolitiska støða Føroya er avbjóðandi, tí vit ikki sjálvi hava fult ræði á økinum – og harvið ikki sjálvi kunnu luttaka á jøvnum føti í altjóða samstarvi. Sambært tingkvinnuni skapar tað eina óvissu um, hvat Føroyar í veruleikanum eru í altjóða samanhangi:

**"Vit eru bæði stikað inni, og enn verri, vit detta alla tíð niður ímillum fleiri stólar, tí hvørji eru vit í veruleikanum í altjóða samanhangi?"**[107]

Orðaskiftið vísir greitt, at NATO-spurningurin, og spurningar um altjóða samstarv yvirhøvur, hanga óloysiliga saman við ríkisrættarligu støðu okkara. At støðan er fløkt av tí, at Føroyar hava avmarkaðar uttanríkispolitiskar heimildir, og at áhugamál okkara stundum eru mótstríðandi donskum áhugamálum.

Tó tykist rættiliga greið semja vera millum flokkarnar um, at føroyskir myndugleikar skulu hoyrast og hava nakað at siga í trygdar- og verjumálum, sum hava við Føroyar at gera. Og ein meiriluti av flokkunum tykjast eisini samdir um, at Føroyar hoyra til vesturlendsku samgonguna.

104 https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9627#

105 Ibid.

106 Ibid.

107 Ibid.

# Hvat so nú?

Seinasta árið eru NATO og verjumál aftur komin á breddan í føroyskum politikki. Nýggi radarin, sum ætlanin er at seta upp á Sornfelli, ger, at spurningar, um hvør veruliga hevur uttanríkispolitiskan og verjupolitiskan avgerðarrætt í Føroyum, aftur verða reistir. Tað er nógv, sum bendir á, at slíkir spurningar fara at fylla meira í politiska orðaskiftinum í Føroyum komandi árini, nú støðan verður spentari í Arktis; Norðurlond dubba á verjuøkinum, meðan kappingin millum USA, Russland og eisini Kina harðnar. Føroyingar fara kanska aftur at kjakast um, hvør leiklutur okkara skal vera á altjóða pallinum: í hvønn mun vit kenna okkum heima í vesturlendsku samgonguni, og í hvønn mun vit yvirhøvur kunnu velja frítt, hvør kósin skal vera.

Hóast vit skriva eitt annað árstal, og limirnir í løgtinginum og landsstýrinum ikki eru tey somu, eru viðurskiftini í dag ógvuliga lík teimum, sum føroyskir miðlar lýstu fyri 30 árum síðani. Í dag verður eitt nú sagt, at nýggi radarin á Sornfelli skal tryggja, at einki hol er í lofteftirlitinum kring Føroyar. Í 1989 skrivaði Sosialurin nærum júst tað sama:

> **"Early Warning ávaringarstøðin á Sornfelli hevur sera stóran hermálsligan týdning fyri bæði NATO og USA. Uttan hesa støð verður eitt hol í samlaðu verju-ávaringarskipanini hjá NATO, sum røkkur úr Alaska og heilt eystur til Bretlands. Støðin á Sornfelli er ein liður í hesi skipan."**[108]

At henda søgan endurtekur seg, sigur okkum, at hóast Føroyar ikki ynskja at gerast partur av ósemjum og trætum hjá øðrum, kunnu vit dragast upp í tær. At træturnar og ósemjurnar standast av og snúgva seg um júst tað økið, sum Føroyar liggja á. Tað sigur okkum eisini, at vit, um vit vilja tað ella ei, ein dag kanska verða noydd at "velja síðu".


Síða 12 tíðindablaðið sosialurin Nr. 118 — 14. oktober 1989

Føroyar stóran hermálsligan týdning fyri NATO og USA

*Sosialurin, 14. oktobur 1989*

[108] Sosialurin, 14. oktobur 1989. Føroyar stóran hermálsligan týdning fyri NATO og USA

# 2 PARTUR

## VANDI

# VANDI

## Nýggjar hóttanir og fleirtáttað krígsførsla

*(hybrid warfare)*



Eitt er, hvat vit vilja verja okkum ímóti, og hvørji lond vit helst vilja samstarva við. Eitt annað er, hvat vit sjálvi *megna* at verja okkum ímóti. Og um vit yvirhøvur hava nakra verju móti nýggjum sløgum av álopum.

Londini rundan um okkum hava seinastu árini lagt størri dent á at styrkja tilbúgvingina móti sokallaðum cyber-álopum og hava cyber-trygdardeplar sum almennar myndugleikar, ið taka sær av yvirskipaðu trygdini. Í Føroyum er eingin tílíkur depil, og netverjan í dag er m.a. samansett av einum samstarvi ímillum Føroya Tele, løgregluna og Gjaldstovuna. Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vísti í juli mánaði í ár á, at hetta ikki er nøktandi, og at ein almennur cyber-trygdardepil átti at verið settur á stovn í Føroyum.

> **“Vandi er á ferð, og tí mugu vit uppgradera nettrygdina hjá okkum føroyingum, bæði hjá landinum, landsstovnum, kommununum og ikki minst vinnufyritøkunum”**
>
> **Jørgen Niclasen við útvarpið hjá Kringvarpi Føroya 1. juli 2021.**




Útsøgnin hjá Jørgeni Niclasen um tørvin á føroyskari netvernd, kom í kjalarvørrinum av, at Føroya Tele hevði megnað at steðgað átta sokallaðum DDoS-álopum.[109] Talan er um netálop, hvørs endamál er at gera maskinur, skipanir ella tænastur óvirknar. Slík álop kunnu raka handilsgeiran, men í ringasta føri eisini orku- og heilsugeiran. Tey kunnu gerast kostnaðarmikil, seta lív og heilsu í vanda, og eisini ávirka fólkaræðisligar tilgongdir. Fleiri fesk dømi um hetta eru í nærmastu grannalondum okkara.[110]

Hóttanarmyndin broytist, og hættirnir, sum lond og aktørar royna at ávirka ella skaða hvønn annan, eru at kalla endaleysir. Tað, sum fyrr skuldi verjast á landi, sjógvi ella í luftini, skal í dag eisini verjast á talgilda pallinum, har raksturin av grundleggjandi og lívsneyðugum undirstøðukervi, tænastum og upplýsingum liggur. Lond noyðast tískil at fyrihalda seg til ein nýggjan veruleika, har tey skulu verja seg ímóti fjøltáttaðum hóttanum og álopum í eini grásonu millum kríggj og frið, har amboðini og álopini ikki eru sum í vanabundnari krígsførslu. Tað snýr seg í høvuðsheitum um kampanjur við skeivari upplýsing (fake news), cyberálop og álop og hóttanir móti lívsneyðugum undirstøðukervi.[111] At stórar mongdir av persónligum og vinnuligum upplýsingum liggja á talgildum pallum, ger tað alneyðugt, at verja upplýsingarnar væl. Nevnast kann til dømis, at í fjør bleiv fyrsta liðið av fólki, sum hava gjørt herskyldu innan cyberálop, liðugt útbúgvið í donsku verjuni. Talan var um 15 “cybersoldatar”, sum gjøgnumførdu eitt eitt-ára skeið.[112]

Hesir cybersoldatarnir markera eitt skifti frá, at fregnartænastur sneytaðu í upplýsingum um hvønn annan serliga í hernaðarligum viðurskiftum, og nú eru somu viðbreknu upplýsingar, umframt tól, knýtt upp í internetið. Sostatt eru fleiri geirar í dag, sum kunnu rópast viðbreknir geirar (følsomme sektorer), tí upplýsingarnar hava so stórt virði. Tí eru fleiri lond farin at endurskoða hvørjir geirar í samfelagnum eru partur av týðandi undirstøðukervinum (kritiska infrastrukturinum), og tørva serliga vernd.

[109] https://kvf.fo/netvarp/uv/2021/07/01/froyskur-myndugleiki-skal-hava-byrgdina-avnetverjuni

[110] Millum annað varð norska stórtingið fyri álopið (https://www.stortinget.no/no/Hva-skjer-pa-Stortinget/Nyhetsarkiv/Pressemeldingsarkiv/2019-2020/it-angrep-motstortinget/), handilsketan COOP í Svøríki (https://www.berlingske.dk/virksomheder/hackere-bag-angreb-paa-coop-kraever-halv-milliard-kroner) og Mærsk samtaki (https://www.berlingske.dk/virksomheder/ukraine-russisk-cyberkrig-kostede-maersk-milliarder).

[111] Jakobsson, A.K. (2019) Når Hydra angriber: Hybrid afskrækkelse i gråzonen mellem krig og fred

[112] https://forsvaret.dk/da/nyheder/2020/forste-hold-cybervarnepligtige-er-fardige/

# Týðandi undirstøðukervi (kritiskur infrastrukturur)

Hugsa vit okkum, at framyvir verða enn fleiri tænastur bundnar at skjótu 5G tøknini – til dømis robottar, sum fremja skurðviðgerðir, sjálvkoyrandi bilar og andlitskennandi vakmyndatól – verður eftirlitið við 5G eisini til ein spurning um, hvussu væl ein stjórn megnar at stjórna landinum, veita sínum borgarum grundleggjandi tænastur og handfara viðbreknar upplýsingar um sínar borgarar.[113]

Trygdarpolitiski hugbankin, Atlantssammenslutningen, hevur eftirlýst eina brúkiliga allýsing av, hvat týðandi undirstøðukervi er fyri nakað. Við íblástri úr ES og USA hava tey skotið upp, at:

> **”Týðandi undirstøðukervi fevnir um fysisku og virtuellu skipanirnar og kapasitetirnar, sum eru so mikið grundleggjandi fyri Danmark, at verða hesi avmarkað ella oyðiløgd, fær tað oyðandi avleiðingar fyri fólkaheilsuna ella trygdina – tað veri seg fysiskt ella fíggjarligt.”[114]**

Hóast breiðu lýsingina, vísir Atlantssammenslutningen á, at ein slík allýsing megnar at eyðmerkja, hvør hevur ábyrgdina av alneyðugum samfelagstænastum, og haðani kann finnast fram til, hvørt samfelagið er bundið av ávísum veitarum ella eigarum, sum ein ikki altíð kann líta á. Síðani kann støða takast til, um avmarkingar skulu setast á, hvør kann veita og eiga ávísar tænastur.[115]

Við øktu talgildingini av samfelagsfunktiónum og tænastum er eisini væntandi, at alnet, fylgisveinar og alt talgilt samskifti gerst ein stórur viðbrekin geiri – ein altjóða vígvøllur, har nýggj sløg av álopum og hóttanum fara at vera møgulig (sí ritmynd niðanfyri).



# Cybertrygd, føroysk áhugamál og kinesiski listin

Ein háttur at finna fram upplýsingar og gera sær dælt av hesum, er at finna viðbrekna kunning um valdsmikil fólk, og brúka upplýsingarnar til at kroysta, ávirka ella mutrað tey, soleiðis at ein avgerð kann koma njósnaranum til fyrimunar.

Eitt møguligt dømi var, tá ið miðlarnir fingu hendur á eitt yvirlit yvir fleiri enn 100 føroyingar, sum kinesiska fyritøkan Zhenhua hevði gjørt.[116] Flestu føroysku persónarnir í yvirlitinum høvdu okkurt samband við KT og fjarskiftisøki, høvdu politiskt vald, ella vóru tætt í familju við hesi. Listin kom fram samtundis sum stórt rok var um hvørt kinesiski telerisin, Huawei, skuldi veita føroyingum 5G net.[117]

Málið um 5G netið í Føroyum vísti somuleiðis, at nettrygd ikki bert snýr seg um at fyribyrgja netálopum ella innsavnan av upplýsingum um persónar. Tað snýr seg eisini um stórpolitikk, um trygdarpolitikk og stríðið millum stórveldi, sum royna at gera ávirkanina galdandi allastaðni. Eitt stríð, har sjálvt smá lond sum Føroyar verða kroyst millum áhugamálini hjá stórveldunum, ið vit koma inn á niðanfyri.

[113] Jakobsson, A.K. 19. Desember, 2019 í Ræson

[114] https://atlant.dk/nyheder/2020/kritisk-infrastruktur-sektorer-nyt-brief/

[115] Ibid.

[116] http://kvf.fo/greinar/2020/09/18/160-foroyingar-i-kinesiskari-telduskipan

[117] Yvirlitið segði kortini einki um hvørjar, møguliga tyngjandi, upplýsingar vórðu savnaðarinn um persónarnar, sum kundu brúkast at trýsta hesi fólkini at taka avgerðir, ið tændu kinesiskum áhugamálum í Føroyum.

# CASE: HUAWEI-MÁLIÐ

## SETTI FØROYAR Í HEIMSPOLITISKAN SAMANHANG

Í 2019 gjørdust Føroyar brádliga pallurin, har stórveldini USA og Kina trinu inn í ringin og lótu seg í boksihandskarnar. Føroya Tele skuldi gera eina avtalu við ein veitara um nýtt 5G net. Kinesiska fyritøkan Huawei, sum longu hevði sett upp 4G net í Føroyum, var mest upplagda boðið, og alt bendi á, at Føroya Tele fór at halda fram við Huawei-samstarvinum.

Samstundis var USA farið at mæla føroyingum frá samstarvinum við Kina. Amerikanarar vildu vera við, at sambandið millum Huawei og kinesisku stjórnina var ov tætt, og at útgerðin frá televeitaranum í ringasta føri kundi misbrúkast til njósnaravirksemi. Hvørki Huawei ella Kina vildi hava slíkar ákærur sitandi á sær og vístu uppáhaldunum frá amerikumonnum staðiliga frá sær.

Margháttliga støðan gjørdist síðani, at stjórnarumboð úr bæði USA og Kina vitjaðu í Føroyum í eini roynd at ávirka føroysku avgerðina um ein komandi 5G veitara. Sendifólkini hjá ávikavist USA[118] og Kina[119] í Danmark skrivaðu enntá fleiri greinar í bæði donskum og føroyskum bløðum, har tey løgdu hvørt annað undir illgrunaverd motiv.

USA, sum hevur heimsins størsta búskap, brúkti altso óvanliga nógva orku uppá at sannføra eitt av heimsins minstu londum, Føroyar, um ikki at gera eina 5G avtalu við heimsins næststørsta búskap, Kina, sum somuleiðis brúkti nógva orku at sannføra Føroyar um tað øvuta. Í Kina eru á leið 1,4 milliardir íbúgvar, og bruttotjóðarúrtøkan svarar til ørandi 14 billiónir USD. Í USA búgva á leið 328 milliónir fólk, og er amerikanska bruttotjóðarúrtøkan heili 21 billiónir USD. Í Føroyum búgva beint yvir 53.000 fólk, og bruttotjóðarúrtøkan er áljóðandi 3 milliardir USD. Demografiskt og búskaparliga eru Føroyar nóg illa ein promilla afturímóti USA og Kina. Fíggjarligu avleiðingarnar av, hvønn 5G veitara Føroyar velja, kunnu altso undir ongum umstøðum hava avgerandi týdning fyri búskapin hjá hesum báðum stórveldunum.

Júst tí er tað sera áhugavert, at hesi londini nýta so nógva orku upp á eitt so lítið land. Allarhelst er orsøkin, at okkurt annað enn pengar eru avgerandi í málinum.

Serfrøðingar innan altjóða viðurskifti og trygdarpolitikk meta, at hetta er eitt fleirtáttað stríð millum stóru londini á heimspallinum: politiskar samgongur og álit teirra millum, tøkniliga kapprenningin millum USA og Kina, geopolitikkur og njósning.

Niðanfyri hyggja vit at, hví størri uppmerksemi er vent móti, hvønn fjarskiftiveitara lond velja sær, og hví alsamt fleiri lond eru farin at flokka fjarsamskifti sum 'kritiskan infrastruktur' ella 'týðandi undirstøðukervi' og seta munandi strangari krøv til veitarar. Somuleiðis verður hugt nærri at, hvørjum møguleikum 5G tøknin kann lata upp fyri, hvørjar vandar hetta kann hava við sær, og síðani hvat hetta merkir fyri Føroyar.

### FØROYAR, DANMARK OG HUAWEI (OG USA)

Danmark hevur í fleiri ár lagt nógva orku í at fáa betri viðurskifti við Kina, samstundis sum danska stjórnin – eins og mongu undanfarnu árini - støðugt lýsir USA sum sín týdningarmesta samstarvsfelaga.[120] Tað hevur sett Danmark í eina avbjóðandi støðu, har stjórnin skal finna eina javnvág millum at eftirlíka áhugamálunum hjá USA, uttan at tað fær avleiðingar fyri viðurskiftini við Kina.

### HVAT ER 5G?

Í stuttum er 5G komandi ættarliðið av fjarsambandi við internetið – ella '5. generatión'. Dagføringin fer at økja um ferðina á tráðleysum tólum. Tøknin loyvir fleiri tólum at tosa við hvørt annað, og sum frálíður kunnu tey enntá brúka hvørt annað sum antennur. T.v.s. tólini verða altíð tryggjað stytst møguliga frástøðu til best møguliga internetsambandið, og á tann hátt verður sambandið bæði skjótari og nógv støðugari.

Kelda: https://nyheder.tv2.dk/samfund/2020-08-24-nu-kommer-5g-i-danmark-her-er-de-nye-vilde-muligheder

[118] https://www.dr.dk/nyheder/penge/usa-ambassadoer-i-danmark-angriber-huaweidirektoer- han-arbejder-de-kinesiske

[119] https://www.fonyhedsbureau.dk/kinas-ambassadoer-flere-gange-paa-faeroeerneom-huawei/

[120] https://www.berlingske.dk/politik/pompeo-og-kofod-vi-er-hinandens-taettealllierede-o https://um.dk/da/nyheder-fra-udenrigsministeriet/newsdisplaypage/?newsID=F3FF133BF795- 4E6D-A876-EFBC895B57D3

Hóast Danmark, eins og Føroyar, í stóran mun hevði samstarv við Huawei um 4G netið, so endaði Danmark við at havna avtaluni við Huawei, og taka Ericsson framum. Í januar 2019 var 5G samstarvið millum Føroya Tele og Huawei framvegis í gongd, ið var undranarvert, nú alsamt fleiri lond søgdu 5G netið vera eitt trygdarpolitisk mál.

Claus Hjort Frederiksen, táverandi verjumálaráðharri, varð spurdur í 2018, um tað var skynsamt fyri Føroyar at velja sær Huawei sum 5G veitara. Í svarinum staðfesti verjumálaráðharrin, at fjarskiftiskervið var partur av 'alneyðuga undirstøðukervinum' og tískil eisini ein spurningur um 'national sikkerhed'. Av somu orsøk hevði Danmark eisini hert trygdarkrøvini, legði hann afturat og metti, at 5G tøknin og bannið, sum summi lond høvdu sett móti Huawei 'giver anledning til fornyede overvejelser'. Kortini legði Claus Hjort Frederiksen dent á, at lóggávurnar ikki vóru galdandi fyri Føroyar og Grønland. Svarið frá verjumálaráðharranum var ikki nøkur beinleiðis áheitan á, hvat Føroyar áttu at gera, men hann sáddi iva um, hvørt samstarv við Kina viðvíkjandi týðandi undirstøðukervi var eitt gott hugskot.[121 & 122]

Danska stjórnin kann sigast at hava verið ótrúliga varin í málinum um 5G, tí hon skuldi taka fyrilit fyri viðurskiftunum við trý lond samstundis. Meðan USA ynskti, at Danmark slepti samstarvinum við Huawei, ynskti Kina, at Danmark helt fram við Huawei sum 5G veitara. Í mun til Føroyar skuldi stjórnin ansa sær, soleiðis at hon ikki tók løgtingið ella landsstýrið av ræði í mun til, hvønn veitara Føroyar valdu sær.

Almenna fráboðanin um, at avgerðin um 5G veitaran er handilslig og ikki politisk, flutti ábyrgdina frá landsstýrinum og donsku stjórnini til telefeløgini, soleiðis at hvørki USA ella Kina kundu leggja Føroyar ella Danmark undir at reka politikk á fjarskiftisøkinum, umframt at Føroyar ikki kundu lasta Danmark fyri at taka Føroyar av ræði.

Ein partur av orsøkini, til at Danmark er vorðið meira harðmælt í mun til týðandi undirstøðukervi, er, at Danmark hevur tøtt sambond við USA, sum er vorðið meira atfinningarsamt mótvegis Kina og Russlandi eftir amerikanska forsetavalið í november 2020. Í beinleiðis sjónvarpi legði Joe Biden, amerikanski forsetin, russiska forsetan, Vladimir Putin, undir

## MØGULEIKAR VIÐ 5G

Mett verður, at økta og støðuga internetferðin verður eitt stórt frambrot fyri eitt nú heilsu, trygd, sjálvkoyrandi bilar og handil. Snildarmbond og -ur verða betur før fyri at halda eyga við heilsuni hjá fólki og ávara um álvarsamar sjúkur í góðari tíð ella boðsenda neyðhjálp. Dronur kunnu samstarva og samskipa størri tilbúgvingaruppgávur, halda eyga við ferðslu og eldsbruna og býta upplýsingarnar víðari. Í arktiska økinum er t.d. ein vælkendur trupulleiki, at londini ikki hava nóg nógva orku at halda eyga við ovurstóra land- og havøkjunum, samstundis sum fylgisveinarnir ikki hava nóg rættstundis myndir av økjunum. Tí er kærkomið við eitt nú dronum, sum sjálvar flúgva runt í økinum og senda beinleiðis myndaupptøkur víðari. Somuleiðis kunnu sjálvkoyrandi bilar fáa stundisligar dagføringar og tillagingar í koyringini, soleiðis at teir gerst tryggari og ómakaleysari í ferðsluni. Tøknin letur enntá upp fyri, at vit fáa robottar, sum í framtíðini skulu fremja skurðviðgerðir og vitlíki (artificial intelligence). 5G væntast eisini at loyva einum sokallaðum 'internet of things', altso at t.d. húsarhaldstól eisini fáa internetsamband og á tann hátt gera hús og samfelag snildari.

Av somu orsøk er stór kapping millum lond at vera fyrst at bjóða út 5G tøknina, tí hon kann vera avgerandi fyri fleiri aðrar alneyðugar vørur og tænastur í framtíðini.

## AVBJÓÐINGAR AV 5G

Størsti óttin viðvíkjandi 5G, og at knýta øll tól upp í internetið, snýr seg um trygd. Tí 5G letur dyrnar upp fyri heilt nýggjum vandum, um hon ikki riggar sum hon skal, ella at saníkar kunnu gera seg inn á tól á ein øðrvísi hátt enn áður, ræna og/ella misbrúka viðbreknar upplýsingar um fólk.

Ein grundleggjandi fortreyt, fyri at talgildingin av samfelagnum og samfelagstænastum verður gjørlig, er álit. Lond skulu hava álit á, at veitarin av 5G tøknini og tólunum, sum brúka 5G tøknina, er tryggur, og at tey eru vard fyri feilum, saníkum og sneytarum, umframt at allar persónsviðkvæmir upplýsingar verða handfarnar skynsamt.

[121] https://www.ft.dk/samling/20181/spoergsmaal/s404/svar/1549999/2004986/index.htm

[122] Henrik Old spurdi eisini verjumálaráðharran, um danska fregnartænastan vardi Føroyar móti "cyberangreb, påvirkningskampagner og lignende trusler". Verjumálaráðharrin visti á, at lógirnar viðvíkjandi "cyber- og informationssikkerhed" (NIS-lógin) ikki eru galdandi fyri Føroyar, og heldur ikki lógirnar fyri 'Forsvarets Efterretningstjeneste' (FE-lógin) ella 'Center for Cybersikkerhed' (CFCS-lógin). Verjumálaráðharrin segði tó, at 'Center for Cybersikkerhed' kann veita Føroyum sjálvbodna ráðgeving innan økið, hóast lógin ikki er sett í gildi. https://www.ft.dk/samling/20181/almdel/fou/spm/56/svar/1563229/2026428/index.htm

at stuðla morði.[123] Í miðlunum hevur nýggi uttanríkisráðharrin Anthony Blinken eisini ásannað, at terningarnir nú eru kastaðir til størstu geopolitisku uppgerðina í 21. øld.[124]

Summir eygleiðarar vilja vera við, at USA á henda hátt aftur vil vera undangonguland, sum heldur fast um eina 'rule-based world order' – altso, at heimsins lond skulu virða og arbeiða undir nøkrum felags reglum og virðum. Samstundis hevur USA peikað á Kina sum eina hóttan ímóti skipanini.[125] USA væntar eisini, at tættastu samstarvslondini stuðla undir eina heimsskipan grundað á reglur og tískil taka undir við atfinningum av londum, sum virka í stríð við virðini og reglurnar. Tá ið Danmark ger nógv burtur úr at siga umheiminum frá tætta sambandinum við USA, kann henda harða uttanríkispolitiska linjan hjá USA sostatt innibera, at Danmark eisini noyðist at sýna USA stuðul við at tekna grovari linjur mótvegis Russlandi og Kina.

Við øðrum orðum: Skal Danmark varðveita góðu viðurskiftini við USA, verður kanska neyðugt at taka størri frástøðu frá Kina og Russlandi. Vandin fyri Føroyar er, at sami logikkur kann gera seg galdandi fyri okkum.

## YVIRLIT YVIR LOND, SUM HAVA VALT HUAWEI FRÁ

Trýstið frá USA at standa saman móti Kina sæst týðiliga aftur í hvørji lond hava valt annan 5G veitara enn Huawei, ella sett størri avmarkingar á, hvussu útgerðin skal veitast.

Høvuðsorsøkin, til at summi lond ikki hava givið eftir amerikanska trýstinum um at frávelja Huawei tøkni, er, at USA ikki kundi vísa á eitt 5G alternativ.[126] Kortini vísir myndin omanfyri, at allarflestu Vestanlondini hava valt aðrar loysnir enn ta kinversku. Í frávalið sínum hava stjórnirnar lagt dent á, at tær av trygdarávum ynskja at stuðla evropeiskum loysnum. Á tann hátt kunnu evropeisku stjórnirnar ikki lastast fyri hvørki at gera eftir amerikanskum boðum ella miðvíst at útiloka Kina.




*Mynd: Council on Foreign Relations*

[123] https://www.bloomberg.com/news/articles/2021-03-17/biden-agrees-putin-is-killersays- he-ll-pay-price-for-meddling

[124] https://www.berlingske.dk/kommentatorer/usa-vil-skabe-en-ny-storpolitisk-ordenog-melder-aabent-ud-om-at

[125] https://api.altinget.dk/artikel/natos-ledere-ser-kina-som-en-fare-for-den-kendteverdensorden

[126] www.cfr.org/blog/china-huawei-5g

## HVÍ YNSKIR KINA AT VEITA 5G TIL ØLL HESI LONDINI?

Kina hevur eina langfreistaða 'Belt and Road Initiative' strategi, sum varð almannakunngjørd í 2013. Í stuttum er ætlanin at endurskapa søguligu silkileiðina – handilsleiðin, sum handilsliga knýtti saman vesturheimin við Miðeystur og Asia. Handilsleiðin flutti serliga silkivørur úr Kina til Miðjarðarhavið, har tær vórðu seldar víðari til Evropa, meðan ull, gull og silvur vórðu flutt eystureftir í tíðarskeiðinum 130 f.kr. og til 1453 e.kr.[127]

Kina hevur ætlanir um at gera fleiri menningarverkætlanir á leiðini millum Kina til Evropa, sum fyrst og fremst viðvíkja undirstøðukervi, ið skal stimbra búskaparligan vøkstur fyri allar partar. Ætlanirnar verða tó eisini sæddar sum ein roynd hjá Kina at vera til staðar í so nógvum londum sum gjørligt og á tann hátt vinna sær størri politiska ávirkan.[128]

Kinesisk feløg hava í fleiri umførum undirbjóðað aðrar aktørar í stórum kervisverkætlanum í øðrum londum og fáa serstakliga góð lán frá kinesiska statinum til at fullfíggja arbeiðið. Tá ið ein stjórn á slíkan hátt stuðlar feløgum í at vinna útboð aðrastaðni, sær tað brádliga ikki heilt ósakligt út.[129] Serliga lond í vesturheiminum hava tí roynt at finna mátar at verja seg ímóti at gerast beinleiðis ella óbeinleiðis bundin av Kina gjøgnum bíliga fígging av týðandi undirstøðukervi ella tøkniligum loysnum. Ein av leistunum er at seta í verk lóggávur, sum seta strangari treytir til útlendskar veitarar av og útlendskan ognarskap í undirstøðukervinum. Hesar eftirlitslóggávurnar merkja, at ávís útgerð og ávís undirstøðukervi skulu screenast (kannast) fyri útlendskan ognarskap.[130]

André Ken Jakobsson, sum granskar innan trygdarviðurskifti, og hevur víst serligan áhuga fyri avbjóðingunum innan ríkisfelagsskapin í sambandi við økta áhugan fyri Arktis, vísir somuleiðis á, at Kina møguliga hevur brúkt Føroyar sum eina royndarstøð fyri, hvussu tey kunnu brúka eitt 'offensivt diplomati' til at gera tvílandaavtalur – eisini uttanum Danmark. Hann metir, at kinesarar soleiðis kunnu fáa eitt fordømi fyri líknandi tvílandaavtalum, um samráðingar skulu gerast við Grønland uttan um Danmark.[131]

Ein annar granskari innan trygdar- og verjupolitikk, Peter Viggo Jakobsen, tekur undir við André Ken Jakobsson og vísir á, at største trygdarpolitiska hóttanin fyri Danmark liggur í Arktis júst vegna stórveldisrivaliseringina. Kina lýsir seg sjálvt sum ein 'near Arctic state', meðan USA ikki ynskir, at Kina fær fótafesti í arktiska økinum. Megnar Kina at gera seg galdandi í økinum fíggjarliga og politiskt, kann kinesiska stjórnin ávirka stjórnirnar í arktisku londunum til sín egna fyrimun. Sambært Peter Viggo Jakobsen meta amerikanarar tískil ikki, at man kann skilja trygdar- og handilspolitikk frá hvørjum øðrum.[132]

Tað er ikki bert í Føroyum, at samskifti hevur verið millum ráðharrar og Huawei. Í mai 2020 legði Berlingske fram innlit, sum miðilin hevði fingið í samskifti millum Huawei og danska forsætismálaráðið. Samskiftið vísti, at kinesiska telesamskiftisfelagið eisini hevði roynt at ávirka bæði Lars Løkke Rasmussen og Mette Frederiksen til at velja Huawei sum 5G veitara. Mest ítøkiliga dømið var, at Huawei stjórin boðaði Lars Løkke Rasmussen frá, at aðrar kinesiskar fyritøkur uttan iva fóru at vera meira sinnaðar at leggja pengar í og samstarva við Danmark, um TDC valdi Huawei sum 5G veitara. Um ein tílík avtala ikki gjørdist veruleiki, kundi tað hinvegin gerast trupult hjá Danmark at fáa álitisvekjandi samstarv við aðrar kinesiskar fyritøkur í Danmark.[133] Hetta samskiftið minnir um, hvussu aðalstjórin í føroyska Vinnumálaráðnum tók samanum boðini frá kinesiska sendiliðinum til vinnumálaráðharran: valdu Føroyar Huawei sum 5G veitara, var ein handilsavtala nógv meira sannlík, enn um Føroyar ikki valdu Huawei.

Síðani hevur danska stjórnin – fyrst Mette Frederiksen – sagt seg vera skeptiska viðvíkjandi útlendskum ognarskapi í týðandi undirstøðukervi í Danmark.[134] Frederiksen á baki staðfesti verjumálaráðharrin eisini, at 5G útgerð ikki skuldi veitast frá 'ikki-allieraðum' londum.[135 & 136]

127 https://www.britannica.com/topic/Silk-Road-trade-route

128 https://globalnyt.dk/content/kinas-nye-silkevejsprojekt-geopolitisk-strategi-ellerkapitalistisk- ekspansion

129 Ibid

130 Sí undir eftirlitslóggávunum í fylgiskjølunum

131 Maressa, J.E., Jensen, K., Kongstad, J. (2019) Færøerne er fanget og klemt i striden mellem Kina og USA

132 Ibid

133 Kruse, S., Winther, Lene. (2020) Afsløring: Kinesisk techgigant sendte "desperate" breve til Mette Frederiksen

134 Ibid

135 Lond, sum Danmark ikki er í beinleiðis samgongu við gjøgnum altjóða avtalur ella samstørv, umframt lond, sum Danmark ikki hevur felags áhugamál við, ella hvørs áhugamál ganga beinleiðis ímóti teimum donsku.

136 Breinstrup, T. (2020) Forsvarsminister: Nej til 5G-udstyr fra ikke-allierede lande

## TÁ IÐ HUAWEI SKULDI TIL FØROYAR

25. oktober 2018 sendi Føroya Tele út eitt tíðindaskriv, har ein stórbrosandi Jan Ziskasen var avmyndaður í lógvataki við Deng Taihua frá Huawei. Stóru tíðindini vóru, at Føroyar skuldu gerast eitt av fyrstu londunum í heiminum við 5G netsambandi, sum Huawei skuldi veita.[137]

6. juni 2019 kom aftur eitt tíðindaskriv frá Føroya Tele. Arbeiðið við 5G varð komið so mikið væl áleiðis, at 5G netið longu var royndarkoyrt í fyritøkuni.[138]

Danmark skuldi somuleiðis finna ein 5G veitara, og valdi TDC í 2019 at gera sáttmála við Ericsson heldur enn Huawei. Av somu orsøk gjørdist mikið rok í miðlunum um, har rørt varð framundir, at Danmark hevði valt ein veitara við trygdaratlitum heldur enn at taka vinnulig og atlit. Óttin var, at kinesiski staturin í prinsippinum kundi kroysta telefyritøkuna at misnýta 5G útgerðina sum lið í njósning.

5. november 2019 skipaði JP/Politikens hus fyri eini ráðstevnu um kinesiskan politikk, har eitt tema serliga snúði seg um, hvussu Kina nýtti tøkniliga menning í politikkinum. Á ráðstevnuni varð ítøkiliga spurt, hvørja avgerð Føroyar áttu at taka í mun til 5G veitara. Pallborðsluttakararnir, ið taldu fakfólk úr ymsum londum og stovnum, vóru ivaleys: Føroyar áttu at velja sær alt annað enn Huawei sum 5G veitara.[139] Dagarnar eftir varð Huawei tikið fram í mun til handils- og trygdarpolitikk í fleiri miðlum.

Síðani vístu seg fleiri snávingarsteinar í 5G-samstarvinum millum Føroya Tele og Huawei. Á vári 2019 vann føroyska telefyritøkan til dømis eitt útboð hjá Ríkispolitinum um at veita føroysku løgregluni nýggja samskiftistænastu við Huawei sum undirveitara. Seinni segði segði Ríkispolitiið seg ikki longur kundi góðtaka Huawei sum undirveitara til løgregluna í Føroyum. Vegna handilstiltøk, kundi Huawei kundi ikki longur fáa atgongd til vørur og tænastur frá amerikonskum framleiðarum sum eitt nú Linux og Android. Fyri Føroya Tele merkti tað, at tey máttu finna nýggjan undirveitara, sum gjørdist svenska felagið Ericsson. Samskiftisskipanin hjá løgregluni, KIMA[140], varð tikin í nýtslu í desember 2020 við Ericsson sum undirveitara.

Samstundis sáddu alsamt fleiri lond iva um trygdina hjá Huawei sum veitara. Seint á heysti 2019 kom stígur í samstarvið millum Føroya Tele og Huawei um 5G netið, vegna ivamál um Huawei og amerikansku handilstiltøkini móti kinesisku fyritøkuni. Um veturin tók málið dik á seg, og varð fleiri ferðir tikið upp á politiskum stigi, soleiðis at avgerðin um 5G ikki longur bert tyktist vinnulig men eisini trygdarpolitisk.



iskasen, samtaksstjóri á Føroya Tele, saman við Deng Taihua, President f
ess Solutions hjá Huawei.

Millum annað tók amerikanska sendifólkið, Carla Sands, tann 9. november tað óvanliga stigið at skriva eina kronikk í Berlingske, har hon staðiliga heitti á Føroyar um at sleppa ætlanunum um at brúka Huawei útgerð. Sama dag umbað kinesiska sendistovan ein fund við Føroya landsstýri. Bert tveir dagar seinni, 11. november, fundaðust umboð fyri kinesisku sendistovuna við Føroya landsstýri í Føroyum.

15. november skuldi Dagur og Vika gera eina samrøðu við Helga Abrahamsen um eitt heilt annað mál, men undir samrøðuni varð vinnumálaráðharrin tikin til síðis av aðalstjóra sínum, og fekk eina trúnaðarkunning um ætlanirnar hjá Kina, meðan mikrofonin hjá Kringvarpinum framvegis sat knappað á landsstýrismanninum. Kringvarpið ætlaði at senda ljóðbrotið tíðliga í desember, men eitt óvanligt fútaforboð[141] forðaði Kringvarpinum at senda brotið.

[137] https://www.ft.fo/nu-faa-foroyingar-5g/

[138] https://www.ft.fo/foroya-tele-tendrad-5g/

[139] Pallborðið var mannað av:
Andreas Bøje Forsby, Nordic Institute of Asian Studies, København
Martin Hala, Sinopsis, Prag
Christopher Walker, National Endowment for Democracy, Washington, DC
Shanthi Kalathil, International Forum for Democratic Studies, NED, Washington, DC
Lucrezia Poggetti, Merics, Berlin
Camilla Tenna Nørup Sørensen, Forsvarsakademiet

[140] *KIMA er navnið á skipanini, sum nútímansger tilbúgvingina hjá løgregluni, soleiðis at løgreglan trygt, skjótt og einfalt kann stroyma beinleiðis til onnur lið í skipanini og fyrireika aðrar partar av tilbúgvingini, áðrenn komið verður á skaðastaðið. Harumframt ber til at skriva, deila myndir, tosa saman og deila GPS-positión.

[141] Borgarar, fyritøkur og stovnar kunnu heita á dómstólar um at seta forboð móti virksemi, sum er skaðiligt fyri borgaran, fyritøkuna ella stovnin. Tað kann til dømis vera ólóglig nýtsla av patentum ella almannakunngerð av trúnaðarupplýsingum. Tekur dómstólurin undir við áheitanini, gerst tað til eitt fútaforboð móti virkseminum – í hesum førinum at KVF fekk forboð móti at almannakunngera upptøkuna av samrøðuni millum vinnumálaráðharran og aðalstjóran. Tað er revsivert ikki at virða fútaforboðið, og kann føra við sær bót, endurgjald ella fongsulsrevsing.

10. desember tók søgan, um hvussu Kina møguliga royndi at trýsta Føroyar at velja Huawei aftur fyri eina fríhandilsavtalu, kortini dik á seg. Fleiri danskir miðlar prentaðu søguna. Álvarsomu ákærurnar, sum staðfestu sambandið millum kinesiska statin og Huawei stóðu ikki ósvaraðar leingi, tí 11. desember fór Feng Tie, sendimaður Kina í Danmark, í miðlarnar, har hann staðiliga afturvísti, at Kina skal hava hótt Føroya landsstýri.

12. desember prentaði Jyllands-Posten eina týdda útskrift av samrøðuni millum Helga Abrahamsen og aðalstjóran. Í samrøðuni gjørdi aðalstjórin greitt, at:

> **"(...) hvis Føroya Tele underskrev aftale med Huawei, så stod alle døre åbne for en frihandelsaftale med Kina. (...) Og jeg forstod det sådan, at da den kinesiske ambassadør opsummerede, så havde han sagt, at hvis det ikke bliver det her, så bliver der heller ingen handelsaftale (...) Samtidig forstår jeg på det hele fra dem i udenrigstjenesten, at Forsvarsministeriet, måske også Statsministeriet, de giver udtryk for, at det nok ville være bedst, hvis I ikke valgte kineserne."[142]**

Hereftir kyknaði áhugin fyri hendingini eisini langt uttan fyri Føroyar og Danmark, harímillum fór Huawei sjálvt í miðlarnar at afturvísa eitthvørt samband við kinesisku stjórnina, meðan Carla Sands dúgliga smíðaði á heita jarnið við greinum um tað øvuta.

17. desember fór víðagitni tíðindamiðilin New York Times til Føroya at kanna málið, og 20. desember var stór grein at lesa um, hvussu lítlu Føroyar brádliga gjørdust ein pallur fyri stórpolitiska stríðið millum Kina og USA (sí mynd niðanfyri).




*Mynd: New York Times*

[142] https://www.berlingske.dk/globalt/dokumentation-laes-udskriften-af-den-moerklagtelydoptagelse

## AVLEIÐINGAR FYRI FØROYAR

Hóast Føroya Tele ikki longur kundi nýta Huawei útgerð í samskiftistænastuni til løgregluna, stóð teimum frítt at halda fast í Huawei avtaluni um 5G til føroyska samfelagið annars. Føroya Tele er ikki bundið at taka politisk men einans handilslig fyrilit. Kortini hoyrdist minni til ætlanirnar um 5G til Føroyar. Tað tóktist sum um, at avtalan varð sett í bíðistøðu.

Í drúgva tíð vildu hvørki danska ella føroyska stjórnin siga alment, hvørt avgerðin um 5G netið í Føroyum var av trygdarpolitiskum slag, og hildu fast í, at avgerðin var vinnulig. Hetta hevur havt við sær, at framvegis er eingin avgerð tikin, og løgtingið hevur ikki verið væl kunnað í málinum.[143a]

Verður havt í huga trýstið frá USA á sameindu londina at sláa manngarð um vesturlendsk virðir, og halda seg frá kinesiskari tøkni einumegin, og kinesisk lyfti um møguligar handilsavtalur hinumegin, er ikki løgið at tað hevur verið trupult at taka eina skjóta avgerð. Valdu Føroyar Huawei frá, sendi tað eitt politiskt signal um, at Føroyar stóðu saman við vesturheiminum, sum eisini vendu Huawei bakið, og at Vestanlond ikki lata seg trýsta av Kina. Kortini kunnu Føroyar eisini merkja sviðan av at velja Huawei frá. Kina er eitt av heimsins størstu londum og búskapum, og ein fríhandilsavtala við Kina kann vera gagnlig fyri føroyska búskapin. Síðani silda- og makreltrætuna við ES hava Føroyar trífaldað fiskaúflutningin til Kina, sum í 2018 var nærum 650 milliónir krónur. Í Føroyum kann Huawei avgerðin møguliga fáa avleiðingar fyri kinesisku vælvildina at keypa føroyskan fisk.[143 & 144a]

Harafturat kann tað gerast kostnaðarmikið fyri Føroyar at velja ein nýggjan veitara, um verandi Huawei útgerð skal skiftast út, ella ein nýggjur veitara ikki bjóðar eins kappingarførar prísir og útgerð, sum Huawei.[145a] Í roynd og veru hava kinesisku Huawei, sambært Ólavi Ellefsen, veitt eina framúr loysn til Føroyar, tá tað snýr seg um 4G.[144] Ætlanin hjá Føroya Tele hevur alla tíðina verið at menna Føroyar sum eitt av mest tøkniliga framkomnu londunum í heiminum, har gott samband er allastaðni, uttan mun til um tú ert á fjalli, í tunlum ella í miðstaðarøkinum. Huawei var ført fyri at bjóða Føroyum hetta í 2015, og tí varð farið frá Ericsson tá. Í Føroyum eru fleiri nýggjar tøkniligar loysnir undir menning, sum eru bundnar av 5G t.d. ein heilsutænasta, sum skjótt og einfalt ansar demensraktum fólki. Tá er alneyðugt, at 5G sambandið er støðugt og útbreitt.[145]

Endaliga avgerðin kann eisini fáa politiskar avleiðingar fyri, hvussu Føroyar umsita yvirtikin málsøki. Danska stjórnin er nevniliga farin undir arbeiðið, sum skal lúka kinesiska tøkni burtur úr týðandi undirstøðukervi[146]. Í ringasta føri kann tað føra við sær, at Danmark brádliga flytur fjarskiftisøki frá yvirtiknum málsøkjum í Føroyum, og leggur tað undir trygdarpolitikk, sum Føroyar sambært Heimastýrislógini ikki kunnu fáa ræði á. Tískil kunnu handilsmál brádliga gerast ein spurningur um trygd og uttanríkispolitikk, og Føroyar eru í vanda fyri at missa vald ella sjálvsavgerðarrætt á yvirtiknum málsøkjum.

Danska stjórnin hevur staðfest, at tað verður alsamt truplari at gera greiðan skilnað millum málsøkini, tí støðugt fleiri málsøki skulu taka trygdarpolitisk fyrivarni.[147] Kortini hevur stjórnin eisini gjørt greitt, at ongar avgerðir verða tiknar uttan um løgtingið, og í juni 2021 varð eisini eitt samstarvsráð stovnað, har trygdarpolitisk mál millum Grønland, Føroyar og Danmark kundu takast upp.[148]

[143] Hagstovan. Í 2019 var útflutningurin 845 mió. kr. og í 2020 minkaði útflutningurin niður í 319 mió. kr. – allarhelst ikki bert vegna Huawei málið men í størstan mun vegna koronu og útflutningsavbjóðingar í Føroyum.

[143a] 19. august gjørdi Føroya Tele avtalu við Ericsson. Leiðslan undirstrikaði, at tey ikki høvdu verið kroyst at frávelja Huawei, men at óvissurnar í sambandi við málið, hevði gjørt tilgongdina nógv drúgvari. Somuleiðis varð dentur lagdur á, at hóast Føroya løgmaður hevur boðað frá, at fjarskiftisøki nú er trygdarpolitiskt, metir Føroya Tele, at talan bert er um eina handilsliga avgerð.
http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/08/19/froya-tele-stjrin-vri-ikki-trst-av-politiskamyndugleikanum

[144] Bostrup, J. (2019) Kinas gigant banede vej for færøsk tech

[144a] Eftir at FT avgjørdi at velja Ericsson sum veitara, hevur Huawei sagt seg virða avgerðina. Politiskt hevði Kina, áðrenn kanningin fór til prentingar, framvegis ikki gjørt almennar viðmerkingar til málið."
https://www.in.fo/news-detail/huawei-vit-virda-avgerdina-hja-foeroya-tele

[145] Bostrup, J. (2019) Kinas gigant banede vej for færøsk tech

[145a] Sambært Jan Ziskasen skal alt netið skiftast út, tá ið farið verður til 5G - uttan mun til hvør veitarin er. FT stjórin ynskti ikki at siga hvussu nógv hetta kostaði, ella mun á útreiðslunum til Ericsson og Huawei. Hann legði kortini dent á, at tilboðini vóru ógvuliga tøtt.
http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/08/19/froya-tele-stjrin-vri-ikki-trst-av-politiskamyndugleikanum

[146] Í mai 2021 samtykti fólkatingið tvær lóggávur, sum skulu økja um trygdina í Danmark, tá ið tað kemur til týðandi undirstøðukervi. Lógirnar geva myndugleikunum í Danmark víðari heimildir at forða vinnuligum avtalum, um tað inniber, at útlendskir persónar ella fyritøkur skulu eiga í ella veita týdningarmiklar tænastur til Danmarkar. Lógirnar skulu tryggja, at samfelagstrygdin ikki verður hótt, tí yvirskipaða trygdin ella veitingartrygdin ikki er í lagi. Sí nærri kunning um lógirnar (ávikavist L191 og L190) í fylgiskjølunum.

[147] http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/05/19/yvirtikin-mlski-kunnu-elva-til-trupulleikar

[148] https://www.fonyhedsbureau.dk/rigsmoedet-varsler-nye-tider-i-rigsfaellesskabet/

## STØÐAN Í DAG

Alsamt fleiri lond eru farin at lýsa 5G og fjarskifti sum part av týðandi undirstøðukervinum, og hava bæði ES og NATO stuðlað og eggjað limalondunum til at seta upp strong trygdarkrøv til veitarar av samskiftisútgerð – og týðandi undirstøðukervi yvirhøvur. Av somu orsøk eru eisini fleiri lond, sum hava valt Huawei frá.

Hóast TDC longu hevur gjørt eina avtalu við Ericsson, er danska stjórnin farin at hvessa sær orðavalið, tá ið hon umrøður samskiftisøkið. Tá hon áður segði taluna vera um handilsligar avgerðir, ger stjórnin nú púra greitt, at hon metir telesamskifti vera part av týðandi undirstøðukervi. Hóast forsætismálaráðharrin ikki beinleiðis nevndi Huawei, segði Mette Frederiksen 13. juni 2020 við Berlingske, at veitarar av 5G skulu vera álítandi og ikki sinnaðir at undirgrava trygdarpolitisku áhugamálini hjá Danmark, og tískil skal 5G gerast partur av týðandi undirstøðukervi við lóg. Á tann hátt metti forsætisráðharrin, at óheftar treytir kundu setast til bæði útgerð og veitarar av útgerð til ríkisfelagsskapin.[149]

Í Føroyum hevur Føroya Tele ikki alment boðað frá, hvørt samstarvið við Huawei er slept, ella nýtt samstarv er komið í lag við annan veitara.[150] Løgmaður hevur tó alment boðað frá – sama dag sum Mette Frederiksen hvesti orðavalið innan fjarskiftisøkið – at fjarskifti verður ein inngrógvin partur av trygdarpolitikki í framtíðini. Bárður á Steig Nielsen vísti á, at hóast fjarskiftismál eru yvirtikin, verður undirstøðukervið á fjarskiftisøkinum eisini ein spurningur um trygdar- og verjupolitikk, og tískil verður neyðugt við tøttum samstarvi við donsku stjórnina um eina trygga lóggávu á økinum.[151] Danmark hevur síðani samtykt tvær lóggávur á økinum[152], sum ikki eru galdandi fyri Føroyar, men lagt hevur verið upp til, at Føroyar skulu fáa líknandi lóggávur, og hava tí havt eygleiðarar við í arbeiðsbólkinum, sum fyrireikaði lóggávurnar. Enn er ógreitt, nær lógirnar viðvíkjandi eftirliti við og undangóðkenning av veitarum innan týðandi undirstøðukervi verða lagdar fyri løgtingið.



[149] Mouritzen, K. (2020) Mette Frederiksen trækker nye grænser i fejden mellem Kina og USA: Coronakrisen har vist os hvor sårbare vi er

[150] 19. august gjørdi Føroya Tele avtalu við Ericsson. Leiðslan undirstrikaði, at tey ikki høvdu verið kroyst at frávelja Huawei, men at óvissurnar í sambandi við málið, hevði gjørt tilgongdina nógv drúgvari. Somuleiðis varð dentur lagdur á, at hóast Føroya løgmaður hevur boðað frá, at fjarskiftisøki nú er trygdarpolitiskt, metir Føroya Tele, at talan bert er um eina handilsliga avgerð. http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/08/19/froya-tele-stjrin-vri-ikki-trst-avpolitiskamyndugleikanum

[151] https://www.lms.fo/fo/kunning/tidindi/okkara-fjarskifti-skal-vera-dygt-og-trygt/

[152] Sí fylgiskjal um eftirlitslóggávur.




# Samanumtøka

Málið um hvør skuldi veita Føroyum útgerð til 5G net, avdúkaði, at áhugamálini hjá teimum risastóru tjóðunum Kina og USA eisini gera seg galdandi í Føroyum. Somuleiðis vísa lóggávurnar, sum fólkatingið hevur samtykt fyri at verja seg ímóti útlendskum eigarum og veitarum í týðandi undirstøðukervinum, at handilspolitisk mál hava fingið ein størri trygdarpolitiskan dám. Áðrenn undirskriftir setast undir handilsavtalur, skal handilsparturin góðkennast úr einum trygdarpolitiskum sjónarhorni: verða samfelagskritiskar funktiónir og tænastur ov bundnar at einum veitara ella eigara við áhugamálum, sum ikki hóska saman við okkara egnu?

Tískil er Huawei málið ikki bert ein handilslig avgerð – annars hevði Føroya Tele ikki havt fyri neyðini at steðga arbeiðinum við 5G netinum. Tað er ein avgerð, har umheimurin hevði áhuga í at ávirka føroyingar til at velja eina ávísa loysn og harvið fáa Føroyar at velja, hvørjum ein er í parti við. Ta avgerðina hava Føroyar, við síni ríkisrættarligu støðu, neyvan heimild til at taka einsamallar. Føroyar kunnu helst ikki leggja eina uttanríkis- ella trygdarpolitiska leið, sum ikki samsvarar við ta donsku.

Spenningurin í Arktis og kapprenningin millum stórveldini er sostatt ein avbjóðandi støða í mun til, hvussu ríkisfelagsskapurin skal virka. Tað er sannlíkt, at vit koma at síggja fleiri tillagingar, har Føroyar einumegin kunnu óttast, at fleiri yvirtikin málsøki fáa trygdarpolitiskan dám og tískil skulu fylgja somu linju sum Danmark. Og at vit hinumegin møguliga fáa størri innlit í uttanríkis-, trygdar-, og verjupolitikkin enn áður – eins og nýstovnaða samstarvsnevndin um hesi málini kann vera tekin um.

Gerst tað seinna til veruleika, kann væntast, at vit greiðari vita, hvar vit standa, og hvat vit vilja á altjóða pallinum. Og harvið eisini hvørja loysn vit velja – ella noyðast at frávelja - tá veitarar sum Huawei ella onnur áhugað banka uppá.

Bæði borgarin og samfelagið verða sannlíkt bundin av 5G netinum í framtíðini, tí 5G netið kann gera samfelagskritiskar funktiónir sjálvvirkandi – sum eitt nú veitingina av hita, el og vatni til húski – men júst tað ger funktiónirnar viðbreknar fyri internetsambandið og -trygdina.

Tí er ikki trupult at fáa eyga á, hví lond eru farin í eina kapprenning um at verða fyrst um málstrikuna við fullgóðari 5G tøkni. Tað gevur londunum ein stóran fyrimun í mun til tøkniligu menningina í framtíðini, og tey fáa lykilin til trygdina á netinum. Londini, sum eru fyrst við 5G tøknini, eiga og veita sostatt grundleggjandi undirstøðukervið, sum framtíðarinnar tøkni skal byggjast á, og kunnu ivaleyst fáa stóran fíggjarligan vinning burturúr.

Kina ger alsamt fleiri íløgur í undirstøðukervi aðrastaðni. Millum annað hevur tað ført við sær, at lond eru farin at seta fleiri forðingar fyri, hvør kann veita hvørjar tænastur, tí londini ikki ynskja at gerast bundin av útlendskum feløgum og londum, sum eru 'ótrygg'.

Hetta gjørdist sum sagt greitt fyri føroyingum, tá ið Føroya Tele skuldi finna sær ein veitara av útgerðini til 5G netið. Brádliga fingu Føroyar vitjanir úr Kina og USA, har royndir vóru gjørdar at fáa Føroyar annaðhvørt at taka av Huawei sum veitara ella venda kinesisku fyritøkuni bakið. Hvør veitir 5G útgerð til 53.000 føroyingar hevur neyvan stóran fíggjarligan týdning fyri hvørki Kina ella USA, sum eru ávikavist heimsins næststørsti og størsti búskapur. At sannføra heimin, um hvør framleiðir bestu og tryggastu tøknina, hevur hinvegin stóran týdning.

Og at tann tøknin kann brúkast á nýggjasta stríðspallinum hjá fleiri londum – Arktis - hevur enn størri týdning.

TÍÐARLINJA

# HUAWEI MÁLIÐ

## 2018

**Februar** – Í USA ávarar FBI móti yvirhøvur at keypa Huawei telefonir.

**Mai** – Pentagon bannar sølu av Huawei og ZTE á øllum amerikanskum hernaðarstøðum.

**Juli** – Av trygdarávum boðar Avstralia frá, at Huawei ikki skal veita útgerð til 5G netið.

**Oktober** – Føroya Tele almannakunnger samstarvið við Huawei um 5G.

**Desember** – BT, bretski telerisin, pilkar Huawei útgerð úr 4G netinum og fer ikki at loyva Huawei útgerð í kjarnuni av 5G netinum. Harafturat boðar Japan frá, at tey fara at gevast at keypa Huawei og ZTE útgerð.

## 2019

**11. januar** – Í Póllandi verður eitt starvsfólk í Huawei handtikið fyri at hava njósnað.

**17. januar** – Fólkatingsspurningur settur danska verjumálaráðharran um 5G tøkni, trygd og Føroyar.

**6 - 21. februar** – Í fyrstu atløgu heitir amerikanska uttanríkisráðið á evropeisk lond um ikki at nýta Huawei útgerð í 5G netinum, og síðani sigur uttanríkisráðharrin, Mike Pompeo, at lond, sum nýta Huawei útgerð, eru ein trygdarváði fyri USA.

**Mars** – Huawei saksøkir USA fyri at banna útgerðini, samstundis sum USA heldur áfram at mæla londum – eitt nú Týsklandi, sum mutar í móti amerikanska trýstinum, frá at nýta Huawei útgerð. Í Stórabretlandi staðfestir ein eftirlitsstovnur, at Huawei útgerðin kann seta trygdina í vanda. Kortini mælir stovnurin ikki til beinleiðis bann av Huawei.

**18. mars** – TDC boðar frá, at Ericsson, ikki Huawei, skal veita 5G til Danmark.

**Apríl** – USA linkar trýstið á Týskland um at sleppa Huawei. CIA vísir á, at Huawei er fíggjað av statsliga trygdarstovninum í Kina, og Vodafone í Onglandi sigur seg hava funnið trygdarhol – sokallaðar bakdyr – í Huawei útgerð.

**Mai** – 32 lond, harímillum Danmark, hittast í Prag at áseta trygdarkrøv til 5G netið. Samskiftistøknin verður umrødd sum ein partur av samfelagstýðandi undirstøðukervinum, sum ikki skal vera bundin av óálítandi triðjapørtum. Donald Trump, forseti, setur bann móti Huawei við eini fráboðan um trygdina hjá tjóðini, ið eitt nú førir við sær, at Google gevst at dagføra android stýrisskipanina á Huawei telefonum. Vegna kanningar av trygdini hjá Huawei eru 5G seinkingar fráboðaðar í Stórabretlandi. Huawei svarar aftur, at amerikanska bannið fer at fáa stórar avleiðingar fyri amerikanska arbeiðsmegi og feløg.

**Várið** – Føroya Tele vinnur útboð at veita samskiftistænastu til føroysku løgregluna við Huawei sum undirveitara.

**6. juni** – Føroya Tele boðar frá, at 5G netið er væl áleiðis og hevur longu royndarkort netið.

**5. november** – 'Kina kommer' ráðstevna í Keypmannahavn. Serfrøðingapanel svarar spurningi viðv. Huawei & 5G í Føroyum og mælir Føroyum frá Huawei loysnini.

**6. november** – Føroyskir miðlar taka málið um Huawei og 5G í Føroyum upp, og leggja dent á javnvágina millum handils- og trygdarpolitikk.

**9. november** – Í kronikki í Berlingske eggjar Carla Sands Føroyum til at sleppa Huawei.

**9. november** – Sendistova Kina í Danmark biður um fund við Føroya landsstýri.

**11. november** – Umboð frá Kina hitta landsstýrið í Føroyum.

**15. november** – Kringvarpið bandar samrøðuna millum vinnumálaráðharran og aðalstjóra hansara av óvart.

**28. november** – Carla Sands hevur kronikk í Sosialinum um, at Føroyar skulu sleppa Huawei.

**2. desember** – Kringvarpið fær fútbann móti at spæla upptøkuna av samrøðuni millum vinnumálaráðharran og aðalstjóran.

**3. desember** – Dulnevnd kelda kann ikki vísa aftur, at innihaldið á fundinum millum Kina og Føroyar var viðv. Huawei og handilsavtalu.

**10. desember** – Málið fær stóra umrøðu í donskum miðlum.

**11. desember** – Sendimaður Kina vísir aftur, at hann skal hava hótt Føroya landsstýri.

**12. desember** – Upptøkan av samrøðuni verður almannakunngjørd í DK og váttar, at innihaldið var viðv. Huawei og handilsavtalu.

**16. desember** – Huawei vísir ákærum aftur um njósnan og samstarv við kinesisku stjórnina.

**17. desember** – Carla Sands dementerar úttalilsini hjá Huawei.

**17. desember** – NY Times kemur til Føroya at kanna málið.

**19. desember** – Grønland velur Ericsson sum 5G veitara.

**20. desember** – NY Times gevur út stóra grein um Huawei-málið í Føroyum.

## 2020

**Januar** – ES loyvir nýtslu av Huawei útgerð í 5G netinum men ávarar ímóti at loyva Huawei framat kjarnunetinum.

**Februar** – Huawei letur upp íverksetarastovu í London fyri at fáa evropeiska undirtøku fyri 5G loysnini. Samstundis setir USA eitt meira umfatandi bann í verk móti samstarvi, sølu og keypi millum amerikanskar fyritøkur og Huawei.

**6. mars** – Notits til FTs Europaudvalg viðv. 'EU kommissionens 5G meddelelse'.

**29. mars** – Fútabannið móti upptøkuni við vinnumálaráðharranum og aðalstjóranum verður slept, og ljóðbrotið alment.

**13. mai** – Avdúkingar um, at Kina í fleiri ár hevur skrivað beinleiðis til danskar stjórnarleiðarar um at velja Huawei.

**13. mai** – Mette Frederiksen sigur, at komandi screeningslóggávan útihýsir Kina frá týðandi undirstøðukervi.

**13. mai** – Føroya løgmaður staðfestir, at fjarskifti í framtíðini verður ein 'inngrógvin partur av trygdarpolitikki'.

**Mai** – Huawei verður svartlistað í USA, og Ríkispolitiið kann ikki góðtaka Huawei sum undirveitara hjá Føroya Tele til nýggju samskiftistænastuna. FT fær nýtt samstarv við Ericsson sum undirveitara til løgregluna.

**8. juni** – Trine Bramsen, verjumálaráðharri: 5G útgerð frá ikki-allieraðum londum verður ikki góðtikin.

**10. juni** – NATO aðalskrivarin stuðlar Stórabretlandi í at vera varin við 5G útgerð frá Huawei.

**14. juli** – Stórabretland bannar Huawei frá 5G netinum.

**18. september** – Danski verjumálaráðharrin og løgmálaráðharrin luttaka í opnum samráði við Føroyanevndina, har teir skulu greiða frá, hvørt fjarsamskiftismál verða sædd sum trygdar- og verjumál.

**18. september** – Dátuleki avdúkar, at Kina heldur eyga við grønlendingum, sum hava við flogvallarvirksemi at gera, og føroyingum, sum hava við KT at gera.

**Oktober** – Stórabretland sigur seg hava funnið greiðar ábendingar um samstarv millum kinesisku stjórnina og Huawei og ger avtalu við Ericsson. Svøríki útihýsir Huawei frá 5G netinum.

**Desember** – Samskiftistænastan, sum Føroya Tele hevur ment til løgregluna við Ericsson sum undirveitara, verður tikin í nýtslu.

## 2021

**Apríl** – Amerikanska sendistovan hevur verið í sambandi við fleiri danskar stovnar fyri at hoyra, um hesir brúka kinesiska útgerð. Hetta var ein ávaring um, at mann í játtandi føri endar samstarvið.

**3. mai** – Í Degi og Viku verður víst á, at føroyingar framvegis kunnu fara út til uppsettu mastrarnar og fáa 5G net. Jan Ziskasen sendi skrivligt svar til sendingina og segði, at eingin endalig avgerð um 5G veitaran var tikin.

**19. august** - Tá saman um kemur ger Føroya tele avtalu við Ericsson. Leiðslan undirstrikar, at tey ikki høvdu verið kroyst at frávelja Huawei, men at óvissurnar í sambandi við málið hevði gjørt tilgongdina nógv drúgvari, og at avgerðin bert er handilslig.

# FYLGISKJØL

## Viðkomandi uttanríkispolitisk organ

Í hesum parti verða nøkur av politisku organunum, ið hava týdning fyri uttanríkispolitisk viðurskifti, viðgjørd.

### NORDEFCO

Samstarvið á verjuøkinum millum Danmark, Finnland, Ísland, Noreg og Svøríki fer í høvuðsheitum fram í NORDEFCO (Nordic Defense Cooperation). NORDEFCO varð stovnað í 2009, og yvirhøvur er samstarvið á verjuøkinum millum Norðurlond styrkt nakað seinastu árini. Serliga russiska annekteringin av Krim-hálvoynni í 2014 hevði við sær, at samstarvið um venjingar, útbúgvingar og hernaðarútgerð er vaksið. Samanumtikið er verjan av norðurlendsku londunum styrkt sum avleiðing av hesum samstarvinum, tó at samstarvið ikki er líka skipað og sterkt sum í NATO-høpi.[153 & 154]

### AMBOÐ Í NORDEFCO-SAMSTARVINUM:

**“Easy Access” avtalan:** Í grundini ein tilbúgvingarætlan, sum gevur londunum lættari atgongd til sjó, -luft- og landøki hjá hvørjum øðrum. Avtalan merkir, at t.d. svenskar herdeildir uttan stórvegis hóvasták kunnu flyta seg inn yvir markið til Finnlands, skuldi tað hent, at Russland leyp á.

**Avtala í 2017, um at styrkja norðurlendska samstarvið um deiling av radaraupplýsingum landanna millum**, ger, at Norðurlond hava eitt betri sokallað “situatiónsbílæt” av økinum sum heild og skjótari kunnu býta upplýsingar sínámillum. Slíkt vitanarbýti verður mett týdningarmikið í einum samanhangi, har vit í vaksandi mun síggja russisk flogfør, skip og kavbátar koma inn í norðurlendsk øki. Afturat hesum er samstarvið um felags hernaðarútgerð styrkt seinnu árini.

### DET UDENRIGSPOLITISKE NÆVN (UPN):

UPN er einasta fólkatingsnevnd, ið er heimilað í grundlógini. Grundlógin ásetur, at fólkatingið skal seta eina uttanríkispolitisika nevnd, sum stjórnin skal ráðføra seg við áðrenn størri uttanríkispolitiskar avgerðir verða tiknar. Harafturat skal stjórnin saman við nevndini kunna um og viðgera øll viðurskifti, ið hava týdning fyri danskan uttanríkispolitikk. Samanborið við Uttanlandsnevndina í løgtinginum eru strangari treytir settar donsku stjórnini í mun til ráðførslu við UPN. Stjórnin skal í nógv størri mun inndraga UPN, enn føroyska landsstýrið skal inndraga Uttanlandsnevndina. Umframt at ráðgeva stjórnini er arbeiðið hjá UPN rættiliga breitt og fevnir millum annað um viðgerð av uttanríkis-, verju- og trygdarpolitikki.

Nevndin er øðrvísi enn aðrar fólkatingsnevndir (sum verða róptar “udvalg” og ikki “nævn”), tí tað er álagt stjórnini strangari treytir viðvíkjandi ráðførslu, umframt at er forboðið at endurgeva frá fundum í UPN. Av tí sama eru strangari krøv sett til fundirnar í mun til vandan fyri avlurting. Eitt nú hava limir í nevndini ikki loyvi at hava telefon ella teldu við sær til fundir, og vanliga verða fundirnir hildnir í hølum uttan tekniska útgerð, sum møguliga kann brúkast til avlurting.

*Lógarverkið rundan um UPN:*

Grundlógin, § 19, stk. 3: *“Folketinget vælger af sin midte et udenrigspolitisk nævn, med hvilket regeringen rådfører sig forud for enhver beslutning af større udenrigspolitisk rækkevidde. Nærmere regler om det udenrigspolitiske nævn fastsættes ved lov.”*

Nævnsloven § 2: *“Forud for enhver beslutning af større udenrigspolitisk rækkevidde rådfører regeringen sig med nævnet, der iøvrigt har til opgave med regeringen at drøfte sager af betydning for landets udenrigspolitik og at modtage oplysninger fra regeringen om udenrigspolitiske forhold.”*

[153] https://fmn.dk/da/arbejdsomraader/internationalt-samarbejde/nordefco/ https://www.nordefco.org/the-basics-about-nordefco

[154] Sum heild eru tað serliga borgarligu flokkarnir í Norðurlondum, sum ynskja at styrkja verjusamstarvið enn meira. Áhugin fyri at menna sambandið við baltisku londini er eisini stórur, og summi meta og vóna, at NORDEFCO kanska eisini er mátin at óbeinleiðis knýta Svøríki og Finnland upp í NATO-samstarvið, uttan at tað tulkast sum ein stór provokatión mótvegis Russlandi.

**UTTANLANDSNEVNDIN:**

Løgtingsmál, ið umfata uttanríkis-, handils-, trygdar- og verjupolitikk, umframt viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, verða viðgjørd í Uttanlandsnevndini. Uttanlandsnevndin hevur eisini ein ráðgevandi leiklut í mun til landsstýrið. Í Stýrisskipanarlógini er staðfest, at landsstýrið skal ráðføra seg við Uttanlandsnevndina, áðrenn avgerðir, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning, verða tiknar.

Seinast leikluturin hjá Uttanlandsnevndini var til viðgerðar í miðlunum var, tá amerikanska sendikvinnan Carla Sands vitjaði í Føroyum, og tá verandi amerikanski uttanríkismálaráðharrin, Mike Pompeo, vitjaði í Danmark á sumri 2020 og hitti uttanríkisráðharrarnar úr Føroyum, Grønlandi og Danmark. Limir úr Uttanlandsnevndini eftirspurdu kunning og ráðførslu frá landsstýrismanninum áðrenn fundin, men aðrir limir – herundir formaðurin í nevndini – mettu tað ikki vera neyðugt, tí talan var um eina "bagatell" (útvarpstíðindi í KVF kl. 12:20, 21-07-2020).

Í samrøðu við Bjørn á Heygum, advokat, ið var ein av teimum, ið skrivaðu Stýrisskipanarlógina, hevur landsstýrið ikki skyldu til at koma í samráð við Uttanlandsnevndina í hesum førinum. Landsstýrið hevur einans skyldu til at kunna og ráðføra nevndina, um talan er um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, ella um ein størri uttanríkispolitiskt avgerð skal takast (útvarpstíðindi á KVF 07-07-2020).

Eitt annað dømi, um at ivamál hava verið um upplýsingarskylduna hjá landsstýrinum mótvegis Uttanlandsnevndini, er í málinum um ein komandi radara á Sornfelli. Í hesum føri er talan um fundir og samráðingar millum føroyskar og danskar myndugleikar – landsstýrismannin í uttanríkismálum og danska verjumálaráðharran – sum ikki vóru viðgjørd í Uttanlandsnevndini, hóast danski verjumálaráðharrin segði seg vera sinnaðan at kunna nevndina, um landsstýrismaðurin vildi tað. Andstøðulimir í nevndini, herundir Aksel V. Johannesen, vóru ónøgdir við, at landsstýrismaðurin ikki hevði kunnað nevndina um málið.

***Lógarverkið rundan um Uttanlandsnevndina:***

Stýrisskipanarlógin § 54: *"Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.*

*Stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum."*

**NORÐURLENDSKA SAMSTARVIÐ:**

Norðurlandaráðið og Norðurlendska Ráðharraráðið verða undir einum nevnd tað norðurlendska samstarvið. Hetta samstarvið fevnir um Danmark, Noreg, Svøríki, Ísland, Finnland, Grønland, Áland og Føroyar. Norðurlond hava søguliga verið tætt knýtt og deila tískil nógv virðir og hava nógvar líkheitir. Hetta ger tað møguligt at samstarva um fleiri viðurskifti.

Kjarnan í norðurlendska samstarvinum er at betra um flytføri og beina burtur markaforðingar millum londini. Tað skal vera lætt at ferðast, arbeiða og lesa tvørtur um norðurlendsku landamørkini. Dømi um hetta er sokallaða "passuniónin", ið ger tað møguligt at ferðast millum Norðurlond uttan at vísa fram pass.

Norðurlendska samstarvið er býtt í tvey: Norðurlandaráðið, sum er samstarvið millum tingfólk, og Norðurlendska ráðharraráðið, sum er samstarvið millum ráðharrar.

Í Norðurlandaráðnum hittast tingfólk úr teimum norðurlendsku londunum at viðgera tilmæli, sum hava við norðurlendska samstarvið at gera. Tilmælini kunnu antin vera ætlað ráðharraráðnum ella parlamentunum í teimum átta londunum. Kortini hevur Norðurlandaráðið ikki heimild at áleggja ráðharraráðnum ella parlamentunum at taka tilmælini til sín. Tí má Norðurlandaráðið sigast at hava lítla beinleiðis ávirkan á lóggávur í Norðurlondum.

Hóast beinleiðis valdið kann sigast at vera avmarkað, so hevur Norðurlandaráðið stóran súmbolskan týdning, serliga innan fyri mentan. Norðurlandaráðið handar á hvørjum ári tær fimm mentanar- og umhvørvisvirðislønirnar. Harafturat skal sigast, at hóast ráðharraráðið ikki hevur skyldu til at

bera tilmælini frá Norðurlandaráðnum víðari, vera tilmælini í øllum førum lutvíst tikin til eftirtektar.

Norðurlendska ráðharraráðið er almenna samstarvið millum norðurlendsku stjórnirnar. Ráðharrar innan tey ymisku málsøkini hittast javnan at umrøða evni, ið viðkoma borgarum í Norðurlondum, og hvussu londini saman kunnu finna felags loysnir til felags avbjóðingar.

Grundarlagið undir norðurlendska samstarvinum er "Helsingfors"-sáttmálin. Hesin sáttmálin staðfestir, at limir í samstarvinum eru norðurlendsku londini, ið eru Danmark, Noreg, Svøríki, Ísland og Finnland og tey sokallaðu sjálvstýrandi økini, sum eru Føroyar, Grønland og Áland. Føroyar er sostatt ikki limur á jøvnum føti við hini londini, og hetta kemur eitt nú til sjóndar við, at Føroyar ikki hava sjálvstøðuga umboðan í Norðurlandaráðnum, men fáa tillutað tvey pláss av teimum 20, ið Danmark hevur fingið tillutað.

Føroyar hava í fleiri umførum søkt um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum, fyrstu ferð í 1980 og seinast í 2017.

### ÚTNORÐURRÁÐIÐ:

Útnorðurráðið er almenna samstarvið millum tingfólk úr útnorði; tað vil siga Føroyum, Íslandi og Grønlandi. Limirnir í Útnorðurráðnum hittast tvær ferðir um árið at umrøða evni, ið hava serligan týdning fyri londini í útnorði. Seks tingfólk úr hvørjum landi eru í Útnorðurráðnum.

Útnorðurráðið samtykkir tilmæli til parlamentini, men hevur hevur einki beinleiðis vald. Hetta merkir, at limalondini avgera, um tey ynskja at fylgja tilmælunum. Útnorðurráðið fæst serliga við fiskivinnu, havøki og burðardygd, men eisini við mál sum mentan, útbúgving og javnstøðu.

### ARKTISKA RÁÐIÐ:

Arktiska ráðið er millumtjóðasamstarvið millum tey átta arktisku londini, USA, Kanada, Russland, Noreg, Ísland, Svøríki, Finnland og Kongaríkið Danmark (herundir Grønland og Føroyar). Harafturat hava seks felagsskapir fyri upprunafólk í Arktis fasta luttakarastøðu, og fleiri onnur lond, millumtjóðasamstørv og felagsskapir hava eygleiðarastøðu í ráðnum.

Arbeiðsøkini hjá Arktiska ráðnum eru í høvuðsheitum umhvørvismál, burðardygg menning og tilbúgvingarsamstarv. Ráðið arbeiðir ikki við tilfeingisumsiting ella trygdar- og verjupolitikki. Sum heild er Arktiska ráðið merkt av konstruktivum tóna og samstarvi, hóast gjógvin millum vesturheimin og Russland tykist vaksa.

Hóast Arktiska ráðið varð stovnað í 1996, hava ávís arktisk lond hitst uttan fyri karmarnar í ráðnum at umrøða arktisk mál. Hesi londini – USA, Kanada, Russland, Noreg og Kongaríkið Danmark – verða tí ofta rópt "Arctic 5". Hesi hava eitt nú undirskrivað serligan sáttmála um havøki, umhvørvisvernd og tilbúgvingarsamstarv. Hesi londini hava alment hitst tvær ferðir – í 2008 og í 2010.

### STANDING COMMITTEE OF PARLAMENTARIANS IN THE ARCTIC REGION (SCPAR):

SCPAR er eitt parlamentariskt samstarv millum arktisku londini og ES, har hvørt parlament hevur eitt umboð (ES parlamentið hevur eisini eitt umboð). Tað er fólkatingið, sum vegna ríkisfelagsskapin hevur eitt umboð í SCPAR. Hetta umboðið fellur oftast til norðuratlantisku limirnar í fólkatinginum.

Endamálið við SCPAR er at stuðla upprundir arbeiðið í Arktiska ráðnum og at samstarva tvørtur um parlament um tey mál, ið Arktiska ráðið arbeiðir við. Hetta umfatar eitt nú shipping, útbúgving og gransking, burðardygd og veðurlagsbroytingar. SCPAR hevur tískil tætt samstarv við Arktiska ráðið og hevur fastan eygleiðararætt í ráðnum.

### ES Í ARKTIS:

Í tráð við at áhugin fyri Arktis er vaksin nógv seinastu árini, er áhugin hjá ES at gerast virkin viðspælari í Arktis vaksin tilsvarandi. Tríggir av teimum átta arktisku statunum eru limir í ES (Danmark, Svøríki og Finnland), og tveir eru limir í evropiska fríhandilssamstarvinum, EFTA (Ísland og Noreg). ES hevur í fleiri ár roynt at gerast eygleiðari í Arktiska ráðn um, men undirtøka hevur ikki verið fyri hesum. Fyri at gerast limur í Arktiska ráðnum krevst, at øll átta limalondini taka undir við tí. Hesum eru tey trý ikki-evropisku londini – serliga Russland – ímóti.

Keldur:
https://www.norden.org/
https://www.vestnordisk.is/
https://arctic-council.org/
https://www.ft.dk/da/udvalg/udvalgene/upn
https://www.retsinformation.dk/eli/lta/1954/54
http://www.arcticparl.org/
http://kvf.fo/netvarp/uv/2020/07/21/landsstrismaurin-ikki-rfrt-seg-undan-fundi

# FYLGISKJØL

## UM RÍKISRÆTTARLIGU STØÐU FØROYA

## Fámjinsskjalið, Altjóðarættur og sjálvsavgerðarrættur Føroya

### POLITISK SJÓNARMIÐ

Tá ið fullveldislandsstýrið fór undir at fyrireika arbeiðið at skipa Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð varð somuleiðis hugt at, hvørja altjóðarættarliga støðu Føroyar høvdu og skuldu hava. Arbeiðið við at skipa Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð førdi við sær Hvítu Bók, sum royndi at lýsa hesi hugtøkini í mun til støðu Føroya. Her verður dentur lagdur á, at sambært ST ásetingunum kunnu Føroyar lýsast sum ein serstøk tjóð og eitt serstakt fólk – serliga tí at Føroyar høvdu egna mentan og mál; lógu landafrøðiliga avsíðis frá Danmark, umframt at Føroyar hava havt serstøðu í mun til bæði Noreg og Danmark politiskt og fyrisitingarliga.[155] Ført varð síðani fram, at fráboðanin frá Danmark eftir 2. veraldarbardaga og sjálv heimastýrislógin kunnu skiljast sum donsk viðurkenning av Føroyum sum serstøk tjóð. Um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark lúka hesar treytirnar, áleggur tað Danmark at fráboða ST um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri sjálvsavgerðarrætt Føroya.[156]

Tá ið føroysk fólkatingsumboð hava spurt donsku stjórnina um sjálvsavgerðarrætt, hevur stjórnin gjørt greitt, at hon virðir føroyska rættin at gerast sjálvstøðugt land, men stundum eisini sagt, at tað skal gerast eftir § 19 í grundlógini. Sum nevnt í pørtunum omanfyri sigur ásetingin nevniliga, at avgerðir, sum millum annað minka um Danmarkar ríki, kunnu einans takast í fólkatinginum. Tí kunnu vit siga, at Danmark ikki fer at seta seg ímóti einum føroyskum ynski um loysing, men kortini skal endaliga avgerðin formliga staðfestast í fólkatinginum. Á tann hátt kann sigast, at Føroyar í praksis kunnu taka avgerðina um at skipa síni egnu viðurskifti, men formliga skal endaliga avgerðin takast í fólkatinginum.

### STRÍÐSKNÚTAR MILLUM FØROYAR OG DANMARK

Tá ið vit hugsa um ríkisrættarligu støðun Føroya, eru fleiri afturvendandi stríðsknútar, sum vísa grásonurnar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Í hesum brotinum verður greitt frá søgu Føroya í mun til, hvussu Føroyar hava verið, og framvegis eru, partur av heimssamfelagnum, og trygdarpolitisku fyrilitunum, sum har til hoyra. Søgan fortelur, hvussu Føroyar gjørdust partur av Danska Kongaríkinum, og hvussu Føroyar síðani hava vunnið størri heimildir, og framvegis arbeiða móti fleiri heimildum, umframt at varðveita tær vunnu.

Viðurskiftini Føroyar og Danmark ímillum hava altíð verið fyri støðugum broytingum, sum endurspegla skiftandi rák og ymsu sjónarmiðini, sum føroyingar hava um ríkisfelagsskapin. Summi eru fegin um hann, onnur ynskja broytingar, uppaftur onnur vilja taka seg úr felagsskapinum, og summi meta, at føroyingar av órøttum eru koyrdir í ríkisfelagsskapin og tískil ongantíð skuldu verið í honum.

Í stuttum vita vit, at Føroyar vóru undir Noregi um fyrsta túsundárið, og tá ið Noreg fór undir danskan kong í 1380, fylgdu Føroyar við. Síðani vórðu støðugt fleiri myndugleikar – sum bispadømið og einahandilin – flutt úr Noregi til Danmarkar. Í 1814 fór Noreg undir svenskan kong, meðan Føroyar – saman við Íslandi og Grønlandi – vórðu verandi undir Danmark, og danska valdið gjørdist sjónligari í Føroyum. Tað mest týðiliga dømið var, at løgtingið varð avtikið, soleiðis at Føroyar í roynd og veru gjørdust eitt danskt amt, og valdið í Føroyum fór upp í hendurnar á donskum embætismonnum.

[155] Hvítabók. (1999), s. 103

[156] Hvítabók. (1999)

Napoleon, sum undir Napoleonskrígnum hevði lagt fleiri lond undir seg, fellur í 1815 og skumpar undir eitt tjóðskaparligt mótrák, har fleiri evropeisk lond gerast upptikin av egnari mentan, søgu og máli. Føroyar eru einki undantak, og fólk leita til kvæði og sagnir (1820unum), sum eisini stimbrar og mennir føroyska skriftmálið. Kortini koma Føroyar koma undir donsku krúnuna í 1814. Lógarsmíðið fylgdi tó ikki við fyrr enn seinni.

Sambært A. S. Ørsted, løgfrøðingi, kunnu Føroyar tískil ikki sigast at vera veruliga limaðar í ríkisfelagsskapin fyrr enn danska grundlógin varð sett í gildi fyri Føroyar í 1850 - hetta uttan at føroyska fólkið varð spurt eftir. Løgtingið verður endurstovnað árini eftir sum eitt ráðgevandi amtsráð.

Í 1860unum verða skúlar settir á stovn í Føroyum, og í samfelagnum birtist kjak um, hvørt føroyska málið og mentanin ikki eigur at fáa betri kor. Hetta er allarhelst nakað, sum kyndir upp undir føroysku tjóðskaparkensluna, og fyrst í 20. øld verða fyrstu politisku flokkarnir í Føroyum stovnaðir. Í 1918 fáa føroysku flokkarnir fyrstu ferð meiriluta á løgtingi, og í 1923 verða amtmaðurin og prósturin varpaðir úr løgtingsskipanini, umframt at tað verður ásett, at tingið sjálvt velur formann.

Undir 2. veraldarbardaga verða Føroyar hersettar av bretum og avskornar frá Danmark. Eftir kríggið er lítil áhugi fyri at venda aftur til støðuna sum danskt amt, og tað kemur til skarpskeringar við eini fólkaatkvøðu um loysing í 1946. Fólkaatkvøðan verður tó ógildað, og eftir drúgvar samráðingar fáa Føroyar eina heimastýrislóg í 1948 og lóggávuvald á ávísum økjum.

Afturat heimastýrislógini hava Føroyar fingið eina stýrisskipanarlóg í 1995, í 2005 ta uttanríkispolitisku heimildarlógina, yvirtøkulógina og Fámjinsskjalið, og løgtingslógina um ræði á málum og málsøkjum í 2006. Lógirnar áseta, hvussu Føroyar stjórna sær sjálvum, hvørji mál eru yvirtikin, og hvørji kunnu yvirtakast frá Danmark, hvør mannagongdin er fyri at yvirtaka hesi, umframt hvørjar altjóða avtalur Føroyar kunnu gera, og hvussu Føroyar kunnu gerast limur í altjóða felagsskapum.

Hesin partur byggir í høvuðsheitum á fylgjandi keldur:

Debes, Hans Jacob. (2000) Føroya Søga 3 – Frá kongligum einahandli til embætisveldi Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Debes, Hans Jacob (2001) Færingernes land. København: Multivers.

https://www.lms.fo/fo/kunning/sogusavnid/

Johansen, Sámal T.F., Thorsteinsson, Jákup. (1999) Føroyar í Kalda Krígnum.

## HEIMILDIR FØROYA

Føroyar hava so líðandi fingið fleiri heimildir fyri, hvørji málsøki kunnu yvirtakast, og hvørjar avtalur Føroyar kunnu gera við onnur lond. Umframt at geva fleiri heimildir skulu lógirnar eisini staðfesta, hvar markið gongur fyri heimildirnar – altso skulu tær bæði siga, hvat Føroyar kunnu og ikki kunnu. Í tí førinum er ikki altíð semja millum Føroyar og Danmark um, hvussu lógirnar skulu skiljast, og hvussu verður farið fram í praksis. Stundum metir Danmark, at Føroyar eru farnar út um heimildirnar, meðan Føroyar meta seg vera innan fyri heimildirnar – til dømis tá ið tað kemur til at gera altjóða avtalur.

Niðanfyri lýsa vit stutt tær skipanir og lógir, sum geva Føroyum ávísar heimildir, og at enda vísa vit á, hvussu tulkingarspurningarnir um ymsu heimildirnar kunnu vera ymiskar ella enntá standa í andsøgn við hvørja aðra.

## GRUNDLÓGIN

Danska grundlógin frá 1849 (broytt í 1953) er galdandi fyri Danmark, Føroyar og Grønland, og hevur fólkaatkvøða verið um hana í Føroyum í trimum umførum – 1920, 1939 og 1953. Á tann hátt er grundlógin bulurin undir rættarsamfelagnum og teimum rættindum, sum allir borgarar í ríkisfelagsskapinum hava.[157]

Tað er somuleiðis grundlógin, sum lýsir statin sum eina eind, og tað er oftani í mun til tær grundlógarásetingarnar, at ósemja er um, hvørt ávísar heimildir koma í stríð við grundlógina.

## HEIMASTÝRISLÓGIN

Eftir fólkaatkvøðuna um loysing í 1946 vóru drúgvar samráðingar við donsku stjórnina, sum endaðu við heimastýrislógini í 1948. Lógin viðurkendi Føroyar sum ein sjálvstýrandi part av danska kongaríkinum og flokkaði málsøkini, sum Føroyar kundu og ikki kundu átaka sær sjálvræði av, á ein A og B lista. Í sama andadrátti, sum heimastýrislógin varð sett í gildi, tóku Føroyar ræði á 16 yvirskipaðum málsøkjum.

Heimastýrislógin er samtykt bæði í Føroyum og Danmark, men tað margháttliga var, at lógin møguliga lat meira vald frá Danmark til Føroyar, enn grundlógin loyvdi. Tískil eru

[157] Festirstein, N. (2019) Løgbiti 1: Stjórnarrættarliga støða Føroya

## ÓVANLIGAR HEIMILDIR

Í kunningarritið av Løgmansskrivstovuni verður víst til dr. Jur. Poul Meyer og Edward Mitens, landsrættarsakførara. Meðan Meyer meira lagaliga førdi fram, at Heimastýrislógin 'bert' er ein víðfevnd heimiling av lóggávuvaldi og fyrisitingarvaldi frá Danmark, vildi Mitens vera við, at Heimastýrislógin beinleiðis staðfestir tann lóggevandi og fyrisitingarliga myndugleikan sum verandi hjá heimastýrinum – tað vil siga, at ognartøka og skattaútskriving bara kann fara fram sambært løgtingslóg, hóast grundlógin annars ásetur, at hetta bert kann fara fram sambært lóg. Úr tí sjónarhorninum verður lóggávan, sum heimastýrið útskrivar, sostatt eisini lóg í 'grundlógarinnar merking'.

Viðurkendi professarin í løgfrøði, Alf Ross, hevur eisini mett Heimastýrislógina sum eina óvanliga víðfevnda heimiling av lóggevandi valdinum.

Kelda:
Festirstein, N. 2019: 4-5

eisini ivamál um, hvat fyri slag av stýrisskipanarlóg Heimastýrislógin í veruleikanum er.

Undir 2. veraldarbardaga var sambandið millum Danmark og Føroyar ikki tað sama, men føroyska samfelagið skuldi kortini rekast. Frá 1940 høvdu løgtingið og amtmaðurin sostatt alt lóggávuvaldið í Føroyum, ið grundlógin annars ikki loyvdi.

Árini undir krígnum kunnu sigast at hava ført við sær eina heilt øðrvísi stýrisskipanarliga siðvenju enn ta, sum Føroyar høvdu áðrenn kríggið. Í einum brævi, frá danska forsætismálaráðharranum til amtmannin eftir kríggið, takkar stjórnin løgtinginum og amtmanninum fyri at hava umsitið Føroyar væl og leggur upp til, at tey fyribils halda fram. Sostatt kann henda óvanliga rættarsiðvenjan sigast at vera viðurkend av donsku stjórnini. Tí vóru tað eisini løgtingið og amtmaðurin, sum skrivaðu út Heimastýrislógina í 1948, og í grundini var lógin snikkað soleiðis, at tað var valdið í Føroyum, sum legði felagsmálsøki til danskar myndugleikar at lóggeva og fyrisita, heldur enn øvut. "Rættast er tí helst at skilja Heimastýrislógina sum eina lóg, sum hvílir á rættarsiðvenju, og at henda rættarsiðvenja heldur fram óbroytt og saman við grundlógini frá 1953." [158]

### STÝRISSKIPANARLÓGIN

Meðan Heimastýrislógin ásetir, hvørji málsøki liggja í Føroyum, og hvørji málsøki eru felagsmál, so býtir stýrisskipanarlógin frá 1994 valdið sundur í Føroyum – tað kenda tríbýtið av valdinum er ásett her. Hon sigur í stuttum, at lóggávuvaldið liggur hjá løgtingi og løgmanni, tað útinnandi valdið hjá landsstýrinum, og at tað dømandi valdið liggur hjá dómstólunum. Harafturat ásetir lógin, hvørjar heimildir teir tríggir valdspartarnir hava og mannagongdirnar fyri, hvussu tey kunnu stýra – ein stýrisskipan.[159]

## YVIRTØKURNAR KOMNAR Í FASTA LEGU... OG TÓ

Skiftandi løgting og landsstýri hava sett sær sum mál at yvirtaka loftrúmið. Yvirtøkulógin nevnir ikki hetta málsøkið sum eitt, ið ikki kann yvirtakast.

Hóast hetta hevur arbeiðið drigið út, tí metingar úr Danmark, umframt eitt álit um yvirtøkuna frá 2013, siga tað vera neyðugt, at Føroyar fyrst og fremst fáa neyðugu førleikarnar upp á pláss, soleiðis at altjóða trygdarkrøv verða hildin, og alt økið kann yvirtakast í einum.

Fyri kortum yvirtóku Føroyar tó umsitingarliga partin av útlendingaøkinum uttan at yvirtaka kærumyndugleikan – tá var gjørligt at stigvíst yvirtaka ábyrgdina av einum málsøki.

Kelda:
Beskrivelse af luftfartsområdet i relation til Færøerne (2013)
https://www.logting.fo/mal/mal/?id=80

[158] Festirstein, N. (2019) Løgbiti 1: Stjórnarrættarliga støða Føroya, s. 5

[159] Festirstein, N. (2019) Løgbiti 1: Stjórnarrættarliga støða Føroya, s. 5

## YVIRTØKULÓGIN

Hóast Heimastýrislógin gav Føroyum víðari heimildir og staðfesti eina nýggja rættarsiðvenju, var hon rættiliga kontroversiell í Føroyum. Tvey ár áðrenn høvdu Føroyar í veruleikanum atkvøtt fyri loysing frá Danmark men endaðu kortini við eini skipan, ið – hóast hon tryggjaði Føroyum størri sjálvræði – samstundis staðfesti, at Føroyar nú vóru í ríkisfelagsskapi við Danmark. Heimastýrislógin varð skrivað á bæði føroyskum og donskum, men ávísar orðingar á teimum báðum málunum førdu við sær, at Heimastýrislógin kundi tulkast ymiskt, alt eftir hvørjum á máli hon varð lisin, og hvør týdningur varð lagdur í orðingarnar. Høvuðsósemjan komst av, at føroyski teksturin kundi skiljast soleiðis, at Føroyar vóru ein sjálvstýrandi 'tjóð', meðan danska orðingin lýsti Føroyar sum eitt 'folkesamfund' – ikki eina tjóð – við ávísum sjálvræði undir donsku grundlógini. Ósemjur um, hvat orðingarnar í Heimastýrislógini hava av týdningi fyri ríkisrættarstøðu Føroya kunnu framvegis koma til sjóndar í almenna kjakinum, og grundleggjandi setir tað spurnartekin við valdsbýtið millum Føroyar og Danmark, um tulkingarnar hjá einum parti viga meira enn tær hjá hinum.

### LIMASKAPIR OG AVTALUR FØROYA

Økisfelagsskapirnir fyri veiðiumsiting innan:

- NAFO (Útnyrðingspartin av Atlantshavi)
- NAMMCO (Hval og kóp í Norðuratlantshavi)
- NASCO (Laks í Norðuratlantshavi)
- NEAFC (Landnyrðingspartin av Atlantshavi)
- SPRFMO (Sunnara Kyrrahav)

Norrøna atlantssamstarvið NORA, og NPA (Northern Periphery and Arctic Programme).

Undir ST hava Føroyar atlimaskap í:

- FAO (Matvørur og landbúnaður)
- IMO (Sjóvinna)
- UNESCO (Vísind, útbúgving og mentan)
- WHO (Heimsheilsustovnurin)

Eisini hava Føroyar eitt slag av atlimaskapi í Norðurlendska ráðharraráðnum, meðan Føroyar, í felag við Grønland og Danmark, luttaka í Arktiska ráðnum sum Kongsríki Danmarkar.

Kelda
Uttanríkisráðið

Ósemjan um tulkingina av orðingunum vórðu millum annað nógv nýttar, tá ið fullveldisrørslan tók dik á seg eftir kreppuárini og bankamálið í 1990unum. Rørslan fekk so mikið stóra undirtøku á valinum í 1998, at ein fullveldissamgonga varð skipað, sum skuldi samráðast við donsku stjórnina um at skipa Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð. Fullveldissamráðingarnar miseydnaðust í 2000, men tað var greitt, at ríkisfelagsskapinum tørvaði nútímansgerð.

Yvirtøkulógin, sum varð løgd aftur at Heimastýrislógini í 2005, er eitt tekin um hetta. Hon heimilar Føroyum at yvirtaka øll mál, ið ikki beinleiðis eru undantikin í yvirtøkulógini. Meðan heimastýrisskipanin beinleiðis nevndi, hvørji mál kundu yvirtakast, nevnir yvirtøkulógin einans mál, sum ikki kunnu yvirtakast. Á tann hátt verður heimildin at yvirtaka málsøki í teoriini minni avmarkað.

Málini, sum ikki kunnu yvirtakast, eru

1. Stjórnarskipan danska ríkisins
2. Heimarætt danska ríkisins (Statsborgaraskapur)
3. Hægstarætt danska ríkisins
4. Uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkur
5. Gjaldoyra- og peningapolitikkur

## UTTANRÍKISPOLITISKA LÓGIN – "DFG"

Fáar dagar eftir løgtingssamtyktina um yvirtøkulógina varð uttanríkispolitiska lógin samtykt. Í stuttum er tað ein avtala millum Føroyar og Danmark um, hvørjar uttanríkispolitisku heimildirnar hjá Føroyum eru – hvussu kunnu Føroyar virka sum eitt land uttan stjórnarrættarliga heilt at vera eitt land, tá ið Føroyar tosar við onnur lond. Á tann hátt kann sigast, at lógin hevur til endamáls at verja 'suverenitetin' hjá Kongaríkinum – altso, at Danska Kongaríkið er ein eind – samstundis sum hon skal geva Føroyum uttanríkispolitiskar heimildir.

Víst verður til DFG skipanina, tá ið Føroyar ella Grønland skulu fáa limaskap í einum millumtjóða felagsskapi, sum viðvíkja yvirtiknum málsøkjum. Sáttmálarnir skulu tó ikki vera bindandi fyri aðrar partar av ríkisfelagsskapinum.

Tað vil siga, at Føroyar ikki kunnu vera partur av einum sáttmála, sum Danmark eisini er partur av, og Føroyar og Grønland skulu vera ein felags partur í sáttmálum, har ið bæði londini eru við. Altso kunnu Føroyar einans gera altjóðarættarligar avtalur innan yvirtikin málsøki undir heitinum 'kongeriget danmark for såvidt angår færøerne', ella 'kongeriget Danmark for såvidt angår Færøerne og Grøn-

## ÓSAMANHANGANDI LEISTUR?

Við støði í § 19 í grundlógini verður grundgivið, at tað einans kann vera Danmark, sum vegna alt ríkið kann samráðast við onnur lond. DFG skipanin loyvir einans Grønlandi og Føroyum at samráðast vegna ríkið og ikki sum sjálvstøðugir partar. Metingin er tískil, at DFG leisturin er tann víðasta heimildin, sum grundlógin loyvir í uttanríkispolitiskum viðurskiftum.

Leisturin byggir tó á grundhugsanina um ríkisfelagsskapin sum ein eindarstat, meðan eitt nú silda- og makreltrætan, sum Føroyar høvdu við Noreg og ES í 2013, annars var eitt greitt dømi um, at Føroyar uppførdu seg sum, og vórðu viðfarnar av Danmark sum ein partur, ið kundi sektast, uttan at tað hevði avleiðingar fyri Danmark.

land' um hesar avtalurnar ikki fáa nakra ávirkan á, ella avleiðingar fyri hini londini í ríkisfelagsskapinum.[160]

Yvirhøvur hevur hendan ásetingin ofta ført til høvuðbrýggj, bæði hjá politisku myndugleikunum og hjá løgfrøðingum, og ger tað stundum torført hjá føroyingum at røkja egin uttanríkispolitisk áhugamál.

Afturvendandi ósemjurnar um, hvørt Føroyar kunnu gera avtalur egna vegna og á bestan hátt røkja egin áhugamál, hava somuleiðis ført við sær eitt ynski úr Føroyum um at víðka uttanríkispolitisku heimildirnar, tí tað hevur verið trupult at fáa Danmark at víkja frá avmarkandi tulkingunum av grundlógini saman við uttanríkispolitisku lógini.[161]

Í løtuni hava Føroyar handilsavtalur við Europasamveldið (ES), Ísland (Hoyvíkssáttmálin), Noreg, Sveis og Turkaland. Harafturat arbeiðir uttanríkisráðið við at fáa fríhandilssátmálar við Eurasiatisku búskaparsamgonguna (har serliga Russland er áhugavert), Japan, Kina og Suðurkorea. Sambært heimasíðuni hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum er eisini samband við brasilskar myndugleikar um betri handilssamband, eins og møguleikar viðvíkjandi øðrum marknaðum verða kannaðir. Í november 2020 gjørdu Føroyar eisini eina partalagsyvirlýsing við USA við tí endamáli at styrkja samstarvið innan handil, gransking, mentan og útbúgving.

### RÆÐISLÓGIN

Eftir at Føroyar høvdu fingið eina yvirtøkulóg, var eisini neyðugt at fáa greiðu á, hvørji mál vóru og ikki vóru á føroyskum hondum. Í 2006 kom Ræðislógin, og hevur hon til endamáls at fáa greiðu á ivamálunum.

Eins og yvirtøkulógin snaraði Heimastýrislógini á, skuldi Ræðislógin snara fatanini av málsøkjum á. Eftir Heimastýrislógini var grundstøðið nevniliga, at øll málsøki, sum ikki serstakt vóru yvirtikin av Føroyum, vóru á donskum hondum. Ræðislógin broytti hetta soleiðis, at var ivamál um eitt málsøki var føroyskt ella danskt, skuldi grundstøðið vera, at tað var føroyskt. Á tann hátt kunnu ávísar yvirtøkur verða framdar á nógv einfaldari hátt.[162]

### FÁMJINSSKJALIÐ

Fámjinsskjalið – undirskrivað í Fámjin í 2005 – sigur í stuttum, at Danmark skal forhoyra seg í Føroyum viðvíkjandi trygdar- og verjupolitikki, um tað hevur týdning fyri Føroyar.

Fámjinsskjalið verður oftani nýtt sum eitt dømi um tað andsagnarkenda í ríkisfelagsskapinum, tí sambært galdandi avtalum kunnu Føroyar einans gera altjóða avtalur og fremja yvirtøkur, sum ikki máa støðið undan ríkisfelagsskapinum sum eindarstati, ella um hesar áleggja Grønlandi og Danmark treytir og skyldur. Verða danskir ministarar spurdir um Føroyar eiga at verða tiknar við upp á ráð, tá ið Danmark ger av, at ríkisfelagsskapurin fer í kríggj, er svarið oftani, at málið ikki beinleiðis viðvíkur Føroyum, og tískil ikki er í stríð við Fámjinsskjalið.

Spurningarnir hava verið settir ráðharrunum eftir teirri fatan, at um ríkisfelagsskapurin er ein eindarstatur – sum rættarstatsligar ásetingar vilja vera við – so kann Danmark ikki fara í kríggj einsamalt. Allur Ríkisfelagsskapurin fer í kríggj sum ein eind, og tá eru altso Føroyar og Grønland íroknað. Tískil er grundsjónarmiðið, at Fámjinssáttmálin skal virðast í sambandi við hernaðarførslu og taka Føroyar við upp á ráð. Ber tað ikki til, má rættarstatsliga fatanin broytast soleiðis, at Danmark, Føroyar og Grønland ikki eru ein eind men tríggjar.

Í svarunum leggur stjórnin ofta dent á, at avgerðirnar ikki vóru av serligum týdningi fyri Føroyar, og tískil hevur stjórnin ikki verið í stríð við Fámjinsskjalið. Tó er stjórnin í størri mun farin at siga seg ynskja betri samskifti við Føroya Landsstýri og strembar eftir at geva Føroyum rættstundis kunning. Tá leggja ráðharrarnir serligan dent á 'medindragelse' – altso

[160] Festirstein, N. (2019) Løgbiti 1: Stjórnarrættarliga støða Føroya; Uttanríkis-og Vinnumálaráðið. (2019) Uttanríkispolitisk frágreiðing; Aðalorðaskifti um uttanríkismál 2021

[161] Uttanríkis-og Vinnumálaráðið. (2019) Uttanríkispolitisk frágreiðing; Aðalorðaskifti um uttanríkismál 2021

[162] Festirstein, N. (2019) Løgbiti 1 – Stjórnarrættarliga støða Føroya

at landsstýrið verður kunnað. Tað er meira sjáldan, at ráðharrarnir brúka orðið 'medindflydelse', sum hevði merkt, at landsstýrið eisini skal fáa ávirkan á avgerðirnar.[163]

**(U)IGENKALDELIGHED**

Hóast Føroyar kunnu yvirtaka, og hava yvirtikið, fleiri málsøki og sostatt fingið størri sjálvræði, kann Danmark í teoriini taka ræði á málsøkjunum aftur. Tað kemst av, at tað sambært grundlógini ikki ber til at lata lóggávuvald, sum liggur hjá danska kongshúsinum og fólkatinginum, til nakran annan at umsita. Á sama hátt sum við DFG skipanini, kann grundlógin í veruleikanum einans lata Føroyar umsita málsøki ríkisins vegna, og kann Danmark til eina og hvørja tíð taka ræði á málsøkjunum aftur. Hetta rópast fyri 'genkaldelighed'.[164]

Undir fullveldissamráðingunum royndi Poul Nyrup Rasmussen at blíðka føroyingar við einum lyfti um, at yvirtikin málsøki og frambrot viðvíkjandi sjálvsavgerðarrætti ongantíð kundu takast frá Føroyum aftur. Høvdu føroyingar fingið størri avgerðarrætt á einum øki ella yvirtikið eitt málsøki, skuldi altso ikki vera møguligt hjá Danmark at taka Føroyar av ræði í tí málsøkinum aftur. Tað rópast eitt prinsipp um 'uigenkaldelighed' – tá ið okkurt er latið, kann tað ikki takast aftur.

Poul Nyrup Rasmussen hevur bæði í 1998 og í 2000 nevnt hendan møguleikan, men prinsippið er ongantíð felt í lóg, og tískil er ein teoretiskur møguleiki hjá Danmark at taka øki av føroyskum hondum aftur, hóast tað ikki er siðvenja fyri hesum.

**ALTJÓÐARÆTTUR OG SJÁLVSAVGERÐARRÆTTUR FØROYA:**

Tær ymsu lógirnar, sum staðfesta rættarligu støðu Føroya, elva til fleiri tulkingarósemjur um, hvørji rættindi Føroyar í veruleikanum hava. Tískil verða eisini onnur sjónarmið, prinsipp og lógir tikin fram í kjakinum. Niðanfyri taka vit samanum altjóðarætt og prinsippið um uigenkaldelighed og at enda nakrar framtíðar avbjóðingar.

Umframt at lond hava egna rættarskipan, ber til at tosa um eina altjóða rættarskipan – har lond halda eyga við hvørjum øðrum og seta sær yvirskipað mál – serliga um at varðveita frið. Kendasta dømið um eina slíka altjóða rættarskipan er ST.

ST er sprottið burtur úr ræðuleikunum frá 2. veraldarbardaga og er ein roynd at knýta øll lond saman gjøgnum felagsmálið um frið. Við tí kunnu vit eisini tosa um, at lond fáa eina trygd gjøgnum felagsskapin – ein rætt. Tað er, ógvuliga einfalt sagt, altjóðaræ ttur. Altjóðarætturin skal tryggja lond móti ágangi og stuðla londum í at varðveita viðurskifti síni uttan uppílegging frá øðrum.

Menfyri at kunna tryggja einum landi nøkur rættindi, verður eisini neyðugt at definera hvat eitt land, ella rættari, hvat ein tjóð er. Føroyar kunnu eitt nú lýsast sum ein 'serstøk tjóð', um definitiónin fyri eina serstaka tjóð var, at hon hevði egið mál og eitt greitt avmarkað landøki, og eftir teirri definitiónini kundu Føroyar kravt rætt til sjálvsavgerðarrætt.

Kortini vísir hetta seg at vera truplari enn væntað. Er eitt land undir einum øðrum landi, kann tað tulkast sum uppílegging í innanríkisviðurskifti umframt at máa sjálvsavgerðarrættin undan landinum, um inntriv verða gjørd í viðurskifti teirra. Serliga í mun til tey nógvu koloniveldini í 1960unum, tá ið ein røð av altjóða lóggávum um sjálvsavgerðarrætt skuldu staðfesta rættin hjá hjálondum at gerast fræls ella fáa eina aðra politiska støðu eftir egnum ynski.

Skilt varð millum tað, sum bleiv rópt 'innari' og 'ytri' sjálvsavgerðarrætturin. Innari sjálvsavgerðarrætturin er rætturin hjá einum fólki at stjórna sær sjálvum uttan at uttanfyristandandi blanda seg uppí. Ytri sjálvsavgerðarrætturin er rætturin hjá einum fólki sjálvi at avgera politisku støðu sína, vera fræls av fremmandum yvirvaldi, umframt frælsið til at skipa sína egnu sjálvstøðugu tjóð.[165]

Leinkja til framdar yvirtøkur: https://www.lms.fo/fo/logir-og-reglur/dagfesting-fyri-naeryvirtokur-eru-framdar/

https://www.lms.fo/fo/logir-og-reglur/dagfesting-fyri-naeryvirtokur-eru-framdar/

[163] Sí undir fólkatingsspurningar viðvíkjandi Fámjinsskjalinum

[164] Spiermann, O. (2007), s. 78-79

[165] Hannon, H. (2021)

# FYLGISKJØL

## UM FJARSKIFTISMÁLIÐ

## Fylgiskjal: Eftirlitslóggávur í fólkatinginum

Í mai 2021 samtykti fólkatingið tvær lóggávur, sum skulu økja um trygdina í Danmark, tá ið tað kemur til týðandi undirstøðukervi. Lógirnar geva myndugleikunum í Danmark víðari heimildir at forða vinnuligum avtalum, um tað inniber, at útlendskir persónar ella fyritøkur skulu eiga í ella veita týdningarmiklar tænastur til Danmarkar. Lógirnar skulu tryggja, at samfelagstrygdin ikki verður hótt, tí yvirskipaða trygdin ella veitingartrygdin ikki er í lagi.

Donsku fregnartænasturnar hava støðugt víst á, at hóttanarstøðið mótvegis Danmark er sera høgt, tá ið umræður teldusníkar, ið ræna upplýsingar hjá fólki, misnýta talgilda tøkni ella oyðileggja talgildar tænastur.[166]

Kortini hevur verið gjørligt hjá donskum telefyritøkum at samstarva við útlendskar fyritøkur, sum veita útgerð, ið møguliga loyvir ófrættakendum fram at viðkvomu upplýsingunum – eins og Huawei varð avdúkað at gera í Hollandi.[167]

Hóast hvørgin av lóggávunum fáa gildi fyri Føroyar, hevur danska stjórnin boðið umboðum úr Føroyum at vera við í arbeiðsbólkinum, sum hevur fyrireikað lóggávurnar. Eftir ynski úr Føroyum hava umboðini einans verið eygleiðarar í tí samanhanginum, og eftir ætlan skulu líknandi lógir eisini gerast fyri Føroyar.[168]

Eins og nevnt í undanfarna partinum um ríkisrættarstøðu Føroya, kunnu Føroyar (løgfrøðiliga) ikki roknast sum ein sjálvstøðug tjóð í altjóða samanhangi, hóast vit í praksis kunnu samráðast og gera avtalur við onnur lond innan yvirtikin málsøki. Tá ið Danmark setur størri avmarkingar og krøv til útlendsk samstørv, er tískil ein møguleiki fyri, at tað fær avleiðingar fyri føroyskar handilsmøguleikar og møguleikar hjá øðrum londum at gera íløgur í føroyskt vinnulív – um tað sambært kunngerðini er ein trygdarhóttan.

Tá ið løgmálaráðharrin og verjumálaráðharrin eru spurd um hetta, hava teir víst aftur, at lóggávurnar fáa avleiðingar fyri Føroyar, tí danska stjórnin virðir føroysk málsøki, og Føroya Løgting skal taka avgerðirnar hesum viðvíkjandi.

Ein afturvendandi táttur í lóggávunum er kortini, at tær skulu verja týðandi undirstøðukervi. Ongastaðni verður gjørt fullgreitt, júst hvat týðandi undirstøðukervi fevnir um. ES hevur eina ógvuliga breiða merking fyri, hvat týðandi undirstøðukervi er:

"Týðandi undirstøðukervi er ein ogn ella skipan, sum er týðandi fortreyt fyri, at samfelagið er vælvirkandi. Skaðar á týðandi undirstøðukervi, av antin oyðandi ella órógvandi slag, sum kemst av náttúruvanlukkum, yvirgangi, kriminellum virk-

### L191 – KANNING / SCREENING AV ÚTLENDSKUM ÍLØGUM (4. MAI 2021)

Lógin varð fyrst sett í gildi í ES høpi, og síðani skulu limalondini sjálvi orða lógirnar á landsstøði. Endamálið við lóggávuni er at forða beinleiðis íløgum og búskaparligum íløgum frá útlendskum aktørum, sum kunnu hótta trygd og landaskil. Heimildir verða latnar myndugleikum til at forða stórum útlendskum ognarluti í 'serliga viðbreknum samfelagsgeirum', ið sambært lógartekstinum viðvíkja verjumálum, dual-use, KT-trygd, týðandi undirstøðukervi og avgerðandi tøkni, meðan ein sjálvboðin fráboðanarskipan verður innan aðrar vinnugreinar.

Lógin er ikki sett í gildi fyri Føroyar, men Føroyar hava havt eygleiðarar í arbeiðsbólkinum, sum fyrireikaði danska lógaruppskotið. Eftir ætlan skal líknandi lóg gerast fyri Føroyar.

https://www.ft.dk/samling/20201/lovforslag/l191/index.htm

[166] Sambært frágreiðingini hjá Center for Cybersikkerhed í juni 2021 er hóttanin frá cyberkriminaliteti og cybersnjósnan sera høg.

[167] https://www.berlingske.dk/internationalt/figenbladet-er-vaek-rapport-om-stormagtens-aflytning-var-saa

[168] https://www.ft.dk/samling/20201/lovforslag/L190/bilag/1/2350529/index.htm

semi ella illviljaðum atburði, kann fáa álvarsamar avleiðingar fyri trygdina í ES og korini hjá borgarunum."[169]

Danska fregnartænastan, PET, sigur seg ráðgeva geirunum, sum viðvíkja týðandi undirstøðukervi, og tá nevna tey hesi økini:

- Orkuøkið
- KT- og fjarskiftisøkið
- Samferðsluøkið
- Matvøruøkið
- Heilsuøkið

Her nevnir fregnartænastan, at í Danmark er eitt sonevnt "sektoransvarsprincip". Tað merkir, at einstøku økini altíð hava ábyrgdina av nøktandi tilbúgving, soleiðis at kritisku funktiónirnar í samfelagnum eru í tryggari legu. PET veitir økjunum ráðgeving, soleiðis at hesi eru vitandi um trygdarkrøv og møguligar hóttanir við støði í nýggjastu metingunum um yvirgangshóttan móti Danmark.[170] Altso er talan um eina rættiliga breiða fatan av, hvat týðandi undirstøðukervi fevnir um.

### L 190 - LEVERANDØRSIKKERHED (27. MAI 2021)

Lóggávan um veitingartrygd setur størri trygdarkrøv til danskar telefyritøkur, soleiðis at óynskt privat feløg og persónar ikki hava atgongd til netið ella upplýsingarnar á netinum.

Áðrenn lógin varð samtykt, var eingin heimild at forða telefyritøkum í at samstarva við veitarar, sum metast vera ein hóttan móti trygdini í statinum. Við lógini kunnu myndugleikarnir steðga veitaraavtalum, um tær verða mettar at vera ein trygdarhóttan – t.d. tí veitarin áður hevur framt, stuðlað, ella verið undir grundaðum illgruna fyri at stuðla ella fremja njósningarvirksemi ella sabotasju í antin heimlandinum ella í øðrum londum.

Lógin er ikki galdandi fyri Føroyar, men tað verður nevnt, at mann væntar, at ein líknandi lóg eisini kemur til Føroya.

https://www.ft.dk/samling/20201/lovforslag/l190/index.htm

[169] https://ec.europa.eu/home-affairs/tags/critical-infrastructure_en

[170] https://www.pet.dk/Forebyggende%20Afdeling/Kritisk%20national%20infrastruktur.aspx

# KELDULISTI


**BÓKMENTIR OG FRÁGREIÐINGAR**

av Rana, J. (2021) *Framløga av frágreiðing um* úrvald *uttanríkismál* https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9627

Bangert Struwe, L., Vedby Rasmussen, M., Knus Larsen, K. (2012) *Suverænitetsbegrebet under kontinuerlig forandring. Suverænitet og det danske forsvar.* Det samfundsvidenskablige fakultet, Københavns Universitet

Center for Cybersikkerhed. (2021) *Cybertruslen mod Danmark 2021*

Dansk Institut for Internationale Studier. (2020) *Nye sikkerhedspolitiske dynamikker i Arktis*

Debes, H. J. (2000) *Føroya Søga 3 – Frá kongligum einahandli til embætisveldi.* Tórshavn: Føroya Skúlabókagrunnur.

Debes, H. J. (2001) *Færingernes land.* København: Multivers.

Ellemann-Jensen, U. *(1996) Din egen dag er kort. København:* Lindhardt og Ringhof

Festirstein, N. (2019) *Løgbiti 1 – Stjórnarrættarliga støða Føroya*. Løgmansskrivstovan: Tórshavn

Forsby, A. B. (2020) *America First': Denmark's Strategic Navigation in the Era of US-Chinese Rivarly.* in Esteban, M. et al. *Europe in the Face of US-China Rivalry:* the European Think-tank Network on China (ETNC)

Forsvarsministeriet. (2012) *Forsvarsforlig 2013-2017*

Forsvarsministeriet. (2016) *Forsvarsministeriets fremtidige opgaveløsning i Arktis*

Føroya Landsstýri. (1999) *Hvíta Bók, høvuðsbind*

Hannon, H. (2021) *Legal Aspects of Self-Determination.* Encyclopedia Princetoniensis: Princeton University. https://pesd.princeton.edu/node/511

Henriksen, A., Rahbek-Clemmensen, J. (2017) *Grønlandskortet: Arktis' betydning for Danmarks indflydelse i USA.* Center for Militære Studier, Københavns Universitet

Jakobsson, A. K. (2019) *Kina har banket en sikkerhedskile i Rigsfællesskabet. Nu skal vi lære at håndtere sikkerhedspolitikkens gråzone 19.* Ræson

Jakobsson, A. K. (2019) *Når Hydra angriber: Hybrid afskrækkelse i gråzonen mellem krig og fred.* Center for Militære Studier, Københavns Universitet

Jensen, B. (2004) *Færøerne under den kolde krig (1945-1991) http://tilfar.lms.fo/logir/alit/2004.03%20Kalda%20kr%C3%ADggi%C3%B0%20-%20Bent%20Jensen.pdf*

Johansen, S. T.F., Thorsteinsson, J. (1999) *Føroyar í Kalda Krígnum http://tilfar.lms.fo/logir/alit/1999.09%20F%C3%B8royar%20%C3%AD%20kalda%20kr%C3%ADgnum%20-%20svartab%C3%B3k.pdf*

Justinussen, J. C. S. (2019) *Rigsfælleskabet i et føderalt perspektiv, Politica* 51(4): 441-468.

Michelsen, P. (2019) *Framløga av frágreiðing um uttanríkismál 24. Apríl, 2019* https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9240

Rahbek-Clemmensen, J., Salling Larsen, E., Vedby Rasmussen, M. (2012) *Forsvaret i Arktis. Suverænitet, samarbejde og sikkerhed.* Det samfundsvidenskablige fakultet, Københavns Universitet

Spiermann, O. (2007) *Danmarks Rige i forfatningsmæssig belysning.* Jurist- og Økonomforbundet.

Uttanríkis- og mentamálaráðið. (2021) *Frágreiðing um úrvald uttanríkismál, 2021*

Uttanríkis- og mentamálaráðið. (2019) *Uttanríkispolitisk frágreiðing, 2019*

Umhvørvis- og vinnumálaráðið. (2013) *Beskrivelse af luftfartsområdet i relation til Færøerne* (2013) https://www.logting.fo/mal/mal/?id=80

**DAGBLØÐINI**

Dagblaðið, 01. septembur 1982
Dagblaðið, 08. desembur 1986
Dagblaðið, 20. januar 1988

Sosialurin, 10. mars 1984
Sosialurin, 17. mars 1984

Sosialurin, 14. oktobur 1989

Dimmalætting, 11. juni 1987

Fríu Føroyar, 12 desembur 1986

**LEINKI**


BBC News. Trump: (2020) *What does the US contribute to NATO in Europe?* https://www.bbc.com/news/world-44717074

Bárður á Steig Nielsen. (2021) *Vesturheimurin er okkara stavnhald* http://www.samband.fo/Default.aspx?ID=156&M=NewsV2&PID=555&NewsID=2434

Berlingske. (2020) *Sveriges regering vil øge forsvarsbudget med 40 procent* https://www.berlingske.dk/internationalt/sveriges-regering-vil-oege-forsvarsbudget-med-40-procent

Berlingske. (2021) *Internatiolt hackerangreb i USA får svenske supermarkeder i knæ* https://www.berlingske.dk/internationalt/hackerangreb-i-usa-faar-svenske-supermarkeder-i-knae

Berlingske. (2021)*Hackere bag angreb på COOP kræver halv milliard kroner* https://www.berlingske.dk/virksomheder/hackere-bag-angreb-paa-coop-kraever-halv-milliard-kroner

Berlingske. (2020) *Norge anklager Rusland for hackerangreb i Stortinget* https://www.berlingske.dk/nyheder/norge-anklager-rusland-for-hackerangreb-i-stortinget

Breum, Martin. (2018) *Russian Fish Money Keeping Faroes out of EU Sanctions* https://euobserver.com/foreign/142847

Breum, Martin. (2021) *Russerne kommer* https://www.weekendavisen.dk/2021-14/samfund/russerne-kommer?utm_medium=Social&utm_source=Facebook&fbclid=IwAR34fJIyL0Q9gGO-USFmTQODngqnMseWtrdU1xBFGpkRxh5c3ztvr2fbuG0#Echobox=1618258945

Breinstrup, T. (2020) *Forsvarsminister: Nej til 5G-udstyr fra ikke-allierede lande*

Bostrup, J. (2019) *Kinas gigant banede vej for færøsk tech*

Evenson, Pætur Hjalmar. (2021) *Sendinevnd úr USA hevur hugt at havnum í Føroyum* https://www.in.fo/news-detail/usa-hevur-kannad-havnir-i-foeroyum-til-herskip

Evenson, Pætur Hjalmar. (2021) *Føroyar skulu ikki brúkast av dønum til hernaðarlig endamál* https://www.in.fo/news-detail/foeroyar-skulu-ikki-brukast-av-doenum-til-hernadarlig-endamal

Forsvaret. (2021) *Arktisk Kommando* https://forsvaret.dk/da/organisation/arktisk-kommando/#megaMenu2

Forsvaret. (2020) *Første hold cyberværnepligtige færdige* https://forsvaret.dk/da/nyheder/2020/forste-hold-cybervarnepligtige-er-fardige/

Forsvarsministeriet. (2021) *Danmark og NORDEFCO* https://fmn.dk/da/arbejdsomraader/internationalt-samarbejde/nordefco/

Hagstovan. https://hagstova.fo/fo

Jyllandsposten. (2021) *Forsvarsminister Trine Bramsen vil have Natos anerkendelse for indsats i Arktis* https://jyllands-posten.dk/international/ECE12505820/forsvarsminister-trine-bramsen-vil-have-natos-anerkendelse-for-indsats-i-arktis/

Kringvarp Føroya. (2021) *Breddin*, 26.01.2021 https://kvf.fo/breddin?sid=119470

Kringvarp Føroya. (2021) *Tørvur á føroyskum myndugleika til netverju* https://kvf.fo/netvarp/uv/2021/07/01/froyskur-myndugleiki-skal-hava-byrgdina-av-netverjuni

Kruse, S., Winther, L. (2020) *Afsløring: Kinesisk techgigant sendte "desperate" breve til Mette Frederiksen*

Maressa, J. E. (2020) *USA opruster i Arktis og har brug for sikre havne til krigsskibe* https://jyllands-posten.dk/international/ECE12518605/usa-opruster-i-arktis-og-har-brug-for-sikre-havne-til-krigsskibe/

Maressa, J.E., Jensen, K.K., Kongstad, J. (2019) *Færøerne er fanget og klemt i striden mellem Kina og USA*

Maressa, J.E., Kongstad, J. (2019) *V: FE skal have vetoret i hele rigsfællesskabet*

Møller, M. R. (2021) *Ny milliardaftale indgået for at styrke Arktis* https://nyheder.tv2.dk/politik/2021-02-10-ny-milliardaftale-indgaaet-for-at-styrke-arktis

Møller, M.R. (2021) *TV2 erfarer: Her er Danmarks nye våben*

*i kampen om Arktis*
https://nyheder.tv2.dk/politik/2021-02-10-tv-2-erfarer-her-er-danmarks-nye-vaaben-i-kampen-om-arktis?fbclid=IwAR0gGVW7v0D9slVb-E5w7Sd6h7O2HbbTMP-7S7t5-24zk4xChXh1ys4SD5Q

Mencke, M. S. (2019) *Færøerne vil indgå en frihandelsaftale med Putins Rusland*
https://www.kristeligt-dagblad.dk/danmark/eks-udenrigsminister-advarer-faeroeerne-vil-indgaa-en-frihandelsaftale-med-putins-rusland

NATO. (2019) *10 things you need to know about NATO*
https://www.nato.int/cps/en/natohq/126169.htm

NORDEFCO. (2021) *About NORDECO*
*https://www.nordefco.org/the-basics-about-nordefco*

Nyboe, S M. (2020) *Fisk til Rusland eller storpolitik med USA?*
https://www.berlingske.dk/samfund/fisk-til-rusland-eller-storpolitik-med-usa-verdenspolitikken-har-indhentet

Pruitt, S. (2018) *What is NATO's Article 5?*
https://www.history.com/news/nato-article-5-meaning-history-world-war-2

Thomsen, J. A. (2021) *Eksperter om russiske fly i dansk luftrum: Det skal tages alvorligt, men er ikke umiddelbart en trussel*
https://www.dr.dk/nyheder/indland/eksperter-om-russiske-fly-i-dansk-luftrum-det-skal-tages-alvorligt-men-er-ikke

Tjóðveldi. (2021) *Altjóða miðdepil í Norðuratlantshavi,* heintað 2021
https://www.tjodveldi.fo/?page_id=351

Troianovski, A. (2015) *Faroe Islands Boom by Selling Salmon to Russia*
https://www.wsj.com/articles/faeroe-islands-boom-by-selling-salmon-to-russia-1424483776

Walsh, N. P. (2021) *Satellite images show huge Russian military buildup in the Arctic*, 2021https://edition.cnn.com/2021/04/05/europe/russia-arctic-nato-military-intl-cmd/index.html

http://kvf.fo/netvarp/uv/2021/05/19/yvirtikin-mlski-kunnu-elva-til-trupulleikar
https://www.fonyhedsbureau.dk/rigsmoedet-varsler-nye-tider-i-rigsfaellesskabet/
https://www.dr.dk/nyheder/indland/overblik-derfor-har-det-taget-ti-aar-faa-pandaer-til-danmark
https://www.berlingske.dk/politik/pompeo-og-kofod-vi-er-hinandens-taette-allierede-0
https://um.dk/da/nyheder-fra-udenrigsministeriet/newsdisplaypage/?newsID=F3FF133B-F795-4E6D-A876-EFBC895B57D3
https://www.bloomberg.com/news/articles/2021-03-17/biden-agrees-putin-is-killer-says-he-ll-pay-price-for-meddling
https://foreignpolicy.com/2021/05/25/biden-trump-tibet-china-policy-human-rights/

https://www.nytimes.com/2021/03/26/us/politics/biden-china-democracy.html
https://www.information.dk/indland/2016/12/loekke-stopper-kinesisk-opkoeb-groenland
https://www.berlingske.dk/kommentatorer/usa-vil-skabe-en-ny-storpolitisk-orden-og-melder-aabent-ud-om-at
https://api.altinget.dk/artikel/natos-ledere-ser-kina-som-en-fare-for-den-kendte-verdensorden
https://ec.europa.eu/home-affairs/tags/critical-infrastructure_en
https://www.pet.dk/Forebyggende%20Afdeling/Kritisk%20national%20infrastruktur.aspx
https://atlant.dk/nyheder/2020/kritisk-infrastruktur-sektorer-nyt-brief/
https://kvf.fo/breddin?sid=123818

**5G**

https://www.lms.fo/fo/kunning/tidindi/okkara-fjarskifti-skal-vera-dygt-og-trygt/

https://www.dr.dk/nyheder/penge/usa-ambassadoer-i-danmark-angriber-huawei-direktoer-han-arbejder-de-kinesiske

https://www.fonyhedsbureau.dk/kinas-ambassadoer-flere-gange-paa-faeroeerne-om-huawei/https://www.pet.dk/Forebyggende%20Afdeling/Kritisk%20national%20infrastruktur.aspx
https://www.berlingske.dk/globalt/mette-frederiksen-traekker-nye-graenser-i-fejden-mellem-kina-og-usa
https://nyheder.tv2.dk/samfund/2020-08-24-nu-kommer-5g-i-danmark-her-er-de-nye-vilde-muligheder
https://www.lms.fo/fo/kunning/sogusavnid/
https://www.berlingske.dk/internationalt/figenbladet-er-vaek-rapport-om-stormagtens-aflytning-var-saa
https://www.information.dk/indland/2019/01/kinesere-netvaerket-vaere-bange-huawei
https://www.ft.fo/nu-faa-foroyingar-5g/
https://www.ft.fo/foroya-tele-tendrad-5g/

https://nyheder.tv2.dk/samfund/2019-03-18-tdc-dropper-huawei-og-lover-5g-net-til-hele-danmark-i-2020
https://www.berlingske.dk/globalt/dokumentation-laes-udskriften-af-den-moerklagte-lydoptagelse
https://kvf.fo/dv?sid=123761
https://www.cfr.org/blog/china-huawei-5g

## FÓLKATINGSSPURNINGAR

Ósvaraður fólkatingsfyrispurningur frá Magna Arge um menningarhjálp https://www.ft.dk/samling/20181/spoergsmaal/s809/index.htm

Fólkatingsspurningur um málið um menningarhjálp frá Sjúrði Skaale https://www.ft.dk/samling/20191/spoergsmaal/s29/svar/1596377/2086782/index.htm

Spurningar viðvíkjandi Fámjinsskjalinum
https://www.ft.dk/samling/20151/almdel/f%c3%a6u/spm/6/svar/1307056/1609927/index.htm

https://www.ft.dk/samling/20151/spoergsmaal/s778/svar/1307132/1610047/index.htm

https://www.ft.dk/samling/20151/almdel/f%c3%a6u/spm/10/svar/1309220/1612991/index.htm

https://www.ft.dk/samling/20151/spoergsmaal/s825/svar/1309193/1612979/index.htm

Edmund Joensen spyr um ætlanina við nýggju samstarvsnevndini
https://www.ft.dk/samling/20201/spoergsmaal/s1631/svar/1794939/2417793/index.htm

Spurningar frá Henriki Old viðv. 5G og týðandi undirstøðukervi

https://www.ft.dk/samling/20181/spoergsmaal/s404/svar/1549999/2004986/index.htm

https://www.ft.dk/samling/20181/almdel/fou/spm/56/svar/1563229/2026428/index.htm

Fólkatingslóggávur um týðandi undirstøðukervi

https://www.ft.dk/samling/20201/lovforslag/l191/index.htm

https://www.ft.dk/samling/20201/lovforslag/l190/index.htm